# LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2004

**FRÁGREIÐING**

UM FRÁVIK MILLUM JÁTTAN OG NÝTSLU O.A.

LATIN

LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM

sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

OKTOBER 2005

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
WWW.LG.FO

**1 INNGANGUR 5**

**2 FÍGGJARMÁL 7**

**2.1 ÚTREIÐSLUR/MEIRNÝTSLA 7**
2.1.1 UMSITING AV OGN OG SKULD (RAKSTRARJÁTTAN) 3.15.1.23. 7
2.1.2 UMSITING AV TRYGDARGRUNNINUM (RAKSTRARJÁTTAN) 3.21.7.11. 7
2.1.3 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1.01. 7
**2.2 INNTØKUR 8**
**2.3 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNIR O.T. 10**
**2.4 PARTABRØV 13**
**2.5 PARTABRØV Í P/F FØROYA LÍVSTRYGGING 14**
**2.6 KAPITALOGN Í LANDSFYRITØKUM 15**
**2.7 FÍGGJARSTØÐAN HJÁ LANDSGRUNNUM O.L. 16**
**2.8 SKATTUR, INNTØKUR OG ÚTREIÐSLUR HJÁ LANDSGRUNNUM O.L. 17**
**2.9 AÐRIR GRUNNAR 18**
**2.10 FØROYAGRUNNURIN FRÁ 1971 21**
**2.11 TILKNÝTIÐ HJÁ APOTEKSVERKINUM TIL FÍGGJARLÓGINA 23**
2.11.1 SJÓNARMIÐ HJÁ LANDSSTÝRISMANNINUM Í ALMANNA- OG HEILSUMÁLUM 23
2.11.2 SJÓNARMIÐ HJÁ LANDSGRANNSKOÐANINI 24
2.11.3 VIÐMERKINGAR FRÁ FÍGGJARMÁLARÁÐNUM 25
**2.12 ÍLØGUR Í APOTEKSVERKIÐ 25**
**2.13 ÍLØGUR Í HOVSTUNNILIN 26**
**2.14 SØGULIGT BROT UM LANDSKASSAGRUNNAR O.A. 27**
**2.15 ÍLEGGINGARGRUNNURIN FYRI FØROYAR 28**
**2.16 BARSILSSKIPANIN 30**
**2.17 ARBEIÐSLOYSISSKIPANIN OG ARBEIÐSMARKNAÐAREFTIRLØNARGRUNNURIN 31**
**2.18 ROKNSKAPARVIÐURSKIFTI HJÁ KOMMUNUNUM 32**
**2.19 GRUNDLEGGJANDI IVAMÁL UM FÍGGJARLÓG OG LANDSROKNSKAP 33**

**3 LØGMANSFYRISITINGIN 35**

**3.1 MEIRNÝTSLA 35**
3.1.1 NORÐURBRYGGJAN Í KEYPMANNAHAVN 2.13.1.04. 35
**3.2 MINNINÝTSLA 35**
3.2.1 GRUNDLÓGARNEVNDIN (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.40. 35

**4 FISKIVINNA 37**

**4.1 MEIRNÝTSLA 37**
4.1.1 MAGNUS HEINASON (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.04. 37
4.1.2 SJÓVINNUFYRISITINGIN (SKIPASKRÁSETINGIN) (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.01. 37
**4.2 MINNINÝTSLA 37**
4.2.1 LIMAGJALD Í ALTJÓÐA FELAGSSKAPUM 5.34.1.07. 37
4.2.2 FISKIVINNUROYNDIR (RAKSTRARJÁTTAN) 5.34.3.07. 37
4.2.3 ÚTLÁN 5.34.5.01 37
4.2.4 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR 5.34.5.07 38

5 VINNUMÁL 39

**5.1 MEIRNÝTSLA 39**
5.1.1 SØLA AV SEISMISKUM KANNINGARÚRSLITUM 6.32.1.04. 39
5.1.2 P/F FISKAALING 6.36.1.05. 39
5.1.3 HAVBÚNAÐARROYNDIR 6.36.1.04. 40
5.1.4 LÁNSAFTURGJALD 6.37.6.01. 42
5.1.5 HAVNIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.1.14. 43
5.1.6 POSTVERK FØROYA (LØGUJÁTTAN) 6.38.3.03. 44
5.1.7 ARBEIÐSEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.39.1.07. 45
5.1.8 BARSILSSKIPAN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 45
**5.2 MINNINÝTSLA 46**
5.2.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 6.11.1.16. 46
5.2.2 FISKASJÚKUTÆNASTUR (RAKSTRARJÁTTAN) 6.36.1.07. 46
5.2.3 SÁTTMÁLAEFTIRLITIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.07. 46
5.2.4 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ 6.37.2.04. 46
5.2.5 RÚSDREKKASØLA LANDSINS (LANDSFYRITØKA) 6.37.3.01. 46
5.2.6 STUÐUL TIL INFRAKERVIÐ Á ÚTOYGGJUM 6.38.1.18. 46
5.2.7 FLOGFERÐSLA (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.38.2.10. 47
5.2.8 POSTVERK FØROYA (LANDSFYRITØKA) 6.38.3.01. 47
**5.3 UMSKIPAN AV POSTVERKI FØROYA TIL PARTAFELAG 47**
5.3.1 POSTVERK FØROYA, UMSKIPAÐ TIL PARTAFELAG 6.38.3.02. 47
5.3.2 VIÐMERKINGAR FRÁ POSTVERKSSTJÓRANUM 49
5.3.3 VIÐMERKINGAR FRÁ NEVNDINI 49
5.3.4 FRÁGREIÐING FRÁ VINNUMÁLARÁÐNUM UM TRUPULLEIKARNAR VIÐ UMSKIPANINI 49
5.3.5 VIRÐISMETING AV FØSTU OGNUNUM 50
5.3.6 TÆNASTUMANNAEFTIRLØNARSKYLDUR 51

6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 53

**6.1 MEIRNÝTSLA 53**
6.1.1 MENTAMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.09. 53
6.1.2 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 53
6.1.3 EFTIRÚTBÚGVING OG SKEIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.34. 53
6.1.4 STUÐUL TIL FÓLKASKÚLAR 7.23.2.03. 53
6.1.5 MIÐNÁMSÚTBÚGVINGAR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.3.05. 54
6.1.6 EFTIRÚTBÚGVING AV YRKISLÆRDUM (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.3.21. 54
6.1.7 MASKINMEISTARASKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.07. 54
6.1.8 FØROYA LÆRARASKÚLI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.13. 54
6.1.9 YMISKAR VERKÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.23. 55
6.1.10 LESTRARSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.7.04. 55
**6.2 MINNINÝTSLA 55**
6.2.1 SKÚLATILBOÐ FYRI MENNINGARTARNAÐ (LØGUJÁTTAN) 7.23.2.05. 55
6.2.2 SKÚLATILBOÐ FYRI MENNINGARTARNAÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.06. 55
6.2.3 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSKVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 55
6.2.4 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 55
6.2.5 SKÚLADEPIL Í MARKNAGILI (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 55
6.2.6 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 55
6.2.7 FERÐAENDURGJALD TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.18. 56

6.2.8 FØROYA BRANDSKÚLI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.3.26. 56
6.2.9 MUSIKKSKÚLAR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.5.10. 56
6.2.10 ALMANNA- OG HEILSUSKÚLI FØROYA (LØGUJÁTTAN) 7.23.6.08. 56
6.2.11 UNGDÓMS- OG BYGDAHÚS 7.24.1.25. 56
6.2.12 BÓKASØVN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.02. 56
6.2.13 KIRKJUBØMÚRURIN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.23. 56
**6.3 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY 7.23.3.06. 56**
**6.4 ÍTRÓTTAANLEGG 7.24.6.12. 58**

**7 INNLENDISMÁL 61**

**7.1 MEIRNÝTSLA 61**
7.1.1 FØROYA KÆRUSTOVNUR (RAKSTRARJÁTTAN) 15.14.1.04. 61
**7.2 MINNINÝTSLA 61**
7.2.1 DÁTUEFTIRLITIÐ (RAKSTRARTJÁTTAN) 5.14.2.02. 61
7.2.2 STUÐUL TIL UMHVØRVISVERNDARTILTØK 15.30.1.01. 61
7.2.3 STUÐUL TIL ÚTOYGGJAMENNING 15.37.2.19. 61
7.2.4 STRANDFARASKIP LANDSINS 15.38.2.01. 61
7.2.5 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 15.38.2.02. 61

**8 ALMANNAMÁL 63**

**8.1 MEIRNÝTSLA 63**
8.1.1 BARNAFORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.01. 63
8.1.2 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.04. 63
8.1.3 HEILSUFRØÐISKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.3.12. 63
8.1.4 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.7.01. 64
8.1.5 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.05. 64
8.1.6 UMSORGANARARBEIÐI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.06. 64
**8.2 MINNINÝTSLA 65**
8.2.1 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.4.01. 65
8.2.2 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.01. 65

**9 HEILSUMÁL 67**

**9.1 MEIRNÝTSLA 67**
9.1.1 UPPLÝSING OG RÁÐGEVING (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.1.04. 67
9.1.2 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.04. 67
9.1.3 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.08. 68
9.1.4 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.10. 68
9.1.5 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.15. 68
9.1.6 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.20. 68
9.1.7 DEILDIN FYRI ARBEIÐS- OG ALMANNAHEILSU (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.30. 72
9.1.8 VIÐGERÐARSTOVNURIN BLÁKROSSHEIMIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.4.03. 73
**9.2 MINNINÝTSLA 73**
9.2.1 ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.24. 73
9.2.2 ÚTBÚGVING AV YNGRI LÆKNUM (RAKSTRARJATTAN) 8.20.2.05. 73
9.2.3 SKÚLALÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJATTAN) 8.20.2.07. 74

9.2.4 APOTEKSVERKIÐ (LANDSFYRITØKA) 8.20.2.08. 74
9.2.5 MEDICOTEKNISK TÓL (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.06. 74
**9.3 GÓÐKENNINGARMANNAGONGDIR 74**

# 1 INNGANGUR

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðanina av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok lata Landsgrannskoðanini eina frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið frágreiðingarnar um frávik sambært landsroknskapinum 2004, og hevur síðani havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Í hesi frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki víst á og umrøtt stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni/aðalráði. Harumframt hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingini umrøtt onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Í sambandi við at løgtingsgrannskoðararnir løgdu landsroknskapin 2003 fyri tingið til samtyktar í mars 2005, mælti fíggjarnevndin í áliti sínum løgtingsgrannskoðarunum til at umhugsa at leggja frágreiðingina um játtanareftirlit viðvíkjandi landsroknskapinum 2004 fyri Løgtingið nakað fyrr, sjálvt um samlaða grannskoðanin av landsroknskapinum ikki var liðug. Hetta fyri at tingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjalógarviðgerðina.

Við hesum verður frágreiðingin latin løgtingsgrannskoðarunum sambært § 12 í grannskoðanarlógini, og sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina. Sambært tingskipanini verður ein tílík frágreiðing viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til løgtingið.

Tórshavn, 26. oktober 2005

Leivur Harryson

# 2 FÍGGJARMÁL

## 2.1 Útreiðslur/meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Umsiting av ogn og skuld landsins (rakstrarjáttan) | 1.300 | 1.900 | 600 |
| Umsiting av Trygdargrunninum (rakstrarjáttan) | 100 | 200 | 100 |
| Rentur av landsins skuld | 130.200 | 146.881 | 16.681 |

### *2.1.1 Umsiting av ogn og skuld (rakstrarjáttan) 3.15.1.23.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.300 t.kr. Meirnýtslan er 600 t.kr.

Játtanin er til at samsýna Landsbankanum fyri at røkja lán landskassans. Sambært sáttmála 21. november 1998 millum Fíggjarmálaráðið og Landsbankan er samsýningin ¼ promillu av ríkislánum og ½ promillu av øðrum lánum.

Meirnýtslan stavar frá, at Landsbankin í 2004 rindaði serkønum ráðgevarum 562 t.kr. í sambandi við lánsbrævaútgávuna í november 2004. Í 2003 vóru útreiðslurnar til serkøna hjálp 500 t.kr. Sambært sáttmálanum skal landið endurrinda Landsbankanum tílíkar útreiðslur.

Sambært landsstýrismanninum var Fíggjarmálaráðið ikki varugt við, at nýtslan í 2003 fevndi um bæði samsýning til Landsbankan og gjald fyri ráðgeving, og tí var játtanin í 2004 bert samsýning til Landsbankan 1,3 mió.kr.

### *2.1.2 Umsiting av Trygdargrunninum (rakstrarjáttan) 3.21.7.11.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 100 t.kr. Meirnýtslan er 100 t.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 115 t.kr. til væntaðu meirnýtsluna. Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan vísandi til, at *"tá fyrisitingin er partur av Toll & Skatt, heldur nevndin ikki, at grundarlag er fyri at mæla til meirjáttan."* Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Á fíggjarlógini 2005 er játtanin 225 t.kr. Landsgrannskoðanin spurdi landsstýrismannin, um henda játtan er í samsvari við viðmerkingarnar frá Fíggjarnevndini.

Í september 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at Fíggjarnevndin hevði ongar viðmerkingar til hetta mál í álitinum til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri 2005. Sambært landsstýrismanninum eigur tað tó at verða umhugsað, um játtanin í framtíðini skal verða løgd afturat játtanini hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

### *2.1.3 Rentur av landsins skuld 20.50.1.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 130,2 mió.kr. Meirnýtslan er 16,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan, 14 mió.kr., í høvuðsheitum frá avseting ímóti ikki staðfestum kurstapi av lánsbrøvum. Avsetingin verður bert staðfest, um landskassin velur at innfría lánsbrøv fyri tíðina. Sambært landsstýrismanninum er tað ikki serliga sannlíkt, og tískil verður kurstapið inntøkuført í komandi fíggjarárum.

## 2.2 Inntøkur

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2004.

mió.kr.

| | 20.52.1. Skattainntøkur | Játtanin | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Vanligur landsskattur | 1.300,0 | 1.320,9 | 20,9 |
| 06 | Kolvetnisskattur, persónar | - | 1,5 | 1,5 |
| 07 | Felagsskattur | 100,0 | 109,0 | 9,0 |
| 08 | Kolvetnisskattur, feløg | 5,0 | 3,4 | -1,6 |
| 11 | Kapitalvinningsskattur | 50,0 | 62,4 | 12,4 |
| 13 | Avgjald av kapitaleftirlønum | 9,0 | 9,0 | - |
| 25 | Arvaavgjald | 4,0 | 3,3 | -0,7 |
| 28 | Gjald til barsilsskipanina | 28,5 | 29,6 | 1,1 |
| 30 | Gjald frá Búnaðarstovuni | 0,5 | 0,1 | -0,4 |
| | **Tilsamans** | **1.497,0** | **1.539,2** | **42,2** |

Størstu frávikini eru "Vanligur landsskattur", "Kapitalvinningsskattur" og "Felagsskattur", sum eru ávikavist 20,9 mió.kr., 12,4 mió.kr., og 9,0 mió.kr. hægri, enn mett var.

mió.kr.

| | 20.52.2. Avgjøld og tollur | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Meirvirðisgjald | 963,0 | 941,4 | -21,6 |
| 04 | Tollavgjald | 30,0 | 29,9 | -0,1 |
| 07 | Punktgjald | 155,0 | 173,7 | 18,7 |
| 10 | Lønhæddargjald | 11,0 | 11,6 | 0,6 |
| 13 | Brennioljugjald | 63,0 | 67,7 | 4,7 |
| 16 | Framleiðsluavgjald | 17,5 | 18,5 | 1,0 |
| 19 | Skrásetingargjald | 63,0 | 66,3 | 3,3 |
| 22 | Vegskattur (vektgjald) | 49,0 | 50,4 | 1,4 |
| 25 | Ferðaavgjald | 10,0 | 10,8 | 0,8 |
| 28 | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | 2,2 | 2,3 | 0,1 |
| | **Tilsamans** | **1.363,7** | **1.372,6** | **8,9** |

Størstu frávikini eru "Meirvirðisgjald" og "Punktgjald", sum eru ávikavist 21,6 mió.kr. lægri og 18,7 mió.kr. hægri, enn mett var.

mió.kr.

| | 20.52.3. Ymiskar inntøkur | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 16,0 | 19,9 | 3,9 |
| 04 | Útluting frá almennum partafeløgum | 12,0 | 12,0 | - |
| 10 | Aðrar inntøkur | 5,6 | 9,0 | 3,4 |
| | **Tilsamans** | **33,6** | **40,9** | **7,3** |

t.kr.

| | 20.52.3.10. Aðrar inntøkur | Játtan | Roknskapur | meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Loyvisgjald | 50 | - | -50 |
| 02 | Skeinkiloyvi, avgjald | 65 | 105 | 40 |
| 04 | Navnaprógv | 10 | 26 | 16 |
| 05 | Bøtur | 185 | 3.800 | 3.615 |
| 06 | Happadrátturin, avgjald | 200 | - | -200 |
| 07 | Burturlutingargjald | 1.000 | 664 | -336 |
| 09 | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 70 | 113 | 43 |
| 11 | Víddargjald | 1.920 | 2.107 | 187 |
| 12 | Nýtslugjald (royalties, oljugjøld) | - | 61 | 61 |
| 60 | Óvanligar inntøkur | 2.100 | 2.175 | 75 |
| | **Tilsamans** | **5.600** | **9.051** | **3.451** |

Størsta frávikið er "Bøtur", sum er 3.615 t.kr. hægri, enn mett var. Talan er um landskassans part av bótum og haldáleggjan sambært avtalu 17. august 1981 og 10. mai 1982 millum "Statsministeriet" og Føroya Landsstýri *"om fordeling af provenuet af visse bøder og konfiskationsindtægter, der hidrører fra overtrædelser af gældende love om fiskeri på fiskeriterritoriet ved Færøerne."*

Høvuðskontan "Óvanligar inntøkur" verður nýtt til óvanligar inntøkur og útreiðslur, sum ikki kunnu verða bókaðar aðrastaðni. Í 2004 er talan um inntøkur frá tryggingarfeløgunum fyri sleip. Fiskiveiðieftirlitið fekk í 2004 dupulta inntøku frá tryggingarfeløgunum, tí inntøkan fyri 2003 eisini varð bókað í 2004.

Sambært álitinum frá Fíggjarnevndini í Lm. 1-3/2004, eykajáttanarlóg august 2004, *"hevur Fíggjarnevndin valt at lata annað gjaldið innganga á § 20, so Fiskiveiðieftirlitið ikki uttan samtykt Løgtingsins fær møguleika at brúka hesar pengar."*

Fiskiveiðieftirlitið sendi ikki fyrr enn í oktober 2004 Tryggingarfelagnum Føroyar rokning fyri 2003. Sambært landsstýrismanninum kemur tílíkt ikki fyri aftur, tí við gildi frá 1. januar 2005 hava Fiskiveiðieftirlitið og tryggingarfeløgini skrivað undir avtalu um, at árliga gjaldið er 2,1 mió.kr.

mió.kr.

| | 20.54.1.01. Heildarveiting o.t. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Heildarveiting | 615,7 | 615,5 | -0,2 |
| 02 | Endurgjald | 14,2 | 17,7 | 3,5 |
| | **Tilsamans** | **629,9** | **633,2** | **3,3** |

Størsta frávikið er á høvuðskontu "Endurgjald", sum er 3,5 mió.kr. hægri, enn mett var. Árini frammanundan hevur henda konta einans fevnt um endurrindan frá danska statinum fyri læraraeftirlønir, tvs. tann partin av eftirlønini, sum tænastumenn hava vunnið sær, áðrenn teir "vórðu yvirtiknir". Í 2004 er hetta endurgjald umleið 14,7 mió.kr. av samlaðu inntøkunum upp á 17,7 mió.kr.

Í 2004 eru harafturat bókaðar 3 mió.kr. í endurgjaldi frá danska statinum viðvíkjandi sjúkrahúsverkinum. Hetta endurgjald er ikki komið við í roknskapin árini frammanundan, m.a. tí samskiftistrupulleikar hava verið millum danskar og føroyskar myndugleikar um, hvar endurgjaldsuppgerðin skuldi sendast. Talan er um mett endurgjald fyri tíðarskeiðið 1. januar 1977 – 31. desember 2004.

Spurt, nær upphæddin væntandi verður goldin, kunnaði Fíggjarmálaráðið í oktober 2005 um, at Føroya Gjaldstova í næstum fer at gera kravið galdandi.

## 2.3 Tænastumannaeftirlønir o.t.

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi.

Niðanfyri hava vit gjørt ein samandrátt av frágreiðingini, og vit hava kunnað um, í hvønn mun landsstýrismaðurin hevur bøtt um viðurskiftini.

Vantandi útrokning/meting av samlaðu eftirlønarskylduni

Í 2005 verða útreiðslurnar til tænastumannaeftirlønir o.t. væntandi um 52 mió.kr. netto, sum eru einar 30 mió.kr. hægri enn í 1997. Sambært landsroknskapinum eru tænastumannalønir o.t. í sama tíðarskeiði vaksnar úr um 194 til 254 mió.kr.

Einki samlað yvirlit finst yvir, hvussu nógvir tænastumenn o.a. hava vunnið sær eftirlønarrætt, hvussu nógvir teirra framvegis eru í tænastumannastarvi, eru farnir í annað starv, ella hvussu nógvir fáa eftirløn. Vit hava roynt at leita fram upplýsingar og hava gjørt eitt ávegis yvirlit, sum skal vera tikið við fyrivarni:

- Tænastumenn í starvi: 658
- Tænastumenn, farnir í annað starv: 212
- Tænastumenn o.a., ið fáa eftirløn: 344

Samanlagt er talan um umleið 1200 tænastumannamál. Størstu økini eru:

- Fólkaskúlin: 588
- Sjúkrahúsverkið: 158
- Serforsorgin: 138
- Postverkið: 74
- Toll- og Skattstova Føroya: 39
- V&B/Fiskiveiðieftirlitið: 39
- Aðalráðini: 33

Harafturat koma løgtings- og landsstýrismenn, ið eisini fáa eftirløn sum tænastumenn.

Samlaðu eftirlønarskyldurnar hjá landinum eru ikki tiknar við í landsroknskapinum; eftirlønaraldur o.a. hjá tænastumonnum er ikki skrásett á ein skipaðan hátt; fullfíggjað yvirlit er ikki yvir allar tænastumenn, ið eru ella hava verið í starvi; vissa er ikki fyri, at øll, ið hava eftirlønarrættindi, fáa eftirløn, herímillum hjúnafelagar og børn o.s.fr.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera eitt stórt vandamál, at landið ikki hevur nóg gott yvirlit yvir verandi og komandi eftirlønarskyldur og eftirlønarútreiðslur. Ongar metingar finnast av vøkstrinum í landsins útreiðslum til tænastumannaeftirlønir komandi 5, 10 ella 20 árini. Metingar av samlaðu, kapitaliseraðu eftirlønarskylduni eru ikki gjørdar. Til ber at rokna tær út, men sum víst á, er fyrst neyðugt at finna fram til, savna saman og á ein skipaðan hátt skráseta allar upplýsingar um hvønn einstakan persón. Vit hava mælt til, at farið verður undir hetta arbeiðið.

Í skrivi 27. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum ger Gjaldstovan vart við, at eftirlønarskyldan kann gerast ein stórur búskaparligur trupulleiki fyri landskassan. Sambært Gjaldstovuni verður neyðugt at kravfesta eina KT-loysn fyri at fáa skrásett skyldurnar, og síðani at gera aktuarútrokningar, fyri at finna samlaðu eftirlønarskylduna. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at Landsstýrið hevur gjørt av, at umsiting av lønum og tænastumanneftirlønum hjá landinum verður samskipað. Sambært Fíggjarmálaráðnum er neyðugt, at hetta arbeiði verður skipað við einum verkætlanarleiðara. Í fíggjarlógaruppskotinum 2005 er mett, at tað kemur at kosta 700 t.kr.

Ymiskir bókingarhættir í roknskapinum

Ymiskt er, hvar á fíggjarlógini eftirlønarútreiðslur verða játtaðar:

- eftirlønarútreiðslur til fyrrverandi tænastumenn á flest øllum stovnum verða bókaðar undir "§ 3 Fíggjarmál", og ikki undir teimum málsøkjum/virksemisøkjum, har hesi fólkini hava starvast,
- eftirlønarútreiðslur hjá fyrrverandi starvsfólkum, t.d. í heilsuverkinum, verða bókaðar á høvuðskontu, sum liggur undir virksemisøkinum "Sjúkrahúsverkið v.m.", undir málsøkinum "Heilsumál" á § 8 Almanna- og heilsumál,
- eftirlønarútreiðslur hjá fólkaskúlalærarum verða bókaðar undir virksemisøkinum "Fólkaskúlin v.m." á § 7 Útbúgving og gransking o.a.,
- eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn verður bókað undir málsøkinum "Løgtingið" á § 1,
- endurgjald frá danska statinum verður í einum føri tikið við undir inntøkum sum "Heildarveiting o.t.", í øðrum førum verður tað bókað á teimum kontum, har eftirlønin verður útreiðsluførd.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera rætt, at hava so ymiskar bókingarhættir, og hevur mælt til at finna ein hóskandi hátt at bóka eftirlønir. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at ætlanin er at savna allar eftirlønarútreiðslur á eina kontu.

Árliga eftirlønarskyldan er ikki við á fíggjarlógini ella í landsroknskapinum sum útreiðsla

Í einum fíggjarári verður einki sett av ella útreiðsluført sum "eftirlønargjald" á tí stovni, tænastumaðurin starvast, t.d. tað sum svarar til, hvat eitt eftirlønarár mest sannlíkt kemur at kosta landinum "í síðsta enda". Sostatt gevur landsroknskapurin ikki eina sambærliga og rætta mynd av, hvat tað veruliga kostar at hava ein tænastumann e.l. í starvi, samanborið við onnur starvsfólk, har landið í einum fíggjarári aftrat lønini rindar eitt eftirlønargjald til tryggingarfelag, t.d. 15% til limirnar í Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya. Tá ið hesi starvsfólk fara úr starvi, er landskassin leysur av eftirlønarskylduni, og tey fáa sína eftirløn frá tryggingarfelagnum. Tá ið tænastumaður fer frá, "hongur" landskassin upp á eina skyldu at rinda honum eftirløn, so leingi hann livir, og síðani eftirløn til møguligan eftirsitandi hjúnafelaga og børn. Vit hava mælt til at endurskoða verandi játtanar- og roknskaparmeginreglur.

Í fleiri grannalondum okkara verða framtíðar eftirlønarskyldur til tænastumenn í starvi á hvørjum ári útreiðsluførdar á teimum stovnum, har teir starvast.

Í skrivi 27. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum hevur Gjaldstovan gjørt vart við, at meginreglan verður ikki fylgd um at staðfesta eftirlønarskylduna sum eina "leypandi" útreiðslu í roknskapinum, sum tað eitt nú verður gjørt í Danmark. Har er skipanin, at ein stovnur, meðan tænastumaðurin er í starvi, skal útreiðsluføra 15% av lønini sum eitt eftirlønargjald. Gjaldið verður "inntøkuført" á einari felags eftirlønarkontu, har eftirløn til allar fráfarnar tænastumenn verður bókað. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at hetta krevur eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar núverandi tænastumenn. Nevnast kann, at arbeiðsbólkurin, ið Løgtingið 1. mars 2005 samtykti at seta at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, eisini viðger henda spurning.

Einki verður lagt upp fyri til eftirlønarskyldur

Gjaldstovan hevur gjørt vart við, at eftirlønarskyldan kann gerast ein stórur búskaparligur trupulleiki fyri landskassan. Í fleiri londum, har tænastumannaeftirlønarskipanir o.t. verða nýttar, finnast skipanir, har tann, ið veitir tilsøgnina um eftirløn, tað veri seg felag, kommuna ella statur, á hvørjum ári "avdekkar" sínar eftirlønarskyldur hjá einum tryggingarfelag e.t. Sum dømi kunnu vit nevna, at flestu kommunur í Danmark árliga "avdekka" sínar eftirlønarskyldur hjá "Kommunernes Pensionsforsikring".

Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Landsstýrið setir ein arbeiðsbólk, sum við sakkønari hjálp kann meta um fyrimunir og vansar við einari skipan, har landið frá einum ávísum degi "avdekkar" komandi eftirlønarskyldur við at rinda "niðurfyri" t.d. til eitt tryggingarfelag. Í hesum sambandi kundi eisini verið vert at kannað, um landið skal fara undir at leggja upp fyri komandi útreiðslum til tær eftirlønarskyldur, sum landskassin longu hevur átikið sær. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at málið verður tikið upp, tá verkætlanarleiðari er settur at samskipa umsitingina av lønum og tænastumannaeftirlønum.

Vantandi skráseting av eftirlønarrætti hjá tí einstaka

Sambært Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum er vantandi skipað skráseting av eftirlønarrættindum hjá tí einstaka eitt stórt vandamál í umsitingini av eftirlønum. Einki samlað yvirlit er yvir tænastumenn, ið hava rætt til eftirløn frá landinum, og nýggir tænastumenn, ið verða settir í starv, verða heldur ikki skrásettir á ein skipaðan hátt. Lønardeildin gerst ikki varug við eftirlønarrættin hjá tænastumonnum, fyrr enn ein stovnur boðar Lønardeildini frá, at tænastumaður fer frá við eftirløn.

Tað kemur eisini fyri, at hjúnafelagi boðar Lønardeildini í Fíggjarmálaráðnum frá, at viðkomandi hevur rætt til útsetta hjúnafelagaeftirløn. Lønardeildin heldur tað hava stóran týdning, at eftirlønarrættur hjá tænastumonnum verður skrásettur, og at tey, ið hava ein eftirlønarrætt, fáa eina árliga fráboðan um, hvat rætturin fevnir um.

Tey trý sjúkrahúsini rinda eftirlønir um egnar lønarskipanir, og mugu sjálvi steðga eftirlønini, tá tey frætta t.d. í útvarpinum, at tænastumaður ella eftirløntur tænastumaður er deyður. Tænastumenn innan Serforsorgina og Almanna- og Heilsumálaráðið fáa eftirløn um lønarskipanina á Gjaldstovuni. Gjaldstovan fær deyðsfráboðan frá Skiftirættinum og kunnar Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um, at eftirlønin er steðgað. Eingin skipað samskiftismannagongd er á hesum øki.

Mentamálaráðið, Almanna- og Heilsumálaráðið, serstovnaøkið og sjúkrahúsini hava heldur ikki skipaðar skrásetingar av t.d. avvarðandi hjá eftirløntum tænastumonnum. Tí er ikki vist, at avvarðandi fáa ta eftirløn, tey hava rætt til. Talan kann t.d. verða um einkjur ella børn, ið av órøttum ikki fáa eftirløn. Fyri at minka um mistøk hevur Mentamálaráðið sent øllum, ið fáa eftirløn, eitt oyðublað, har tey skulu skráseta og vátta persónligar upplýsingar og binda seg til at boða frá møguligum broytingum.

Í mars 2004 savnaðust starvsfólkini, ið dagliga umsita eftirlønir, at umrøða trupulleikarnar. Á fundinum vóru tey samd um, at umsitingin av eftirlønarøkinum hjá tænastumonnum var illa greinað, fyrisitingarliga ógreið, skipað skráseting av eftirlønarrætti manglar, og vandi var fyri, at fólk hava eftirlønarrættindi, sum hvørki tey sjálvi ella myndugleikar eru varug við.

Eitt brot í fundarnotatinum er orðað soleiðis: *"Verður einki gjørt, kann enda púra galið. Eitt er, at myndugleikin ikki veit, hvørjar skyldurnar eru. Eitt annað er, at vandi er fyri, at fólk detta burtur ímillum. Tey hava kanska rætt til eftirløn, men rættindini eru vunnin fyri so langari tíð síðani, at tey hava gloymt tað. Talan kann eisini vera um hjúnafelagaeftirløn hjá hjúnafelaga, sum ikki veit seg hava rættindini. Mælt verður til at fáa skil á økinum, áðrenn tað verður kravboð frá umboðsmanninum."*

Sambært fundarnotatinum er eftirlønarøkið ógvuliga viðbrekið, tí tað er so bundið at vitanini hjá einstøkum fólkum. Í notatinum verður mælt til, at støða verður tikin til:

- at eftirlønarrættur hjá tænastumonnum skal verða skrásettur,
- hvør skal umsita økið at skráseta tænastumannaeftirlønarrætt,
- at upplýsingarnar verða skrásettar miðsavnað,
- at dátugrunnur verður gjørdur.

Tilmælið er stílað leiðaranum á Lønardeildini, sum síðani hevur kunnað aðalstjóran og landsstýrismannin og givið teimum avrit av tilmælinum. Síðani hava Fíggjarmálaráðið, Lønardeildin og Føroya Gjaldstova havt tveir fundir um málið. Eitt umboð fyri Gjaldstovuna hevur

eisini vitjað í Økonomistyrelsen í Danmark, fyri at kunna seg um, hvussu hesi viðurskifti verða umsitin har.

Gjaldstovan og Fíggjarmálaráðið halda, at skal ein skipan verða gjørd til endamálið, er tað mest natúrligt at skoyta eitt eyka modul uppí felags lønarskipanina, so til ber at skráseta øll tey, sum hava vunnið sær eftirlønarrættindi. Nógv starvsfólkamál skulu verða gjøgnumgingin á fleiri stovnum, fyri at finna fram til neyðugu upplýsingarnar um hesi starvsfólk, sum síðani skulu hava bræv um síni rættindi, og um hvussu tænastumannaeftirlønin verður roknað út. Hetta er eitt sera stórt arbeiði, ið hevur skund, tí nógv neyðug vitan finst bert í høvdinum á nøkrum fáum starvsfólkum, ið eldast og fækkast. Hildið verður eisini, at felags lønarskipanin eigur at verða broytt, soleiðis at eftirlønarrætturin, sum ein tænastumaður vinnur, verður skrásettur so hvørt.

Lønardeildin og Gjaldstovan hildu í 2004, at ein tílík skipan við tilhoyrandi mannagongdum og reglugerðum o.a. kann verða ment í 2005, um neyðug starvsfólkaorka og peningalig játtan verður sett av til endamálið. Landsgrannskoðanini kunnugt verður ikki arbeitt við hesi verkætlan í 2005 vegna vantandi orku. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at ætlanin er, at umleið 15 fólk verða savnað í eina fyrisitingarligara eind. Sambært Fíggjarmálaráðnum skal ein felags lønarfyrisiting verða komin uppá pláss í seinasta lagi á heysti 2007.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki fyrisitingarliga kunna forsvarast, at landsumsitingin ikki í øllum førum hevur fullfíggjað yvirlit yvir allar tær eftirlønarskyldur o.a., ið landskassin sambært lóg hevur átikið sær mótvegis tænastumonnum og møguligum eftirsitandi hjúnafelaga og børnum. Vandi er fyri, at fleiri av órøttum verða gloymd burtur. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at málið verður tikið upp, tá verkætlanarleiðari er settur at samskipa umsitingina av lønum og tænastumannaeftirlønum.

## 2.4 Partabrøv

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin á, at í landsroknskapinum er partapeningurin skrásettur við keypsvirði, og gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum. Talvan niðanfyri vísir, hvat partapeningurin í 10 partafeløgum, sum landið eigur, er virðismettur til í landsroknskapinum. Tilsamans er talan um 367.564 t.kr. Til samanberingar er landskassans partur av eginognini (innara virði) hjá somu feløgum sambært ársroknskapunum 2004 tilsamans 741.147 t.kr.

| **Virðið á partabrøvum** | | t.kr. |
|---|---|---|
| | **Keypsvirðið** | **Eginogn/innara virðið** |
| P/f Føroya Lívstrygging | 500 | 80.192 |
| P/f Flogsamband[1] | 1.521 | 3.725 |
| P/f Fiskaaling | 2.635 | 3.433 |
| P/f Føroya dátusavn | 200 | 237 |
| P/f Smyril Line | 2.760 | 5.879 |
| P/f Atlantic Airways | 75.000 | 126.146 |
| P/f Føroya Tele | 77.948 | 320.775 |
| P/f Vágatunnilin | 140.300 | 137.709 |
| P/f Norðoyatunnilin | 62.500 | 59.038 |
| P/f Virðisbrævamarknaður Føroya | 4.200 | 4.013 |
| **Partabrøv, tilsamans** | **367.564** | **741.147** |

[1] Roknskapartøl 2003

Sum sæst á talvuni, er keypsvirðið í flestu førum munandi lægri enn eginognin/innara virðið. Í sambandi við ætlaðu einskiljingarnar mælti Landsgrannskoðanin í seinastu frágreiðing Fíggjarmálaráðnum til at endurskoða verandi roknskaparreglur, og at umhugsa at fara yvir til at nýta innara virðið í staðin fyri keypsvirðið. Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 kunnað um, at ætlanin er at nýta innara virðið í landsroknskapinum 2005.

## 2.5 Partabrøv í P/f Føroya Lívstrygging

Landið eigur allan partapeningin í P/f Føroya Lívstrygging, sum er 500 t.kr. Sum víst á frammanfyri, hevur partapeningurin munandi hægri virði enn tað, sum stendur í landsroknskapinum. Eginpeningurin í felagnum við árslok 2004 var sambært ársroknskapinum góðar 80 mió.kr.

Sambært § 1 í Ll. nr. 105 frá 22. desember 1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" varð álagt landsstýrismanninum *"at stovna eitt lívs-tryggingarpartafelag við 500.000 kr. í partapeningi, sum verður teknaður av landsstýrinum. Partapeningurin verður ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan við heimild í løgtingslóg. Navnið á partafelagnum verður P/f Føroya Lívstrygging."*

13. mars 2002 samtykti Løgtingið uppskot til samtyktar frá 5 tingmonnum soleiðis orðað: *"Heitt verður á landsstýrið um at leggja fyri Løgtingið uppskot til broyting í løgtingslóg nr. 105 frá 22. desember 1999 um umskipan av Føroya Lívstrygging soleiðis, at Føroya Lívstrygging ístaðin verður skipað sum sjálveigandi stovnur ella á annan hátt, ið kann tryggja áhugamálini hjá øllum tryggingartakarunum um ávirkan og innlit. Ásannað verður, at um finnast skal fram til røttu skipanina av Føroya Lívstrygging, er neyðugt, at Føroya Landsstýri, áðrenn broytingaruppskotið verður orðað, tekur upp samráðingar við umboðini fyri teir løntakarar, sum hava eftirlønaruppsparingar í P/f Føroya Lívstrygging."*

Uppskot til samtyktar eru ikki bindandi, hvørki fyri Landsstýrið ella borgaran, og Ll. nr. 105/1999 "um umskipan av Føroya Lívstrygging" er óbroytt. Sostatt er framvegis galdandi, at partapeningurin er "*ogn landsins, og kunnu partabrøvini ikki avhendast, uttan við heimild í løgtingslóg"*.

Í 2003 tók Landsstýrið undir við, at helvtin av partabrøvunum verða latin einum felag við tryggingartakarunum í Føroya Lívstrygging sum limum, og skuldi eitt lógaruppskot um hetta verða lagt fyri Løgtingið á heysti 2004.

Nýtt Landsstýri varð skipað í januar 2004, og í einum uppriti 13. februar 2004 mælir landsstýrismaðurin í vinnumálum landsstýrinum til at arbeiða eftir somu ætlan. Víst verður á, at hægri søluprísur fæst, um øll partabrøvini verða lýst til sølu, men fyrmunurin við ætlaðu loysnini er, at málið um Føroya Lívstrygging verður loyst í semju við tey fakfeløg, sum hava kravt størri ávirkan til tryggingartakararnar.

25. februar 2004 fekk einskiljingarnevndin tvinni upprit frá Vinnumálaráðnum til ummælis um avhending av partabrøvunum. Við skrivi 15. oktober 2004 letur einskiljingarnevndin landsstýrismannin í vinnumálum tilmæli í málinum. Talan er um embætisnevndina, sum starvar undir politiskum bólki mannaður av løgmanni og landsstýrismonnunum í ávikavist fíggjarmálum og vinnumálum. Í skrivinum verður kunnað um, at uppgávur hjá einskiljingarnevndini og framferð í einskiljingarmálum eru skipaðar í "*Leiðreglur um at einskilja fyritøkur landsins"* frá 12. februar 2004.

Einskiljingarnevndin vísir á, at samgonguskjalið sigur, at partabrøv í LÍV og øðrum feløgum við útboði verða seld til almenningin og/ella strategiskar íleggjarar, og er hetta ikki í samsvari við tilmælið um at geva 50% av partabrøvunum ókeypis til løgfrøðiliga eind, ið skal umboða kundarnar hjá LÍV. Nevndin heldur henda loysn kann skaða álitið á einskiljingartilgongdina sum heild og kann gerast óheppið fordømi í øðrum málum, og at frægasta loysnin er at partabrøvini verða einskild eftir tí leisti, sum einskiljingarleiðreglurnar og samgonguskjalið leggja upp til.

Einskiljingarnevndin mælir í hesum viðfangi til, at kappingarstøðan í føroyska tryggingargeiranum verður lýst, áðrenn farið verður undir at evna til ítøkiligt lógaruppskot um at einskilja LÍV. Tað er neyðugt, m.a. fyri at Landsstýrið og Løgtingið skulu kunna taka støðu til, um roynt skal vera at selja til strategiskan íleggjara, sum kann *økja* um kappingina á tryggingarmarknaðinum fyri á henda hátt at verja brúkaraáhugamálini.

Einskiljingarnevndin heldur, at í hesum sambandi eigur eisini at verða mett um, hvussu landið kann minka um kappingaravlagandi leiklut sín á eftirlønarmarknaðinum. T.d. eigur at verða kannað, hvussu kundar í LÍV kunnu flyta eftirlønaruppsparingar *við landskassaveðhaldi* til peningastovnar ella aðrar fíggjarstovnar, ið kunnu umsita eftirlønaruppsparing. Í hesum viðfangi eigur t.d. eisini at verða kannað, um tað við lóg skal verða sett hámark fyri, hvussu stóran kostnað tryggingarfelag kann áleggja kundum, ið vilja flyta eftirlønaruppsparing úr einum stovni í annan. Somuleiðis verður mælt til, at virðismeting verður gjørd av LÍV, grundað á t.d. hesar fortreytir:

1. *Øll partabrøv verða boðin út í almennum útboði, har roynt verður at fáa so nógvar nýggjar partaeigarar, sum til ber, tó soleiðis, at eingin partur (ella fíggjarliga samantengdir partar) kann eiga meira enn t.d. 1% av partabrøvunum.*
2. *Øll partabrøv verða seld strategiskum íleggjara, sum skal lúka krøv um kapitalgrundarlag, førleika o.a.*
3. *Kombinatión av almennari sølu og sølu til strategiskan íleggjara við atliti til tey kritisku ognarlutføllini smb. partafelagslógini, tvs., ognarpartar svarandi upp til 33% og 50% av partabrøvunum.*

At enda viðmerkir nevndin, at hon ikki í sínum uppriti hevur lagt upp fyri tí tilgongd, ið higartil hevur verið í málinum viðvíkjandi politisku viðgerðini í Landsstýrinum og á Løgtingi.

Í einum uppriti í november 2004 heldur Fíggjarmálaráðið, at ætlanin um at lata tryggingartakarunum 50% av partabrøvunum í LÍV, og selja hini 50% til strategiskan íleggjara, er tann mest óhepna loysnin, ið hugsast kann. Við einum 50/50 er tað eingin, sum hevur meirilutan, og tí kann eingin aðalfundaravgerð takast, uttan at báðir partar eru fullkomiliga samdir.

Á landsstýrisfundi 16. november 2004 mælti landsstýrismaður í vinnumálum til at halda fast við ta kós, ið fyrr er avtalað, og landsstýrismaðurin fekk undirtøku fyri, at Vinnumálaráðið kann fara undir at fyrireika sølu av 50% av LÍV.

Landsgrannskoðanin hevur í oktober 2005 biðið biðið landsstýrismannin í vinnumálum greiða frá, hví hann ikki fylgdi tilmælinum frá einskiljingarnevndini, og hvørjar sakligar grundir eru fyri at geva burtur 50% av partabrøvunum.

Hóast landsstýrismaðurin onga heimild hevur frá Løgtinginum at avhenda partabrøvini, heitti Vinnumálaráðið á P/f Føroya Lívstrygging um at skipa fyri einum vali, har veljast skuldu 5 fólk at umboða tryggingartakararnar í tilgongdini at einskilja P/f Føroya Lívstrygging, og í juli 2005 varð eitt umboðsráð við 5 limum valt. Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin í vinnumálum um eina frágreiðing.

Umframt materiella heimild, krevst eisini fíggjarheimild at geva umrøddu gávu. Landsgrannskoðanin hevur spurt landsstýrismannin í vinnumálum, hvussu og nær ætlanin er at gera upp, játta og bóka tílíka peningaupphædd.

## 2.6 Kapitalogn í landsfyritøkum

Í landsroknskapinum 2004 fevnir hesin roknskaparpostur einans um Fíggingargrunnin frá 1992, sum er virðismettur svarandi til eginognina 1.575.935 t.kr. Eginognin hjá t.d. Føroya Realkreditstovni, Húsaláns-, Bjálvingarstuðulsláns-, Íbúða- og Búnaðargrunninum o.ø. er ikki við í landsroknskapinum.

Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiðu á hesum roknskaparposti, soleiðis at ikki bert Fíggingargrunnurin, men

eisini aðrir grunnar o.l., sum landið eigur, verða skrásettir í landsroknskapinum sum t.d. “Kapitalogn í landsfyritøkum o.l.”

Fíggjarmálaráðið hevur í oktober 2005 kunnað um, at ætlanin er at taka málið upp, og miðað verður ímóti at taka allar grunnar o.l. við sum ogn í landsroknskapinum 2005.

## 2.7 Fíggjarstøðan hjá landsgrunnum o.l.

Í talvuni niðanfyri hava vit tikið samanum høvuðstølini í fíggjarstøðuni 2004 hjá 10 stovnum-/grunnum, sum sambært Fíggjarmálaráðnum eru ogn landskassans. Harafturat eru tiknir við 7 “eksternir” grunnar, sum eru við í landsroknskapinum sum fylgiskjøl, men ikki við í fíggjarstøðuni á s. 6-7 í landsroknskapinum 2004:

mió.kr.

| | Aktiv | | | | | Passiv | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Virðisbrøv | Útlán | Áogn o.a. | Tøkur peningur | Tilsamans | Skuld | Eginogn | Tilsamans |
| *Landsgrunnar/ -stovnar:* | | | | | | | | |
| Føroya Realkreditstovnur | 78 | 562 | 3 | 5 | 648 | 70 | 578 | 648 |
| Arbeiðsloysisskipanin | 472 | 0 | 3 | 24 | 499 | 8 | 491 | 499 |
| Húsalánsgrunnurin | 106 | 204 | 22 | 110 | 442 | 14 | 428 | 442 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin | 153 | 0 | 38 | 141 | 332 | 1 | 331 | 332 |
| Landsbankin, netto | 0 | 0 | 0 | 134 | 134 | 0 | 134 | 134 |
| Bjálvingarstuðulslánsgrunnurin | 0 | 61 | 0 | 4 | 65 | 1 | 64 | 65 |
| Íbúðagrunnurin | 0 | 6 | 10 | 8 | 24 | 12 | 12 | 24 |
| Frítíðargrunnurin | 0 | 0 | 0 | 15 | 15 | 0 | 15 | 15 |
| Sjálvsognarstovnurin “Sambýlir” | 0 | 0 | 11 | 1 | 12 | 8 | 4 | 12 |
| Bókamiðsølan | 0 | 0 | 2 | 2 | 4 | 2 | 2 | 4 |
| *Landsgrunnar/ -stovnar tilsamans* | **809** | **833** | **89** | **444** | **2175** | **116** | **2059** | **2175** |
| *Eksternir landsgrunnar:* | | | | | | | | |
| Vinnuframagrunnurin | 0 | 0 | 5 | 54 | 59 | 8 | 51 | 59 |
| Forskotsgrunnur Fiskiflotans | 0 | 0 | 12 | 13 | 25 | 0 | 25 | 25 |
| Endurgjaldsgrunnur Alivinnunar | 0 | 0 | 0 | 7 | 7 | 0 | 7 | 7 |
| Mentanargrunnur Landsins | 0 | 0 | 0 | 5 | 5 | 0 | 5 | 5 |
| Granskingargrunnurin | 0 | 0 | 6 | 0 | 6 | 0 | 6 | 6 |
| Grunnur ætlaður brekaðum | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 0 | 1 | 1 |
| Búnaðargrunnurin | 93 | 70 | 0 | 61 | 224 | 1 | 223 | 224 |
| *Eksternir landsgrunnar, tilsamans* | **93** | **70** | **23** | **141** | **327** | **9** | **318** | **327** |
| **Grunnar/stovnar tilsamans** | **902** | **903** | **112** | **585** | **2.502** | **125** | **2.377** | **2.502** |

Á talvuni sæst, at grunnarnir tilsamans hava eina eginogn 2.377 mió.kr. Av hesum eru 902 mió.kr. í virðisbrøvum, og 585 mió.kr. er tøkur peningur. Útlán eru 903 mió.kr.

Á talvuni niðanfyri er í 1. talraði ein samandráttur av fíggjarstøðuni við árslok 2004, soleiðis sum hon er sett upp á s. 6 og 7 í landsroknskapinum 2004. Í 2. talraði er ein samanteljing av fíggjarstøðuni hjá frammanfyri nevndu grunnum/stovnum, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum.

mió.kr.

| | Fíggjarstøðan í landsroknskapinum 2004 | Landsgrunnar/ -stovnar, sum ikki eru við í fíggjarstøðuni í landsroknskapinum | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| **Aktiv** | | | |
| Kapitalinnskot | 1.576 | 0 | 1.576 |
| Virðisbrøv | 424 | 902 | 1326 |
| Útlán | 339 | 903 | 1242 |
| Áogn o.a. | 461 | 112 | 573 |
| Tøkur peningur | 1.903 | 585 | 2.488 |
| **Aktiv, tilsamans** | **4.703** | **2.502** | **7.205** |
| | | | |
| **Passiv** | | | |
| Skuld | 4.256 | 125 | 4.381 |
| Útjavningarkonta/eginogn | 447 | 2.377 | 2.824 |
| **Passiv, tilsamans** | **4.703** | **2.502** | **7.205** |

## 2.8 Skattur, inntøkur og útreiðslur hjá landsgrunnum o.l.

Í landsroknskapinum finnast ikki upplýsingar um roknskapartøl hjá øllum stovnum/grunnum, sum landið eigur, og sum ikki eru við í landsroknskapinum. Landsgrannskoðanin heldur, at í sambandi við viðgerð av landsroknskapinum og fíggjarviðurskiftum landsins, kundu tílíkar upplýsingar verið hentar.

Á talvuni niðanfyri hava vit sett upp nøkur høvuðstøl fyri inntøkur og útreiðslur í 2004 hjá 11 stovnum/grunnum, sum ikki eru við á fíggjarlógini/í landsroknskapinum. Harafturat eru roknskapartøl hjá 2 almennum partafeløgum eisini tikin við:

t.kr.

| | Rakstrar-inntøkur | Skattur og avgjøld | Rentu-inntøkur o.l. | Rentuút reiðslur o.l. | Lønir | Tilskot til einstak-lingar | Aðrar út-reiðslur | Løgu-út-reiðslur | Netto-tøl |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Føroya Realkreditstovnur[2] | 0 | 0 | 37.997 | -2.829 | -2.253 | 0 | -5.912 | 0 | 27.003 |
| Arbeiðsloysisskipanin | 0 | 105.860 | 19.231 | 0 | -5.802 | -109.983 | -6.514 | 0 | 2.792 |
| Húsalánsgrunnurin[3] | 269 | 0 | 18.171 | -1.077 | -4.495 | 0 | -2.361 | 0 | 10.507 |
| Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin | 0 | 61.414 | 11.800 | 0 | 0 | -48.009 | -2.347 | 0 | 22.858 |
| Landsbankin | 1.138 | 0 | 75.605 | -53.955 | -4.832 | 0 | -2.747 | 0 | 15.209 |
| Bjálvingarstuðulsláns-grunnurin | 130 | 0 | 195 | 0 | 0 | 0 | -896 | 0 | -571 |
| Íbúðagrunnurin | 0 | 0 | 317 | 0 | 0 | 0 | -365 | 0 | -48 |
| Frítíðargrunnurin | 0 | 0 | 837 | 0 | 0 | 0 | -505 | 0 | 332 |
| Sjálvsognarstovnurin Sambýlir | 920 | 0 | 32 | -396 | 0 | 0 | -914 | 0 | -358 |
| Bókamiðsølan | 1.370 | 0 | 11 | 0 | -721 | 0 | -479 | 0 | 181 |
| Búnaðargrunnurin[4] | 604 | 0 | 7.572 | 0 | -3.113 | 0 | -1.547 | 0 | 3.516 |
| P/f Vágatunnilin[5] | 26.339 | 0 | 15 | -6.048 | -2.682 | 0 | -4.950 | -2.502 | 10.172 |
| P/f Norðoyatunnilin[5] | 0 | 0 | 331 | -321 | -814 | 0 | -1.433 | -151.981 | -154.218 |
| **Grunnar/stovnar tilsamans** | **30.770** | **167.274** | **172.114** | **-64.626** | **-24.712** | **-157.992** | **-30.970** | **-154.483** | **-62.625** |

## 2.9 Aðrir grunnar

Harumframt eru 2 grunnar, har landskassin kanska í seinasta enda kann sigast at hava ognarrættin. Talan er um Framtaksgrunnin og Føroyagrunnin frá 1971:

mió.kr.

| | Aktiv | | | | | Passiv | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Virðis-brøv | Kapitalogn í øðrum feløgum | Áogn o.a. | Tøkur peningur | Til-samans | Skuld | Egin-ogn | Til-samans |
| Framtaksgrunnur Føroya | 20 | 184 | 11 | 32 | 247 | 99 | 148 | 247 |
| Føroyagrunnurin frá 1971 | 0 | 87 | 0 | 0 | 87 | 0 | 87 | 87 |
| **Tilsamans** | **20** | **271** | **11** | **32** | **334** | **99** | **235** | **334** |

Á talvuni sæst, at grunnarnir tilsamans hava eina eginogn 235 mió.kr.

Í frágreiðingini frá Løgmansskrivstovuni "um at einskilja fyritøkur landsins" frá 2001, sum varð løgd fyri Tingið til aðalorðaskiftis 22. januar 2002, verða m.a. Framtaksgrunnurin og Føroyagrunnurin frá 1971 á s. 74 í talvu 5.2 tiknir við sum "fyritøkur hjá landinum, uttanfyri landskassan". Í frágreiðingini á s. 76 verður tó gjørt vart við, at

*"Ikki er í hesi frágreiðing tikin støða til, um grunnarnir við fyritøkuognum, sum hoyra uppí, ið nevndir eru í talvu 5.2, eru ogn hjá landinum, ið kann einskiljast.*

*Nærri løgfrøðiligar kanningar eiga at fara fram viðvíkjandi einstøku grunnunum og tilknýti teirra til tað almenna. Slíkar kanningar eru viðkomandi í sambandi við játtanar- og roknskaparskipan*

[2] Avseting móti tapi 12.000 t.kr. er ikki við

[3] Afturførdar avsetingar móti tapi 6.756 t.kr. eru ikki tiknar við

[4] Talan er um roknskapartølini hjá Føroya Jarðargrunni og Grunninum fyri vakstrarhús og grønmetisframleiðslu

[5] Løguútreiðslur eru tiknar við, men ikki avskrivingar

*landskassans og eru sjálvandi eisini viðkomandi, um ognarviðurskiftini til tær fyritøkur, sum nevndar eru í talvu 5.2, ynskjast broyttar.*

*Løgfrøðiligir spurningar verða ikki viðgjørdir nærri í hesi frágreiðing, men verður m.a. víst til "Álit um landsstovnar og –grunnar og tilknýti teirra til fíggjarlóg og landsroknskap", sum Fíggjarmálastýrið hevur latið gera.*

*Í næstu pørtunum av hesi frágreiðing er valt – uttan løgfrøðiliga at taka støðu til spurningin – at taka teir grunnar og tær fyritøkur, ið nevndar eru í talvu 5.2 við undir samlaða heitinum "fyritøkur hjá landinum."*

Í frásøgn frá fundi í einskiljingarnevndini 20. januar 2003 verða Framtaksgrunnurin og Føroyagrunnurin umrøddir soleiðis: *"Neyðugt verður tó rættiliga skjótt eisini at taka viðurskiftini viðv. Framtaksgrunninum og Føroyagrunninum til viðgerðar".*

Sambært frásøgnum frá fundum í 2003 og 2004, sum vit síðani hava lisið, tykjast viðurskiftini ikki verða tikin til viðgerðar.

Landsgrannskoðanin hevur tí í september 2005 mælt Fíggjarmálaráðnum til at kanna gjøllari, hvør er tann "ultimativi" eigarin, eftirsum grunnarnir eru stovnaðir við almennum pengum. Í áliti um "Landsstovnar og –grunnar. Tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti" verða Føroyagrunnurin frá 1971 og Framtaksgrunnurin viðgjørdir ávikavist á s. 60-61 og s. 89-90. Í báðum førum verður víst á, at talan er um vinnurekandi grunnar, veruligar sjálvsognarstovnar, ið eiga seg sjálvar.

Hóast talan er um grunnar, sum eru fevndir av lógini um vinnurekandi grunnar, er tað kanska ivasamt, um teir eru "veruligir" sjálvsognarstovnar. Í hesum sambandi kann verða víst til nøkur av teimum sjónarmiðum, sum verða førd fram um munin ímillum (privatar) "ægte" sjálvsognarstovnar, og sjálvsognarstovnar "inden for den statslige forvaltning", sum verða førd fram í hægstarættardóminum um Københavns Havn A/S 23. august 2004, har m.a. verður víst til notat frá "Justitsministeriet" um "Københavns Havns retlige stilling". Dómurin snýr seg um, hvørt tað er staturin, ið hevur ultimativa ognarrættin til Københavns Havn, ið varð skipað sum sjálvsognarstovnur.

Í útskrift úr dómsbókini hjá Hægstarætti undir punkt 7.2. stendur m.a.:

> "I lovgivningspraksis og i den statsretlige litteratur er det imidlertid lagt til grund, at *lovgivnings-magten* – uden der er tale om ekspropriation – kan gennemføre indgreb i styrelses- og formuefor-hold m.v. hos en *statslig* institution, der er organiseret som et særligt forvaltningssubjekt (selv-ejende institution inden for den statslige forvaltning).
>
> Dette synspunkt har Højesteret også lagt til grund i sagen om privatisering af Statsanstalten for Livsforsikring, jf. Højesterets dom i Ugeskrift for Retsvæsen 1994, side 29 ff.
>
> Begrundelsen herfor kan i forenklet form udtrykkes således: Lovgivningsmagten bestemmer, om en samfundsopgave skal udføres som led i den almindelige statsforvaltning (f.eks. i et departement eller i en styrelse) eller i en anden statslig selvejende institution. Om den ene eller den anden organisationsform vælges, bør ikke have nogen betydning for lovgivningsmagtens frihed til at gennemføre en omorganisering. Udføres opgaven i en statslig selvejende institution (et særligt forvaltningssubjekt), kan det derfor ikke afskære lovgivningsmagten fra f.eks. at nedlægge institutionen og overføre opgaven til den almindelige statsforvaltning og institutionens formue til statskassen. En sådan råden fra lovgivningsmagtens side over, hvad der er statens, udgør ikke eks-propriation. Situationen adskiller sig statsretlig set ikke fra den situation, hvor lovgivningsmagten overfører ejendom fra et ministerium til et andet, og hvor der heller ikke er tale om ekspropriation. I begge tilfælde sker der alene en omfordeling inden for statens regi."

Í punkt 7.4 stendur m.a.:

> "Ved vurdering af det her rejste spørgsmål om ekspropriation er det derfor afgørende, om Københavns Havn må anses for en statslig selvejende institution – det vil sige et særligt forvaltn-ingssubjekt.

I vurderingen af dette spørgsmål har Justitsministeriet – i overensstemmelse med nyere statsretlig litteratur – bl.a. lagt vægt på havnens oprettelsesgrundlag, hvor havnens midler stammer fra, hvordan havnens overskud og underskud er dækket, hvordan havnens ledelse udpeges, og om havnen har tilknytning til det kommunale selvstyre.

Spørgsmålet er udførligt behandlet i afsnit 4 i Justitsministeriets notat. Konklusionen er, at havnen må anses for en statslig institution, der er organiseret som et særligt forvaltningssubjekt, dvs. en selvejende institution inden for statslige forvaltning. Der er i den forbindelse grund til at fremhæve følgende forhold:

a) Københavns Havn er ikke oprettet som en selvejende institution på grundlag af testamente eller privatretlig disposition. Tværtimod var det kongen, der havde oprettet den institution, der – i 1858, hvor den første lovregulering af havnevæsenets virksomhed fandt sted – varetog driften af den civile havn i København.

b) Private har ikke – inden den første lovregulering af havnens virksomhed i 1858 – indskudt midler i havnevæsenet på anden måde end gennem brugerbetaling m.v. Havnens regnskaber fra 1858-1998 viser endvidere bl.a., at havnen ikke i den periode har modtaget midler fra private, som ikke modsvarede en leveret ydelse fra havnen.

c) Det er lovgivningsmagten (kongen), der altid har bestemt, hvilken selvstændighed havnens ledelse skulle have. Havnens styrende organer har altid været undergivet statslig kontrol. Desuden har havnens ledelse altid været helt eller dog i altovervejende grad udpeget af det offentlige.

d) Havnens virksomhed er stedligt begrænset, men havnen er ikke en del af Københavns Kommune. Med loven om Københavns Kommune af 1857 blev der åbnet mulighed for, at kongen (indenrigsministeren) henlagde havnevæsenet under Magistraten, men denne mulighed blev ikke udnyttet."

Eisini verður undir punkt 7.6 m.a. víst á:

"I en voldgiftssag mellem Københavns Havn og Ørestadsselskabet I/S har voldgiftsretten, der bestod af 3 højesteretsdommere, i sin kendelse taget stilling til København Havns retlige status…voldgiftsretten fastslog, at Københavns Havn er en "særlig forvaltningsenhed", der skal udøve sin virksomhed på et sagligt grundlag inden for de rammer, der gælder for offentlige myndigheder."

Í dómsgrundini sigur Hægstirættur m.a.:

"Københavns Havn var allerede på et tidligt tidspunkt anerkendt som et selvstændigt retssubjekt med rets- og handleevne og egen formue. Havnen – der ikke var oprettet på grundlag af testamente eller anden privatretlig disposition – kan imidlertid efter det foran anførte ikke anses at have haft karakter af en privat ("ægte") selvejende institution, men må karakteriseres som en selvejende institution inden for den statslige forvaltning."

"Bestemmelsen i 1913-lovens § 1 om, at havnen er en selvejende institution, giver ikke i sig selv grundlag for at afgøre, om der hermed tænkes på en selvejende institution af privat karakter – en "ægte" selvejende institution – eller på en selvejende institution inden for den statslige forvaltning. Lovens indhold i øvrigt, herunder ministerens beføjelser efter lovens § 3, og landstingsudvalgets bemærkninger – "som sådan afsondret fra Ministeriet for offentlige Arbejders direkte Administration" – taler imidlertid for, at der sigtedes til en selvejende institution inden for den statslige forvaltning. Herfor taler også, at man ikke tilsigtede at ændre havnens retlige status, men alene udtrykkelig at angive den status, som den også hidtil havde haft. Udtalernes i lovforslaget og under forhandlingerne om, at havnen var ejer af sin egen formue, er ikke uforenelige med en status som selvejende institution inden for den statslige forvaltning, idet også en sådan institution må siges at have sin egen formue adskilt fra statens. 1913-loven og forarbejderne til denne lov giver således ikke grundlag for at fastslå, at det har været hensigten at anerkende Københavns Havn som en privat ("ægte") selvejende institution."

"På denne baggrund finder Højesteret, at Folketinget ikke har tilsidesat grundlovens § 73 ved at vedtage en omorganisering af Københavns Havns forhold, som indebærer, at institutionens aktiver og passiver overtages af et aktieselskab, hvis aktier ejes af staten. Dette gælder, selv om et af

formålene med denne omorganisering var at overføre en del af institutionens kapital til statskassen."

## 2.10 Føroyagrunnurin frá 1971

Í juni 2005 seldi nevndin í Føroyagrunninum 67% av partapeninginum í P/f J.F.K.-samtakinum.

Landsgrannskoðanin hevur í september 2005 spurt landsstýrismannin:

- hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til, at nevndin seldi partapening til stjóran og til ein peningastovn, hvørs stjóri er nevndarlimur í grunninum, uttan at bjóða partapeningin út, og uttan at fylgja leiðreglunum um at einskilja fyritøkur landsins,
- hvønn leiklut landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur havt í sambandi við søluna av partabrøvum hjá Føroyagrunninum, og
- um einskiljing av Føroyagrunninum er viðgjørd av einskiljingarnevndini og politiska samskipanarbólkinum undan søluni av partabrøvum hjá Føroyagrunninum.

Viðtøkur grunsins eru upprunaligu frá 16. desember 1971. Seinni eru viðtøkurnar broyttar fleiri ferðir. Í talvuni niðanfyri er víst á tær viðtøkubroytingar, ið snúgva seg um stovnsfæið, um endamálið, um viðtøkubroytingar og um avtøku av grunninum.

| Viðtøkur frá: | Um stovnsfæið | Um endamálið | Um viðtøku-broytingar | Um avtøku av grunninum |
|---|---|---|---|---|
| 16. desember 1971 | "Fondens formue er ved oprettelsen C-aktier af pålydende 7 mill.kr. i P/f J.F. Kjølbro, Klaksvik. Kapitalen er skænket fonden af Danmarks Nationalbank. I fondens formue indgår, hvad der i øvrigt måtte blive skænket til fonden. Fondens kapital må ingensinde angribes – bortset fra det tilfælde, at P/F J.F. Kjølbro opløses." | "Det nettoudbytte, som fondens formue måtte afkaste, anvendes til unge færingers erhvervsuddannelse, til støtte for erhvervsforsøg inden for fiskeri, håndværk og industri, markedsundersøgelse og lign., samt til ikke erhvervsmæssige initiativer med tilknytning til fiskerierhvervet." | "Forandringer i denne fundats samt beslutning om fondens opløsning kan kun ske med samtykke fra det færøske landsstyre og Danmarks Nationalbank." | "I tilfælde af fondens opløsning tilfalder nettoformuen landskassen, og således, at landsstyret træffer beslutning om formuens anvendelse." |
| 10. februar 1982 | Óbroytt | Óbroytt | Óbroytt | Óbroytt |
| 30. juni 1994 | "Stovnsfæ grunnsins er frá byrjan C-partabrøv áljóðandi 7 mill. kr. í P/f J.F. Kjølbro, Klaksvík. Danmarks Nationalbank hevur latið grunninum peningin. Inn í ogn grunsins gongur annars tað, sum annars verður givið grunninum. Fæ grunnsins má ongantíð nertast – uttan so, at P/f J.F. Kjølbro verður avtikið. Grunnurin kann seta á stovn og eiga vinnurekandi partafelag." | "Tað nettoavlop, sum peningur stovnsins skuldi kastað av sær, verður nýttur til vinnuútbúgving hjá ungum føroyingum, til stuðul sum studningur og/ella lán til ídnaðarroyndir innan fiskivinnu, handverk og ídnað, marknaðarkanningar og slíkt, og til ikki vinnulig tiltøk við tilknýti til fiskivinnuna." | "Broytingar í hesum viðtøkum og avgerð um avtøku grunnsins kunnu bert fara fram við samtykki frá Føroya landsstýri." | "Verður grunnurin avtikin fellur nettoognin til landskassan, og ger landsstýrið soleiðis samtykt um nýtslu av ognini." |
| 10. juni 1997 | "Stovnsfæ grunsins er:<br>a) allur partapeningurin í P/f J.K. Trol og allur C-partapeningurin í P/f J.F. Kjølbro.<br>b) Tilløga til stovnsfæið sambært avgerð nevndarinnar av avlopi sambært grannskoðaða ársroknskapi grunnsins.<br>c) Fæ, sum annars verður latið grunninum sum arvur, gáva ella á annan hátt við tí endamáli at økja um stovnsfæ grunsins.<br>Fæ grunnsins má ongantíð nertast, uttan so at grunnurin verður avtikin." | "Endamál grunsins er:<br>a) at eiga partapening í P/f J.F.K. Trol og P/f J.F. Kjølbro.<br>b) í tann mun fíggjarligu umstøður grunsins loyva tí at veita stuðul sambært grein 4 í viðtøkunum.<br>c) harumframt kann grunnurin seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg." | Óbroytt | Óbroytt |
| 11. februar 2000 | "blonk" | "Endamál grunsins er:<br>a) at eiga partapening í P/f J.F.K. Trol.<br>b) Í tann mun fíggjarligu umstøður grunnsins loyva tí at veita stuðul sambært § 4 í viðtøkunum.<br>c) Harumframt kann grunnurin seta á stovn og eiga vinnurekandi partafeløg." | "Broytingar í hesum viðtøkum kunnu bert fara fram við loyvi frá grunsmyndugleikanum eftir innstilling frá stýrinum og við samtykki frá løgmálaráðnum. Verður grunnurin avtikin, krevst somuleiðis innstilling landsstýrisins." | "Verður grunnurin avtikin, verður nettoognin nýtt samsvarandi avgerð frá stýrinum og tess innstilling til grunsmynduleikan, soleiðis at ognin í størst møguligan mun verður nýtt í samsvar við endamálsgrein grunsins." |
| 9. februar 2001 | "Stovnsfæ grunsins er kr. 20.000.000,00, sum er inngoldin í virðum." | Óbroytt | Óbroytt | Óbroytt |

## Um stovnsfæið

Í upprunaligu viðtøkunum frá 1971 var ásett, at *"Fondens kapital må ingensinde angribes"*. Henda áseting var galdandi til 11. februar 2000, tá hon var tikin úr viðtøkunum. Í broyttu viðtøkunum 9. februar 2001 er ásett, at *"Stovnsfæ grunsins er kr. 20.000.000,00, sum er inngoldin í virðum."*

**Um endamálið**

Vísandi til, at endamál grunsins m.a. er at eiga partapening í P/F J.F.K. Trol, hevur Landsgrannskoðanin í september 2005 spurt, um landsstýrismaðurin heldur tað vera í samsvari við endamálsgreinina at selja henda partapening.

Nevnast kann, at sambært fundarfrágreiðing 31. august 1971 millum løgmann og tjóðbankastjóran, spurdi løgmaður um møguleikan, at grunnurin seldi ein part av partapeningi grunsins til privatar. Tjóðbankastjórin svaraði, at tað vildi Nationalbankin ikki ganga við til.

**Um viðtøkubroytingar**

Í nærum 30 ár var galdandi, at broytingar í viðtøkunum kunnu bert fara fram við samtykki frá Føroya Landsstýri. Í viðtøkunum 11. februar 2000 er ásett, at broytingar kunnu bert fara fram "ifølge godkendelse fra fondsmyndighederne efter bestyrelsens indstilling og med Justisministeriet samtykke."

Sambært viðtøkunum frá 11. februar 2000, sum eru góðkendar av landsstýrismanninum, fara viðtøkurnar frá 30. juni 1994 úr gildi, men ikki viðtøkurnar frá 10. juni 1997. Vit hava biðið landsstýrismannin um eina frágreiðing.

Uppá fyrispurning hevur Erhvervs- og Selskabsstyrelsen í oktober 2005 kunnað Landsgrannskoðanina um, at tað sæst ikki í málinum, at grunnurin formliga hevur biðið Erhvers- og Selskabsstyrelsen um at góðkenna viðtøkurnar frá 11. februar 2000 og 9. februar 2001.

**Um avtøku av grunninum**

Í § 8 í upprunaligu viðtøkunum 16. desember 1971 var ásett, at "*i tilfælde af fondens opløsning tilfalder nettoformuen landskassen, og således at landsstyret træffer beslutning om formuens anvendelse*".

Henda áseting var galdandi í nærum 30 ár, fram til broytingina í viðtøkunum 11. februar 2000, har tað í § 10 í staðin er ásett: "*Verður grunnurin avtikin, verður nettoognin nýtt samsvarandi avgerð frá stýrinum og tess innstilling til grunsmyndugleikan, soleiðis at ognin í størst møguligan mun verður nýtt í samsvari við endamálsgrein grunsins.*"

Landsgrannskoðanin hevur í september 2005 spurt landsstýrismannin:

- hvønn týdning hann heldur tað hava, at ásetingin um at "i tilfælde af fondens opløsning tilfalder nettoformuen landskassen" varð strikað, og
- hví landsstýrismaðurin góðkendi hesa broyting í viðtøkunum uttan at leggja málið fyri Løgtingið.

## 2.11 Tilknýtið hjá Apoteksverkinum til fíggjarlógina

### *2.11.1 Sjónarmið hjá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum*

Í uppriti 15. juli 2005 til landsstýrisfund frá landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum "um at fáa Apoteksverkið, herundir Apoteksgrunnin, skipaðan uttanfyri løgtingsfíggjarlógina" verður m.a. ført fram, at Løgtingið við Ll. nr. 104 frá 5. september 1988 "um apoteksverk og heilivág" heimilaði at leggja Apoteksverkið uttanfyri fíggjarlógina. Sambært landsstýrismanninum er Apoteksverkið formelt uttanfyri fíggjarlógina, og kemur tí ikki undir ásetingarnar smb. § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini, har ásett er, at roknskapir hjá almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap, skulu verða lagdir fyri Løgtingið í seinasta lagi seks mánaðir eftir fíggjarárslok. Sambært landsstýrismanninum eru Ll. nr. 33/1994 "um landsins almenna roknskaparhald v.m." og Ll. nr. 25/1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." heldur ikki galdandi fyri Apoteksverkið.

## *2.11.2 Sjónarmið hjá Landsgrannskoðanini*

Landsgrannskoðanin heldur fleiri upplýsingar í uppritinum til landsstýrisfundin vera skeivar, t.d. at Apoteksverkið við verandi lóggávu er uttanfyri fíggjarlógina, ikki kemur undir § 45 í stýrisskipanarlógini, og ikki er fevnt av roknskapar- og grannskoðanarlóggávu, sum er galdandi fyri landsstovnar/-grunnar. Landsgrannskoðanin skal í hesum sambandi minna á, at sambært § 1 í apotekslógini er Apoteksverkið stovnur undir Føroya Landsstýri, og sambært § 23 er Apoteksgrunnurin undir Landsstýrinum. Sambært § 22 "*hava Landsapotekarin og hvørt av apotekunum hvør sín roknskap, sum verður grannskoðaður av ríkisgóðkendum grannskoðara og síðan góðkendur eftir reglunum um almennan roknskap*". Sambært hesum ásetingum er Apoteksverkið/Apoteksgrunnurin stovnur undir Landsstýrinum, og skal fylgja ásetingunum í stýrisskipanar,- roknskapar-, og grannskoðanarlógunum.

Sambært uppritinum bað landsstýrismaðurin um undirtøku fyri, at Apoteksverkið fyribils varð tikið av aftur fíggjarlógini, og skipað sum almennur stovnur uttanfyri fíggjarlógina, og at settur varð ein arbeiðsbólkur at koma við uppskoti um, "hvussu vit framyvir skipað "okkum" í Føroyum". Tað varð samtykt á landsstýrisfundi 5. september 2005. Á landsstýrisfundinum tók landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ikki undir við, at Apoteksverkið, herundir Apoteksgrunnurin, verður skipað uttanfyri løgtingsfíggjarlógina.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at Landsstýrið ikki hevur heimild at gera av at taka Apoteksverkið fyribils av aftur fíggjarlógini. Ein tílík avgerð er í stríð við galdandi lóggávu og fleiri løgtingssamtyktir.

Landsgrannskoðanin vil eisini vísa á, at í sambandi við at roknskapir hjá Apoteksverkinum eru lagdir fyri Tingið, er spurningurin um tilknýtið hjá Apoteksverkinum til fíggjarlógina eisini viðgjørdur:

7. apríl 1999 samtykti Løgtingið at góðkenna roknskapirnar hjá Apoteksverki Føroya fyri fíggjarárini 1996 og 1997 – Lm. nr. 16/10-1998 - við m.a. hesum viðmerkingum:

> *Apoteksverkið varð tikið við á § 6 á fíggjarlógini fram til 1992 og við eykafíggjarlógini fyri 1992 duttu játtanir undir § 6 burtur. § 6 varð í mong ár nýtt sum játtanargrein til stovnar, sum í stóran mun fíggja sítt virksemi við "egnum" inntøkum ella gjøldum. Fleiri av hesum stovnum hava sín egna likviditet, og nakrir hava eisini sjálvir umsitið síni lán. Hesir stovnar hava sostatt havt eitt leysari tilknýti til fíggjarlóg, landsbókhald og landskassans gjaldføri; men talan er um stovnar undir Landsstýrinum, og teir skulu tí hava fíggjarheimild frá Løgtinginum til at halda inntøkur og útreiðslur. Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani spurt Landsstýrið, um tað var í tráð við stýrisskipanarlógina, at Telefonverkið og aðrir líknandi stovnar ikki longur vórðu tiknir við á fíggjarlógina. Landsstýrið hevur svarað, at hetta ikki er í tráð við stýrisskipanarlógina. Allir stovnar, sum vóru undir § 6, eru síðani komnir við aftur á fíggjarlógina, men ikki Apoteksverkið.*
>
> *Almanna- og Heilsumálastýrið hevur í februar 1999 kunnað løgtingsgrannskoðararnar um, at ætlanin var at taka virksemið hjá Apoteksverkinum við á fíggjarlógina fyri 1999, men at Fíggjarmálastýrið tók Apoteksverkið av aftur fíggjarlógaruppskotinum, uttan at boða Almanna- og Heilsumálastýrinum frá hví.*
>
> *Løgtingsgrannskoðararnir meta, at Apoteksverkið eigur at verða tikið við aftur á fíggjarlógina, so Løgtingið fær innlit í, og fær høvi til, at taka støðu til og játta ætlaða fíggjarliga virksemið í einum fíggjarári hjá Apoteksverkinum og Apoteksgrunninum. Í hesum sambandi verður eisini mælt til at leggja uppskot fyri tingið viðvíkjandi Apoteksgrunninum, so tað verður Løgtingið, sum tekur støðu til verandi ivaspurningar og ásetir nærri reglur um, hvussu hann skal skipast, ella í øðrum lagi, um grunnurin skal takast av.*

8. mars 2001 samtykti Løgtingið at góðkenna roknskapin hjá Apoteksverki Føroya fyri fíggjárið 1999 – Lm. nr. 62/4-2000 - við m.a. hesum viðmerkingum:

> *Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna roknskapirnar hjá Apoteksverki Føroya hava løgtingsgrannskoðararnir seinnu árini víst á, at Apoteksverkið eigur at verða tikið við aftur á fíggjarlógina, so Løgtingið fær innlit í, og fær høvi til at taka støðu til og játta, ætlaða fíggjarliga*

*virksemið í einum fíggjarári hjá Apoteksverkinum og Apoteksgrunninum. Eisini er mælt til at leggja uppskot fyri tingið viðvíkjandi Apoteksgrunninum, so tað verður Løgtingið, sum tekur støðu til verandi ivaspurningar og ásetir nærri reglur um, hvussu grunnurin skal verða skipaður, ella í øðrum lagi, um hann skal verða tikin av.*

*Vísandi til fíggjarløgtingslógina fyri 2000 er Apoteksverkið nú aftur við á fíggjarlógini. Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, sum varð lagt fyri tingið 30. september 1999, verður víst á, at landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum í løtuni viðger spurningin um fíggjar- og rættarstøðu Apoteksverksins sum almennur stovnur, við serligum atliti at Apoteksgrunninum. Miðað verður ímóti so skjótt sum gjørligt at fáa formligu viðurskiftini í fasta legu.*

At enda vil Landsgrannskoðanin vísa á, at Løgtingið 1. mars 2005 - Lm. 38/2005 - einmælt samtykti uppskot til samtyktar frá limunum í Fíggjarnevndini: “Formansskapur Løgtingsins setir ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skal áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum”. Nevndin skal m.a. taka støðu til, hvussu hædd verður tikin fyri teimum karmum, ið stýrisskipanarlógin ásetir, herundir at fáa eina eintýdda lýsing/útgreining av §§ 41-45 í stýrisskipanarlógini, herímillum av almennum stovnum, sum hava sjálvstøðugan roknskap.

Eisini vísandi til hetta nevndararbeiði heldur Landsgrannskoðanin tað vera óheppið, at Landsstýrið av sínum eintingum samtykkir at leggja ein stovn fyribils uttan fyri fíggjarlógina, og uttan fyri tær roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda á økinum.

### *2.11.3 Viðmerkingar frá Fíggjarmálaráðnum*

Í viðmerkingum til málið í oktober 2005 kunnar Fíggjarmálaráðið m.a. um, at Ráðið undir ongum umstøðum tekur undir við ætlanunum hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum og Landsapotekaranum um “fyribils” at skipa Apoteksverkið í ein stovn uttanfyri fíggjarlógina, sum hvørki er “fuglur ella fiskur”. Slíkar heimagjørdar konstruktiónir skapa bert trupulleikar, og Fíggjarmálaráðið tekur undir ongum umstøðum undir við slíkum.

Fíggjarmálaráðið vísir eisini á, at Ráðið hevur alla tíðina havt og hevur framvegis somu støðu í hesum máli. Hana kenna Almanna- og Heilsumálaráðið, Landsapotekarin og allir avvarðandi partar fullvæl. Hóast tað, hava Almanna- og Heilsumálaráðið og Landsapotekarin í minsta lagi einaferð um árið vent sær til Fíggjarmálaráðið við ætlanum um at taka Apoteksverkið av aftur fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur alla tíðina víst á, at hann er harðliga ímóti hesum ætlanum hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum og Landsapotekaranum. Restin av Landsstýrinum hevur tó valt at síggja burtur frá støðuni hjá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

## 2.12 Íløgur í Apoteksverkið

Sambært uppskoti frá Almanna- og Heilsumálaráðnum 15. juli 2005, “til arbeiðssetning fyri hvussu vit framyvir skipað Apoteksverkið í Føroyum”, er ætlanin at innrætta hølir í bygningunum hjá Apoteksverkinum á Staravegi 15, og flyta framleiðsluna av sertilbúningum til sjúkrahúsini, alingina og landbúðnaðin niðan hagar. Sambært uppskotinum er neyðugt, at stórar broytingar verða gjørdar í verandi hølum, og at nógv av útgerðini, ið er niðurslitin, verður skift út.

Sambært uppskotinum er peningur uppsamlaður í Apoteksgrunninum, ið kann nýtast til endamálið. Um hesin peningur ikki er nóg mikið, er møguleiki at taka lán, soleiðis sum gjørt varð, tá Tjaldurs Apotek varð bygt.

Í uppskotinum til fíggjarlóg 2004 vórðu 4 mió.kr. settar av til at byggja nýggj virkishøli í Tórshavn. Fíggjarnevndin strikaði játtanina, vísandi til tey ógreiðu viðurskifti viðvíkjandi Apoteksgrunninum.

Í uppskotinum til fíggjarlóg 2005 vórðu 8 mió.kr. settar av til at byggja nýggj framleiðsluhøli. Mett verður, at samlaða íløgan verður 20 mió.kr. Fíggjarnevndin strikaði játtanina vísandi til at viðurskiftini viðvíkjandi Apoteksgrunninum enn ikki eru komin upp á pláss.

Vísandi til at Fíggjarnevndin tvey ár á rað ikki tekur undir við at játta pening til íløgur til Apoteksverkið, heldur Landsgrannskoðanin tað vera løgið, at landsstýrismaðurin í staðin fyri útvegar sær undirtøku á landsstýrisfundi fyri at leggja Apoteksgrunnin uttanfyri fíggjarlógina, og harvið gera íløgur fyri einar 20 mió.kr. uttanum fíggjarlógina og uttan samtykki frá Løgtinginum, hóast Fíggjarmálaráðið ikki tekur undir við hesum.

Landsgrannskoðanin skal vísa á, at nógv brævaskifti var í 1998 ímillum løgtingsgrannskoðararnar, Landsgrannskoðanina, Gjaldstovuna og Almanna- og Heilsumálaráðið um Apoteksgrunnin, serliga í sambandi við at grunnurin í 1997 keypti ein bygning fyri 9 mió.kr. Í skrivi 4. februar 1998 helt Landsgrannskoðanin, at ein landstýrismaður ikki hevði heimild til vegna Apoteksgrunnin, ið er ein internur grunnur, at keypa ein bygning ella annað, uttan at fíggjarheimild fyrst var fingin til vega frá Løgtinginum, antin á fíggjarlóg ella í aðrari játtanarlóg, ið heimilar tílíkari útreiðslu/"disposition".

Á fundi 9. mars 1998 við Almanna- og Heilsumálaráðið og Landsapotekaran var spurningurin umrøddur. Landsgrannskoðanin helt tað sum hevði størst týdning í hesum máli vera, at funnið varð fram til eina hóskandi skipan fyri, hvussu virksemið hjá Apoteksverkinum/Apoteksgrunninum aftur varð tikið við á fíggjarlógina. T.v.s. eina skipan, sum tryggjaði áhugamálini hjá Løgtinginum (sum játtandi myndugleika), hjá landsstýrismanninum/aðalráðnum, sum hevði ábyrgd/eftirlit við játtanini/lógini, umframt greið viðurskifti hjá dagligu leiðsluni. Víst varð eisini til viðmerkingarnar í uppskoti til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum um góðkenning av roknskapinum fyri 1996.

Vísandi til lógina um Apoteksverkið og heilivág frá 1988 segði Almanna- og Heilsumálaráðið seg tá ivast í, um nøkur djúpari meining var við Apoteksgrunninum. Hann var óivað tikin við í lógina, tí hann var við frammanundan. Almanna- og Heilsumálaráðið helt, at í sambandi við einari endurskoðan av lógini var vert at hugsa um, um nøkur meining var í at halda fram við hesari skipan. Landsapotekarin var samdur og vísti til forsøguna, har peningurin upprunaliga stavaði frá privata danska apotekaragrunninum, hvørs peningur stavaði frá teimum privatu apotekunum.

Á fundi 24. apríl 2002 millum Almanna- og Heilsumálaráðið, Landsapotekaran, Gjaldstovuna, Landsgrannskoðanina o.o. var niðurstøðan m.a., at *"kannað skal verða, um møguleiki er fyri at avtaka grunnin. Hetta hevur við sær, at § 23, stk. 2, í løgtingslóg um Apoteksverk skal broytast. Almanna- og Heilsumálaráðið fer at arbeiða víðari við málinum og taka málið upp politiskt, tá nýggjur landsstýrismaður er settur."*

## 2.13 Íløgur í Hovstunnilin

Umframt at leggja ætlaðu íløgurnar í Apoteksverkinum uttanfyri fíggjalógina, tykist ætlanin hjá Landsstýrinum eisini verða at leggja ætlaðu íløgurnar í Hovstunnilin uttanfyri fíggjarlógina.

Sambært Ll. nr. 34/2005 "um at gera tunnil við tilhoyrandi vegasambandi millum Øravík og Hov" verður landsstýrismanninum heimilað at skipa fyri, at tunnil við tilhoyrandi vegasambandi verður gjørdur millum Øravík og Hov. Byggiútreiðslurnar til verkætlanina kunnu í mesta lagi vera 150 mió.kr. Í 2005 eru 27,1 mió.kr. játtaðar til endamálið. Sambært uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2006 verða játtaðar 20 mió.kr., sum skulu nýtast til vegagerð og til at gera tunnilin. Ætlanin er at stovna partafelag, sum skal standa fyri tunnilsgerðini, og fíggjar partafelagið í fyrstu syftu alt arbeiðið.

Fíggjarmálastjórin vísir í september 2005 á, at í staðin fyri at seta veruligu útreiðsluna, 70 mió.kr., á fíggjarlógina verður sett eitt gjald, 20 mió.kr., til eitt partafelag. Restina, 50 mió.kr., lænir partafelagið. Henda lántøka kemur ikki at síggjast í landsroknskapinum, og tá allar

landsins skyldur ikki síggjast í roknskapinum, verður gjøgnumskygni minni. Samlaðu almennu útreiðslurnar í 2006 koma í hagtølunum at vera lægri, enn tær veruliga eru, meðan tær í árunum aftaná koma at verða hægri, enn tær veruliga eru. At enda ger fíggjarmálastjórin vart við, at: "Partafelagsskipanin er ein sera góð skipan til vinnuligt virksemi. Skipanin er eisini vælegnað til alment virksemi, ið er vinnuligt, men at nýta skipanina til at pynta um úrslitið á fíggjarlógini er lítið skilagott."

## 2.14 Søguligt brot um landskassagrunnar o.a.

Landsgrannskoðanin skal, í framhaldi av umrøðuni av ætlanum Landsstýrisins at leggja íløgur og útreiðslur uttanfyri fíggjarlógina, draga fram nøkur søgulig brot um hetta evnið. Fyri 15 árum síðani legði táverandi Landsstýri í uppskotinum til fíggjarløgtingslóg 1991 eina ætlan um at fara yvir til eina skipan, har allar útreiðslur skuldu standa á fíggjarlógini, uttan mun til um tær vóru fíggjaðar við skatti, láni ella úr grunni, og ætlanin var at taka av allar landskassagrunnar, uttan nøkur fá undantøk. Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið (Lm. nr. 26/1990) førdi Landsstýrið m.a. fram:

> *"Skulu politisku myndugleikarnir hava nakran møguleika at gera sær eina mynd av, hvussu stórt almenna virksemið verður í einstøku árunum, er neyðugt at seta alt tað ætlaða byggivirksemið í einum komandi fíggjarári á fíggjarlógina. Tað skal viðmerkjast, at hetta er tann framferðarháttur, ið verður nýttur í øðrum londum. Allar ætlaðar íløguútreiðslur í 1991, ella íløgukarmur, standa tí á fíggjarlógaruppskotinum fyri 1991."*

> *"Tað hevur higartil verið sera torført at síggja, hvussu stór nýtslan hjá landinum er í einum fíggjarári, av tí at ein munandi partur av rakstrarútreiðslunum er nýtsla úr grunnum. Í framlagda fíggjarlógaruppskoti eru allar rakstrarútreiðslur settar á sjálva fíggjarlógina. Avleiðingin av, at skipanin við grunnum dettur burtur, er, at allar ítøkiligar byggiætlanir skulu við á fíggjarlógina."*

Á eykajáttanarlógini desember 1997, og síðani á fíggjarlógini fyri 1998 varð peningur aftur játtaður í grunn "til løgur innan samferðsluøki". Sambært samgonguskjalinum frá 1998 var ætlanin at seta 20 mió.kr. í grunnin næstu 4 árini til fast samband um Vestmannasund. Grunnurin skuldi hava heimild at taka upp lán og krevja inn bummpening.

Í skrivi 4. juni 1998 til landsstýrismenninar í fíggjarmálum og vinnumálum vísti Landsgrannskoðanin m.a. á , at *"tað seinastu árini hevur verið breið politisk semja um at fara heilt frá tílíkum grunsjáttanum, sum vórðu nógv nýttar í áttatiárunum m.a. á samferðslu- og fiskivinnuøkinum, har meginparturin av nýtsluni fór fram úr grunnum, uttan samsvar við árligu játtanirnar á fíggjarlógini."*

Í skrivi 16. juni 1998 upplýsti landsstýrismaðurin í vinnumálum m.a., at *"Trupulleikin við at nýta vanligar løgujáttanir til stórar íløgur (talan kann t.d. vera um 80-100 mió.kr. ávíst ár til bert tað eina anleggið, t.d. eitt Suðuroyarskip ella ein undirsjóvartunnil) er, at hetta er nærum ógjørligt at fáa at passa inn í vanliga løgukarmin, sum fyri alla fíggjarlógina kanska bara er einar 100-120 mió.kr."*

Í skrivi 20. juli 1998 svaraði Landsgrannskoðanin m.a., *"at landsstýrismaðurin í vinnumálum eftir hesum at døma, metir, at "vanligi" íløgukarmurin er ein forðing fyri at nýta verandi fíggjarlógar- og játtanarskipan á samferðsluøkinum. Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja hesa grundgeving. Um tað er politisk semja um at gera ávísar íløgur í einum komandi fíggjarári á ymsum málsøkjum, stórar sum smáar, ávirka hesar støddina av samlaða íløgukarminum, sum er partur av samlaða fíggjarlógaruppskotinum, sum Landsstýrið leggur fyri Løgtingið til støðutakan. Tað er væl einki í verandi "skipan", sum setir nakað mark fyri, hvat er vanligt ella óvanligt. Tað er væl heldur ikki nakað óvanligt í, at løgurnar ávís ár eru væl størri ella væl minni enn onnur ár, og hetta ger seg galdandi á øllum málsøkjum."* Landsgrannskoðanin helt, at *"grundgevingin hjá Vinnumálaráðnum fyri, at verandi játtanarskipan ikki er nýtilig til størri íløgur á samferðsluøkinum, ikki er eitt haldgott grundarlag fyri at fara frá verandi játtanarskipan".*

Í skrivi 8. juli 1999 førdi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum m.a. fram, at *"Sambært nýggju játtanarskipanini skal heimild til almennar útreiðslur landskassans verða útvegað við fíggjarlóg. Allar útreiðslur landskassans skulu síggjast í fíggjarlógini. Tað ger sostatt ongan mun, um spart er upp til*

*eitt endamál frammanundan ella ikki. Hevur Landsstýrið eitt ynski um at fremja eina ávísa løgu, má útreiðslan samtykkjast við fíggjarlóg.*

*At gera ein undirsjóvartunnil er ikki øðrvísi enn aðrar løguútreiðslur, ið standa á fíggjarlógini. Fyrisitingarliga er einki til hindurs fyri at seta eina útreiðslu uppá 100 mió.kr. til ein undirsjóvartunnil á fíggjarlógina fyri 2000.*

*At leggja tílíkt virksemi uttanfyri landskassan, skerjir um møguleikarnar hjá landsmyndugleikunum fyri at gera sær eina heildarmynd av almenna virkseminum í landinum.*

*Játtanin í "Grunn til undirsjóvartunnil" er seinni broytt til játtan til partafelag, ið hevur til uppgávu at gera undirsjóvartunnil. Tað skal viðmerkjast, at trupulleikarnir við vantandi yvirliti yvir samlaða virksemið hjá almenna sektorinum, og minkandi møguleikum at stýra samlaða almenna virkseminum, ikki gerast minni av at leggja alment virksemi í partafeløg."*

## 2.15 Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

Íleggingargrunnurin hevur havt ein týðandi leiklut í sambandi við fígging av almennum íløgum. Vit hava tí valt at kunna gjøllari um virksemið hjá grunninum. Á talvuni niðanfyri er gjørdur ein samandráttur av roknskapartølunum árini 1995-2004:

(mió.kr.)

| | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | 1995 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Rentur av útlánum | 24 | 25 | 23 | 15 | 16 | 14 | 15 | 18 | 23 | 22 |
| Rentur av peningaogn | 6 | 6 | 8 | 10 | 7 | 8 | 9 | 10 | 6 | 6 |
| Afturførd avseting | - | - | - | - | - | - | - | - | 30 | 40 |
| Skattur | -6 | -6 | -4 | - | - | - | - | - | - | - |
| **Ársúrslit** | **24** | **25** | **27** | **25** | **23** | **22** | **25** | **28** | **59** | **68** |
| **Aktiv** | | | | | | | | | | |
| Innistandandi og virðisbrøv | 323 | 262 | 226 | 302 | 342 | 341 | 304 | 330 | 247 | 180 |
| Útlán | 452 | 487 | 496 | 393 | 327 | 303 | 318 | 268 | 323 | 330 |
| Aktiv tilsamans | 775 | 749 | 724 | 695 | 669 | 644 | 622 | 598 | 570 | 510 |
| **Passiv** | | | | | | | | | | |
| Skuld | 6 | 4 | 4 | 2 | 2 | - | - | - | - | - |
| Eginogn | 769 | 745 | 720 | 693 | 667 | 644 | 622 | 598 | 570 | 510 |
| Passiv tilsamans | 775 | 749 | 724 | 695 | 669 | 644 | 622 | 598 | 570 | 510 |

Á talvuni sæst, at ársúrslitið hjá grunninum hevur í mong ár ligið um einar 25 mió.kr. Størstu inntøkurnar eru rentur av útlánum. Seinnu árini hevur grunnurin rindað 25% í skatti. Fyrisitingarútreiðslur hava í mong ár ligið um 200 t.kr.

Við árslok 2004 vóru innistandandi og virðisbrøv 323 mió.kr. Av teimum stóðu 263 mió.kr. í føroyskum peningastovnum og 60 mió. kr. í lánsbrøvum.

Á talvuni sæst eisini, at samlaðu útlánini úr grunninum við árslok 2004 vóru 452 mió.kr. Rentan seinnu árini liggur um 5% p.a. í miðal. Talvan niðanfyri vísir, hvør hevur lænt pening úr grunninum. Tølini vísa, hvussu stór lánini vóru við árslok árini 1995-2004:

mió.kr.

| Útlán | 2004 | 2003 | 2002 | 2001 | 2000 | 1999 | 1998 | 1997 | 1996 | 1995 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| SEV | 156 | 171 | 144 | 156 | 169 | 181 | 194 | 138 | 160 | 159 |
| Telefonverkið | 8 | 12 | 14 | 17 | 20 | 23 | 25 | 28 | 31 | 34 |
| Føroya Landsstýri | - | 99 | 99 | 99 | 99 | 99 | 99 | 102 | 99 | 99 |
| Føroya Ídnaðargrunnur | - | - | - | - | - | - | - | - | 33 | 38 |
| P/f Atlantic Airways | 22 | 29 | 56 | 38 | 39 | - | - | - | - | - |
| P/f Vágatunnilin | 141 | 176 | 183 | 83 | - | - | - | - | - | - |
| P/f Norðoyatunnilin | 125 | - | - | - | - | - | - | - | - | - |
| Útlán, tilsamans | 452 | 486 | 496 | 393 | 327 | 303 | 318 | 268 | 323 | 330 |

Á talvuni sæst m.a., at SEV støðugt hevur lænt pening úr grunninum. Tá ið Landsstýrið í 1995 saman við donsku stjórnini stovnaði Framtaksgrunnin, lænti Landsstýrið 99 mió.kr. frá Íleggingargrunninum. Peningurin varð goldin aftur í 2004.

Í sambandi við keyp av flogfari og tyrlu, hevur grunnurin lænt Atlantic Airways nakað av peningi. Annars eru størstu útlánini hjá grunninum seinnu árini farin til P/f Vágatunnilin og síðan 2004 eisini til P/f Norðoyatunnilin.

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðaraviðurskifti". Á s. 58-59 verður Ílegging-argrunnurin umrøddur. Har verður m.a. víst á, at talan er um ein danskan statsgrunn, sum tí ikki skal við á fíggjarlógina og í landsroknskapin, og tískil er ikki neyðugt, at roknskapurin verður lagdur fyri Tingið. Grunnurin kann bert takast av við fólkatingslóg, og ger Fólkatingið tá av, hvat skal henda við ognini. Síðani 1977 hevur Landsstýrið havt heimild at gera neyvari reglur fyri virkseminum hjá grunninum, og Landsstýrið velur eitt 5-manna stýri, sum er hægsti myndugleiki grunsins.

Eftir hesum at døma er talan um eina peningaogn ella útlánsgrunn hjá danska statinum, sum Landsstýrið hevur "forpaktað" og fingið heimild at fyrisita. Um sæð verður burtur frá afturførdum avsetingum 70 mió.kr. í 1994 og 1995, er eginognin seinastu 10 árini vaksin 257 mió.kr. Við árslok 2004 er eginognin 769 mió.kr.

Viðvíkjandi framtíðini hjá grunninum er ætlanin, at tøki peningurin í grunninum skal verða nýttur at dagføra ognirnar hjá danska statinum í Vága Floghavn. Í felags yvirlýsing eftir fund í Keypmannahavn 4. apríl 2005 millum løgmann og danska forsætisráðharran stendur:

*"Føroya løgmaður og Danmarkar forsætisráðharri eru harumframt samdir um:*

- *At virka fyri, at rakstur og ogn hjá dønum í Vága Floghavn verða flutt føroyskum myndugleikum. Samstundis verður neyðugur peningur at fíggja dagføring av floghavnini fingin til vega á tann hátt, at eginpeningurin í Íleggingargrunninum fyri Føroyar verður niðurkapitaliseraður samsvarandi. Semja er um at seta ein føroyskan-danskan serfrøðingabólk at áseta tøkniliga og búskaparliga grundarlagið. Á hesum grundarlagi boðar landsstýrið frá áhuga sínum, at verkætlanin verður framd."*

Verandi lógargrundarlag:

Lógargrundarlagið undir Íleggingargrunninum er »Lov nr. 28« frá 29. januar 1964 »om en investeringsfond for Færøerne m.v.«, sum broytt við »Lov nr. 217« frá 27. mai 1970, »Lov nr. 153« frá 31. mars 1976 og »Lov nr. 566« frá 16. november 1977.

Við lógarbroytingini í 1976 fekk heimastýrið heimild at áseta nærri reglur fyri virki grunsins. Á landsstýrisfundi 1. desember 1978 samtykti Landsstýrið reglugerð um stýrið fyri og virksemið hjá grunninum. 13. oktober 1992 samtykti Landsstýrið at broyta reglugerðina, og varð hon lýst við kunngerð nr. 148 frá 20. oktober 1992 "um virksemið hjá

Íleggingargrunninum fyri Føroyar". Landsstýrið hevur síðani við K. nr. 119 frá 23. oktober 1996 lýst nýggjar reglur um virksemið hjá grunninum. Landsstýrið velur nú allar 5 stýrislimirnar. Frammanundan valdi Løgtingið 2.

Í stýrinum sita:

- Suni Joensen, formaður
- Palli Ziskason
- Aloma Davidsen
- Martin Hentze
- Andreas L. Jacobsen

Sambært § 3, stk. 1, í »Lov nr. 28« frá 29. januar 1964 við seinni broytingum er endamálið við grunninum at veita lán til størri almennar íløgur, ið verða hildnar at vera neyðugar til at menna vinnulívið, og har nóg mikið av fígging ikki kann verða útvegað á annan hátt. Eisini kann grunnurin, sambært § 3, stk. 2, av teimum rentum og avdráttum, ið eru afturgoldin, veita lán til vinnurekandi og vinnufelagsskapir, sum verða hildnir at virka til frama fyri vinnulívinum sum heild, í tann mun fígging ikki fæst frá øðrum.

Sambært § 5 í kunngerðini um virksemið hjá grunninum skulu lán einamest verða veitt til almennar íleggingar, sum út frá einum samfelagsligum heildarsjónarmiði gagna framtøkumøguleikum hjá føroyska samfelagnum. Harafturat kunnu lán verða veitt stovnum ella grunnum, sum veita lán ella annan stuðul til privatar, almennar ella hálvalmennar vinnufyritøkur og fíggjarstovnar.

Sambært § 8 í kunngerðini verður bókhaldið umsitið av Føroya Gjaldstovu, og rentur og avdrøg av veittum lánum skulu verða rindað Gjaldstovuni. Sambært kunngerðini skal roknskapurin verða grannskoðaður av løggildum grannskoðara, og skal grannskoðaði roknskapurin verða sendur Landsstýrinum til góðkenningar og forsætismálaráðnum til kunningar.

## 2.16 Barsilsskipanin

Útgjaldingarnar úr barsilsskipanini eru higartil bókaðar á høvuðskontu 6.39.4.01. ”Barsilsskipan (lógarbundin játtan)”. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 2006 verður mett, at útreiðslurnar til lógarbundnu játtanina í 2006 verða umleið 2,4 mió.kr. hægri enn í 2005, ella 72,4 mió.kr., men ongin peningur er settur av á fíggjarlógini 2006. Orsøkin er, at “Eftir ætlan skal barsilsskipanin verða umsitin og fíggjað av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, og verður játtanin til lógarbundnu játtanina tí strikað”.

Útreiðslurnar til at umsita útgjaldingarnar úr barsilsskipanini eru higartil bókaðar á høvuðskontu 6.39.4.04. ”Umsiting av barsilsskipan (rakstrarjáttan)”. ALS umsitur partar av løgtingslógini um barsilsskipan sambært avtalu við Vinnumálaráðið. Á fíggjarlógini 2005 eru játtaðar 1.741 t.kr., men ongin peningur er settur av í fíggjarlógaruppskotinum 2006. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 2006 er orsøkin til tess, at “Eftir ætlan skal barsilsskipanin verða umsitin og fíggjað av pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, og verður játtanin til umsitingina tí strikað”.

Inngjaldingar til barsilsskipanina verða bókaðar undir “Skattir og avgjøld” á høvuðskontu 20.52.1.28. “Gjald til barsilsskipan”. Sum er, rinda arbeiðstakarar og arbeiðsgevarar 0,25% av A-inntøkuni til partvísa fígging av barsilskipanini. Gjaldið verður kravt inn á sama hátt sum ALS-gjaldið. Mett verður, at samlaða gjaldið í 2005 verður 30,5 mió.kr., og roknað verður við somu upphædd í 2006, men á fíggjarlógaruppskotinum 2006 eru gjøldini sett til 74.141 t.kr., sum svarar til mettu útgjaldingarnar 72,4 mió.kr., umframt umsitingarútreiðslurnar 1.741 t.kr.

Á høvuðskontu 20.52.1.28. “Gjald til barsilsskipan” er játtanin 2006 sett upp soleiðis, at inntøkur og útreiðslur javnviga:

| Tús.kr. | 2006 |
|---|---|
| **Inntøkujáttan** | **0** |
| **01. Gjald til barsilsskipan** | |
| **Inntøkur** | **74.141** |
| *61. Skattur og avgjøld* | *74.141* |
| **02. Flyting til barsilsskipan** | |
| **Útreiðslur** | **-74.141** |
| *61. Skattur og avgjøld* | *-74.141* |

Á talvuni sæst, at ætlaðu inngjøldini (74.141 t.kr.) til barsilsskipanina framhaldandi verða tikin við á fíggjarlógina sum "skattur og gjøld" á standardkontu 61. Sum umrøtt frammanfyri eru bæði lógarbundna játtanin til mettu útgjaldingarnar úr barsilsskipanini (72.400 t.kr.) og rakstrarjáttanin til mettu umsitingarútreiðslurnar (1.741 t.kr.) strikað, og sum sæst á talvuni eru hesar útreiðslur í staðin fyri tiknar við á fíggjarlógini sum ein negativur skattur og avgjøld samanlagt 74.141 t.kr.

Landsgrannskoðanin vil í hesum sambandi vísa á, at hóast barsilsskipanin eftir ætlan Landsstýrisins skal verða fíggjað av "pørtunum á arbeiðsmarknaðinum", er tað neyvan rætt at strika lógarbundnu játtanina til útgjaldingarnar og játtanina til umsitingina. "Partarnir á arbeiðsmarknaðinum", sipað verður til, eru teir somu, sum fíggja skipanina í dag, t.v.s. allir arbeiðstakarar og allir arbeiðsgevarar í landinum. Tað eru stórt sæð somu skattgjaldarar, sum "fíggjað" flest allar aðrar skattir og onnur avgjøld, sum koma í landskassan. Munurin er bara, at ætlanin hjá Landsstýrinum er at hækka gjaldið til barsilsskipanina í 2006 so mikið, at tað svarar til útgjaldingarnar.

Útgjøldini úr skipanini verða óivað framvegis at rokna sum lógarbundnar útreiðslur, har móttakarin sambært lóg hevur rættarkrav til ávísan stuðul ella veiting, og peningaupphæddin ella útrokningargrundarlagið er ásett í lóg ella sambært lóg. Landsgrannskoðanin heldur tí ikki uppsetingina í fíggjarlógaruppskotinum 2006 vera rætta. Landsgrannskoðanin vil mæla til, at útgjøld úr barsilskipanini, eins og higartil, verða játtað á høvuðskontu 6.39.4.01. Barsilsskipan (lógarbundin játtan).

Landsgrannskoðanin heldur tað eisini vera skeivt at "drukna" umsitingarútreiðslurnar sum ein part av "negativa" skattinum, sum er -74.141 t.kr. Landsgrannskoðanin vil mæla til, at Løgtingið framhaldandi játtar umsitingarútreiðslurnar fyri seg á høvuðskontu 6.39.4.04. "Umsiting av barsilsskipan" (rakstrarjáttan).

## 2.17 Arbeiðsloysisskipanin og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

Landsgrannskoðanin heldur, at í staðin fyri at "amputera" tilknýtið hjá barsilsskipanini til fíggjarlógina, eigur landsstýrið at umhugsa at taka inngjaldingar, útgjaldingar og umsitingarútreiðslur hjá ALS og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum við á fíggjarlógina, soleiðis at fíggjarlógin, og eisini landsroknskapurin, kemur at geva eina meira fullfíggjaða mynd av øllum lógarásettum inngjaldingum og útgjaldingum.

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðaraviðurskifti". Á s. 33 verður m.a. víst á, at neyðugt er bæði at hava materiella heimild í løgtingslóg og fíggjarliga heimild í fíggjarlóg, áðrenn skattir kunnu verða kravdir inn. Her er talan um bindandi stjórnarrættarligar ásetingar, ið ikki loyva undantøkum – heimildin at áleggja ella broyta skattir kann ikki delegerast.

Á s. 81-83 og 86-88 í álitinum verða umrødd játtanarviðurskiftini viðvíkjandi Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Arbeiðsloysisskipanini, sum ikki eru við á fíggjarlógini.

M.a. staðfestir Fíggjarmálaráðið, at inngjøldini í grunnarnar eru at rokna sum skattur. Fíggjarmálaráðið ger vart við, at:

- sambært § 41, stk. 1, í stýrisskipanarlógini kann eingin beinleiðis ella óbeinleiðis skattur verða álagdur, broyttur ella tikin av uttan við løgtingslóg,
- sambært § 41, stk. 3, í stýrisskipanarlógini er ikki loyvt at krevja inn teir skattir, ið nevndir eru í § 41, stk. 1, áðrenn løgtingsfíggjarlóg ella bráðfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi.

Sostatt skulu øll inngjøld til grunnarnar verða ásett við lóg og verða tikin við á fíggjarlógina.

Fíggjarmálaráðið vísir á, at tá ALS-stýrið sambært § 9, stk. 3, í Ll. nr. 113/1997 v.s.b. "um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing" hevur heimild at broyta ALS-gjaldið, er talan um brot á § 41, stk. 1, í stýrisskipanarlógini, og tá ið inngjaldið ikki verður tikið við á fíggjarlógina, er talan um brot á § 41, stk. 3, stýrisskipanarlógini.

Fíggjarmálaráðið ger eisini vart við, at eingin heimild er at halda útgjaldinum og útreiðslunum til umsiting av grunnunum uttan fyri fíggjarlóg ella aðra játtanarlóg. Talan er um brot á § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini.

Landsgrannskoðanin heldur, at Landsstýrið átti at umhugsa at endurskoða og møguliga samskipa umsitingina av ALS, Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum og Barsilsskipanini við aðrar líknandi skipanir. Vit hava áður í frágreiðingum til løgtingsgrannskoðararnar m.a. víst á:

*"Í dag eru nógvar og fløktar skipanir, sum ikki hanga nóg væl saman. Fleiri stovnar/grunnar umsita uppgávur, sum helst í størri mun kundu verið samskipaðar. T.d. er eitt ótal av stovnum, grunnum, deildum o.l., sum hvør sær umsita lønir. 4 fyrisitingarligar eindir umsita dagpening vegna sjúku og barnsburð: Lønjavningarstovan, Almannastovan, Vanlukkutryggingin og ALS. Almannastovan, ALS og Lønjavningarstovan umsita veitingar vegna vantandi arbeiðsinntøku. Almannastovan og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin umsita pensjónir, og harafturat umsita Fíggjarmálaráðið, Mentamálaráðið, Almanna- og Heilsumálaráðið, Sjúkrahúsverkið og Postverkið tænastumannapensjónir. Hóast talan er um lutfalsliga smáar eindir, nýta almennir stovnar/grunnar nógvar ymiskar EDV-skipanir til at gjalda út, føra bókhald, umsita lønir, lán, debitorar o.a. Tá ið uppgávurnar eru so spjaddar, er ofta torført at manna størv við fólki, sum hevur førleika og neyðugar royndir, "soðið verður ov tunt".*

*Landsgrannskoðanin heldur ikki, at tilgongdin seinnu árini hevur effektiviserað samlaðu almennu umsitingina, t.v.s. gjørt hana bíligari og betri. Tørvur er á at endurnýggja fleiri búskaparskipanir. Fer hetta arbeiði ikki fram sum liður í einari yvirskipaðari heildarætlan, har eisini bygnaðurin verður endurskoðaður, verður peningur og starvsfólkaorka ikki nýtt á skynsaman hátt.*

*Higartil hevur Fíggjarmálaráðið ikki megnað ella havt neyðuga orku og stuðul til at átaka sær tann virkna, leiðandi og samskipandi leiklut, ið roknskaparlógin/-kunngerðin leggur upp til. Landsgrannskoðanin heldur, at er ætlanin, at umsitingin skal verða gjørd bíligari og betri, er tað ein fortreyt, at óskipaða gongdin verður steðgað.*

*Tað hevur tó eydnast at byggja upp nakrar væl virkandi búskaparskipanir á Gjaldstovuni, men trupulleikin er, at tær verða ikki gagnnýttar í tann mun, ætlanin var. Við einari skynsamari langtíðar ráðlegging ber helst til at umleggja ella niðurleggja fleiri av teimum smærru búskaparskipanunum, og í staðin fyri nýta búskaparskipanir landsins í størri mun. Tað krevur tó, at ein myndugleiki setur út í kortið."*

## 2.18 Roknskaparviðurskifti hjá kommununum

Sambært § 47 í Ll. nr. 87/2000 "um kommunustýri" kann landsstýrismaðurin *"áseta nærri reglur um kontuskipan, fíggjarætlan, bókhald, ársroknskap, grannskoðan og avgerðir um viðmerkingar til grannskoðanina og tílíkt."* Í november 2002 spurdi Landsgrannskoðanin, hvørjar reglur eru galdandi, og um landsstýrismaðurin heldur tær vera nøktandi.

Í februar 2003 greiddi Løgmálaráðið/Innanríkisdeildin frá, at ein leiðbeining frá 1992, um at seta upp kommunalar fíggjarætlanir og roknskapir, var galdandi enn. Innanríkisdeildin helt

ikki viðurskiftini vera nøktandi. Nakrar kommunur hava lagað skipanirnar eftir egnum tørvi, og til ber ikki at samanbera roknskapir ímillum kommunur, og ímillum land og kommunur. Ætlanin var at endurskoða roknskaparverkið hjá kommununum, og við heimild í § 47 í kommunustýrislógini at áseta neyvari og nøktandi reglur á økinum.

Í mars 2004 boðaði Innlendismálaráðið frá, at arbeiðið var ikki byrjað, tí val varð skrivað út. Ætlanin var at taka arbeiðið upp, tá støða var tikin til arbeiðssetningin.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2002 (Lm. nr. 56-6/2003) heittu løgtingsgrannskoðararnir í apríl 2004 á landsstýrismannin um at tryggja, at reglurnar um roknskaparviðurskifti o.a. hjá kommununum vórðu endurskoðaðar og dagførdar, og at roknskaparviðurskiftini vórðu samskipað.

Í september 2004 vísti Gjaldstovan á, í ummæli sínum av uppskoti til løgtingslóg um barnavernd (Lm. nr. 10/2004):

> *Tað er ein trupulleiki at flyta fíggjarligar uppgávur út til kommunurnar, sum ikki hava nakrar ásettar treytir um roknskaparverkið, t.d. eina felags kontuskipan ella eina roknskaparkunngerð, sum landið hevur. Tað er torført hjá Tinginum at taka avgerð um at flyta umsitingina av einari uppgávu, sum er so regulerað, til eitt annað almannaverk – í hesum føri kommunur, har tað ikki verða sett krøv – tí alt verður fíggjað við skattaborgarans peningi.*
>
> *Nú kenni eg einki til, hvørjar skrásetingarskipanir eru neyðugar útyvir eina roknskaparskipan, men tað kundi hugsast, at neyðugt er við øðrum fyrisitingarligum KT-loysnum, har krav er um at uppfylla sokallaðu trygdarkunngerðina, sum fór at virka 1. september 2004.*
>
> *Gjaldstovan hevur fleiri ferðir peikað á, at um ikki tað verður stovnsett eitt vælvirkandi KT-undirstøðukervi fyri tað kommunala økið, so verður hetta ein forðing fyri at flyta uppgávur frá landi til kommunur.*

Í februar 2005 kunnaði Innlendismálaráðið um, at ein arbeiðsbólkur er settur at arbeiða við spurninginum. Ætlanin er við kunngerð at seta í gildi felags reglur fyri allar kommunur viðvíkjandi fíggjarætlan, bókhaldi, ársroknskapi, grannskoðan o.t. Kunngerðin skal eftir ætlan koma í gildi í seinasta lagi 1. januar 2006.

Innlendismálaráðið kunnaði eisini um, at gjørd verður ein felags teknisk loysn. Skipanin skal vera partur av ella tætt knýtt at búskaparskipanum landsins. Kommunurnar skulu fáa í boði antin at bóka beinleiðis, ella at fráboða regluliga til skipanina eftir neyvari ásetingum.

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2003 vístu løgtingsgrannskoðararnir í mars 2005 á, at nú fleiri uppgávur verða fluttar til kommunurnar, er tað umráðandi at tryggja sær, at roknskapar- og KT-viðurskiftini koma í eina tryggari legu.

Í oktober 2005 hevur Innlendismálaráðið kunnað um, at arbeiðið hevur tikið longri tíð, enn roknað var við. Væntandi verður arbeiðsbólkurin liðugur fyrst í 2006. Ætlanin er, at kommunurnar skulu nýta felags reglurnar í sambandi við fíggjarætlanina 2007.

## 2.19 Grundleggjandi ivamál um fíggjarlóg og landsroknskap

Sambært Ll. nr. 25/1999 um grannskoðan av landsroknskapinum v.m. er endamálið við grannskoðanini at ansa eftir:

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2003 (Lm.nr.45-6/2004), sum varð lagt fyri Løgtingið í mars 2005, vístu løgtingsgrannskoðararnir m.a. á, at tað framvegis er ivasamt:

- Um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum.
- Um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum.
- Um allir skattir/gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini.
- Um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini.
- Hvussu landsins gjaldføri skal verða gjørt upp og umsitið.

Í fleiri uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at málið um tilknýtið hjá landsstovnum/-grunnum til fíggjarlóg og landsroknskap tykist vera endað sum ein løgfrøðiligur stríðsspurningur um niðurstøðurnar í álitinum, sum Fíggjarmálaráðið gjørdi í november 2001.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir ávarað ímóti hesum og hava víst á, at hevði Landsstýrið tikið skilagóðar avgerðir út frá einum heildarsjónarmiði, kundu fleiri ivamál verið loyst. Sambært løgtingsgrannskoðarunum er høvuðstrupulleikin, at landið hevur ikki nóg gott tamarhald á og yvirlit yvir gjaldføri, íløgu-, rakstrar-, stuðuls- og útlánsvirksemi, ogn, skuld, skyldur o.s.fr., tá landsstovnar/-grunnar liggja uttanfyri fíggjarlóg og landsroknskap.

Vísandi til tað, sum er umrøtt í frágreiðingini frammanfyri undir m.a. punkt 2.7 "Fíggjarstøðan hjá landsgrunnum o.l." og punkt 2.8 "Skattur, inntøkur og útreiðslur hjá landsgrunnum o.l.", er landsroknskapurin 2004 framvegis ikki fullfíggjaður.

Vísandi til tað, sum er umrøtt í frágreiðingini frammanfyri undir m.a. punkt 2.11 og 2.12 um Apoteksverkið, 2.13 um "Hovstunnulin" og 2.16 um "Barsilsskipanina" verður landsroknskapurin í framtíðini meira ófullfíggjaður.

Ein vaksandi partur av almenna búskapinum liggur hjá kommununum, og vísandi til tað, sum er ført fram undir 2.18 "Roknskaparviðurskifti hjá kommununum" liggur eitt stórt vandamál í, at roknskapar og KT-trygdarviðurskiftini framvegis ikki eru í eini tryggari legu.

# 3 LØGMANSFYRISITINGIN

## 3.1 Meirnýtsla

### *3.1.1 Norðurbryggjan í Keypmannahavn 2.13.1.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 800 t.kr. Meirnýtslan er 15 t.kr.

Sambært løgmanni komu nakrar rokningar frá ráðgevum/veitarum viðvíkjandi bygging og innrættan av føroysku hæddini á Norðurbryggjuni ov seint.

Á eykajáttanarlógini november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 300 t.kr. Í viðmerkingunum verður víst á, at *"hóast endaligur roknskapur ikki er liðugur enn, hevur umboð fyri byggiharraráðgevan fyri Norðurbryggjuna nú boðað Landsverki frá, hvussu nógv Løgmansskrivstovan manglar at rinda til verkætlanina. Út frá hesum tali er Løgmansskrivstovan saman við Landsverki komin til, at tørvur er á eini eykajáttan upp á 300.000 kr."*

Fíggjarnevndin helt, *"tað verða rættast at viðgera hesa umbøn undir einum, tá endaligur byggiroknskapur fyriliggur einaferð til várs. Nevndin mælir tí til at strika eykajáttanina."* Broytingaruppskotið varð samtykt.

## 3.2 Minninýtsla

### *3.2.1 Grundlógarnevndin (rakstrarjáttan) 2.11.1.40.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 650 t.kr. Minninýtslan er 159 t.kr.

Á fíggjarlógini 2004 vóru upprunaliga játtaðar 450 t.kr. Á eykajáttanarlógini august 2004-2 varð játtanin hækkað 200 t.kr. vísandi til, at arbeiðið í nevndini fór at verða tikið uppaftur á heysti 2004.

Sambært løgmanni høvdu ætlanir eftir seinasta løgtingsval um umskipan av arbeiðinum hjá nevndini við sær, at virksemið hjá nevndini ikki av álvara varð tikið uppaftur seinna hálvár 2004.

# 4 FISKIVINNA

## 4.1 Meirnýtsla

### *4.1.1 Magnus Heinason (rakstrarjáttan) 5.34.3.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 9.556 t.kr. Meirnýtslan er 125 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 8.356 t.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin hækkað 1.200 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu inntøkur nógv minni og rakstrarkostnaðurin hægri, serliga til olju.

### *4.1.2 Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (rakstrarjáttan) 5.35.1.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.072 t.kr. Meirnýtslan er 133 t.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 200 t.kr., vísandi til hægri útreiðslur til læknakanningar av sjófólki. Fíggjarnevndin helt ikki grundarlag vera fyri at mæla til meirjáttan. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum vóru neyðug tiltøk sett í verk fyri at halda játtanina, tá greitt var, at umbønin um eykajáttan varð strikað. Eftir eina gjøgnumgongd av skuldarum varð mett neyðugt at seta av 112 t.kr. vegna tap móti eldri áogn, soleiðis at roknskapurin vísti eina rættari mynd.

## 4.2 Minninýtsla

### *4.2.1 Limagjald í altjóða felagsskapum 5.34.1.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.200 t.kr. Minninýtslan er 514 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð rokningin fyri limagjald til ICES í 2004, 580 t.kr., ikki bókað rættstundis. Rokningin var ikki Fiskimálaráðnum í hendi fyrr enn í mai 2005.

### *4.2.2 Fiskivinnuroyndir (rakstrarjáttan) 5.34.3.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5.000 t.kr. Minninýtslan er 506 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin til minninýtsluna, at einstakar verkætlanir vórðu seinkaðar.

### *4.2.3 Útlán 5.34.5.01*

t.kr.

| 5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Útlán, inntøkur | - | 12.254 | -12.254 |
| 01. Útlán, útreiðslur | - | 11.348 | 11.348 |

Á fíggjarlógini var eingin peningur játtaður til útlán. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 12.254 t.kr. og útreiðslurnar 11.348 t.kr. Sostatt er talan um stór frávik.

Landsstýrismaðurin vísir á, at Fiskimálaráðið formliga varðar av hesum kontum, men Toll- og Skattstovan og Realurin umsita tær. Fyri at gera eina neyvari meting av játtanunum í framtíðini, hevur Fiskimálaráðið tikið upp samband við partarnar, ið umsita konturnar.

Av inntøkunum, 12.254 t.kr., eru umleið:

- 4,9 mió.kr. inngjaldingar frá skuldarum,

- 7,3 mió.kr. av- og niðurskriving av lánum, umframt tøkniligar broytingar.

Av útreiðslunum, 11.348 t.kr., eru umleið:

- 6,9 mió.kr. niðurskrivingar av lánum,
- 4,4 mió.kr. umlegging av lánum.

Av umløgdum lánum eru umleið 4 mió.kr. skrásettar sum inntøka undir effektivum veðhaldsútreiðslum.

Fyri at lýsa, hvussu bókingarmannagongdin er, vil Landsgrannskoðanin vísa til síðu 310 í landsroknskapinum 2004, har tað undir "formlig viðurskifti" stendur, at útlán verða viðgjørd í rakstrarroknskapinum eftir hesum meginreglum:

- tá ið lán verða veitt (útgoldin), verða tey skrásett sum útreiðsla í rakstrarroknskapinum, á standardkontu 82.
- avsett verður ikki móti tapi á rakstrarroknskapinum, tí lánið er longu tikið við sum útreiðsla, tá goldið varð út.
- verða lán síðani avskrivað, verður avskrivingin bókað bæði sum inntøka og útreiðsla í rakstrarroknskapinum við somu upphædd ávikavist á standardkontu 52/53 og 86.

### *4.2.4 Effektivar veðhaldsútreiðslur 5.34.5.07*

t.kr.

| 5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 07. Effektivar veðhaldsútreiðslur, inntøkur | 4.500 | 5.157 | -657 |
| 07. Effektivar veðhaldsútreiðslur, útreiðslur | 1.000 | 23 | -977 |

Á fíggjarlógini var játtanin til inntøkur 4.500 t.kr., og til útreiðslur 1.000 t.kr.

Vísandi til roknskapin, eru inntøkurnar 5.157 t.kr. og útreiðslurnar 23 t.kr. Av samlaðu inntøkuni:

- eru umleið 4 mió.kr. veðhald, sum er partur av teimum 4,4 mió.kr., umlegging av lánum, sum nevnt frammanfyri. Talan er um umlegging til rentu og avdráttarfrí studningslán við heimild í Ll. nr. 34/1993 "um stuðul til feskfiskaflotan" og Ll. nr. 140/1993 "um stuðul til útróðrarflotan undir 20 BRT", og
- umleið 1,1 mió.kr. eru inngjaldingar frá skuldarum.

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Søla av seismiskum kanningarúrslitum | -6.000 | -4.846 | *1.154* |
| P/f Fiskaaling, útreiðslur | 6.000 | 2.000 | *-4.000* |
| P/f Fiskaaling, inntøkur | -6.000 | -2.000 | *4.000* |
| Havbúnaðarroyndir | 12.000 | 12.681 | *681* |
| Lánsafturgjald | -2.500 | -1.736 | *764* |
| Havnir (løgujáttan) | 54.500 | 56.315 | *1.815* |
| Postverk Føroya (løgujáttan) | -36.000 | - | *36.000* |
| Arbeiðseftirlitið (rakstrarjáttan) | 4.253 | 4.468 | *215* |
| Barsilsskipanin (lógarbundin játtan) | 70.800 | 76.799 | *5.999* |

### *5.1.1 Søla av seismiskum kanningarúrslitum 6.32.1.04.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 6.000 t.kr. Minniinntøkan er 1.154 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er torført at meta um, hvussu stór sølan fer at verða. Sølan gjørdist nakað minni, enn mett varð frammanundan, og lági dollarakursurin ávirkaði eisini inntøkurnar, tí sølan verður goldin í US-dollarum.

### *5.1.2 P/f Fiskaaling 6.36.1.05.*

Við Ll. nr. 69 frá 2. mai 2003 “um at hækka partapeningin í og veita stuðul til P/f Fiskaaling” gav Løgtingið landsstýrismanninum heimild at hækka partapeningin í felagnum 6 mió.kr. við at skjóta tvær ognir hjá landinum, sum felagið hevði nýtslurætt til, inn í felagið. Talan var um eina høll við Áir (2 mió.kr.) og lívfiskastøðina í Skopun (4 mió.kr.). Ætlanin var, at ognirnar skuldu verða skotnar inn í felagið (apportinnskot), við at Landsstýrið teknaði 1,0 mió.kr. í partapeningi, og at viðbót fyri meirkurs var 5,0 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2004 er játtanin til “útreiðslur” 6 mió.kr. Talan var um “keyp” av partabrøvunum, sum skuldu verða skrivað út sum gjald fyri ognirnar, ætlanin var at skjóta inn í felagið. Játtanin til “inntøkur” er 6 mió.kr. Talan var um “sølu” av ognunum, sum ætlanin var at skjóta inn í felagið. Minniinntøkan/minninýtslan er 4 mió.kr. Orsøkin er, at lívfiskastøðin í Skopun ikki varð skotin inn í felagið í 2004, sum ætlað.

Talvan niðanfyri vísir, hvørjar ognir talan er um, og hvussu tær eru virðismettar.

mió.kr.

| 1 | 2 | 3 | 4 | 5 |
|---|---|---|---|---|
| | Nývirði sambært byggiserkønum | Søluvirði sambært byggiserkønum | Virði, sum ognin verður skotin inn til | Byggikostnaður sambært landsroknskapinum |
| Lívfiskastøðin í Skopun (matr. 550b) | 13,9 | 6,8 | 4,0 | 36,0 |
| Høll við Áir (Nýggjastova, matr. 38b) | 3,2 | 2,1 | 2,0 | 13,0 |
| Tilsamans | 17,1 | 8,9 | 6,0 | 49,0 |

Lívfiskastøðin í Skopun varð bygd árini 1992-1995, og høllin við Áir, nevnd Nýggjastova, varð bygd í 1991-1992.

Í 2. teigi á talvuni sæst, at nývirðið á ognunum er mett til ávikavist 13,9 og 3,2 mió.kr., tilsamans 17,1 mió.kr.

Í 3. teigi sæst, at søluvirðið er mett til ávikavist 6,8 og 2,1 mió.kr., tilsamans 8,9 mió.kr.

Ein byggiserkønur hevur mett bæði um nývirðið og um søluvirðið.

Í 4. teigi á talvuni sæst virðið sambært metanarfrágreiðingini (sambært § 6a og § 33 í partafelagslógini, skiftisinnskot av einstøkum ognum í sambandi við hækkan av partapeningi). Sambært grannskoðarafelagnum Spekt verður ognin skotin inn til ein "varisliga mettan sølupris í vanligum handli, tó í mesta lagi til eitt varisligt mett virði, grundað á going-concern meting av rakstrinum av P/F Fiskaaling." Virðið á lívfiskastøðini í Skopun er soleiðis sett til 4 mió.kr., og høllin við Áir til 2 mió.kr.

Í 5. teigi í talvuni sæst, hvussu nógv ognirnar kostaðu upprunaliga. Sambært landsroknskapunum 1991 til 1996 vórðu 44,3 mió.kr. nýttar á løgukontu 16994 "Fiskaaling við Áir/Lívfiskastøðin í Skopun", og sambært viðmerkingunum í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri 1997 vóru 31,3 mió.kr. nýttar til lívfiskastøðina í Skopun fram til 1996. Umleið 13 mió.kr. vóru nýttar til íløgur við Áir. Sambært landsroknskapinum 1997 til 1999 vóru 4,6 mió.kr. nýttar afturat til lívfiskastøðina, m.a. til at gera brimverju. Ognirnar, sum ætlanin var at skjóta inn í P/f Fiskaaling, hava sostatt kostað landskassanum umleið 49 mió.kr.

Ognirnar vórðu ikki skotnar inn í felagið í 2003, tí Landsstýrið ikki formelt stóð sum eigari av ognunum. Í 2004 varð einans høllin við Áir skotin inn í felagið við 2 mió.kr. Partapeningurin varð hækkaður við 400 t.kr. til kurs 500. Grannskoðarafelagið Spekt váttaði, at virðið á innskotnu ognini í minsta lagi svaraði til innskotið.

Í skrivi 11. januar 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at viðvíkjandi lívfiskastøðini í Skopun verður arbeitt við eini loysn, har kommunan ognartekur lendið, lívfiskastøðin stendur á, og leigar P/F Fiskaaling økið. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at Skopunar kommuna støðugt arbeiðir við málinum og roynir at fáa avtalu í lag við hagastýrið, sum eigur lendið. Ilt er tó at siga, nær málið verður loyst.

### *5.1.3 Havbúnaðarroyndir 6.36.1.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 12 mió.kr. Meirnýtslan er 681 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er talan um "eitt reint bókingartekniskt mál." Í 2001 inntøkuførdi Vinnumálaráðið 6.742 t.kr., t.e. allan studningin, sum Fiskaaling hevði fingið goldið út, men ikki hevði brúkt ultimo 2001, og skuldskrivaði felagnum upphæddina. Í 2003 varð staðfest, at 2.407 t.kr. av hesi upphædd vóru brúktar til verkætlanir, sum ikki vóru lidnar. Fiskaaling skuldi rinda avlopið 1.875 t.kr. aftur, og restin, 2.460 t.kr., vórðu í 2003 lagdar um til partapening í felagnum.

Av misgáum útreiðsluførdi Vinnumálaráðið í 2003 1.742 t.kr. í staðin fyri 2.407 t.kr. Munurin, t.kr. 665, varð útreiðsluførdur í 2004, og svarar hann á leið til meirnýtsluna t.kr. 681.

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at hóast 3-4 ár eru liðin, síðan verkætlanirnar vórðu lidnar, er avlopið 1.875 t.kr. framvegis ikki afturgoldið. Skuldin sæst ikki sum sjálvstøðugur roknskaparpostur á fíggjarstøðuni hjá P/f Fiskaaling í ársroknskapinum fyri 2004. Eftir øllum at døma er upphæddin partur av roknskaparpostinum "Onnur skuld". Vinnumálaráðið heldur, at roknskaparposturin skuldi í minsta lagi havt eina notu, soleiðis at tað bar til at síggja, hvussu stór skuld felagsins er til landskassan.

Vinnumálaráðið hevur fleiri ferðir heitt á felagið um at rinda skuldina, og Vinnumálaráðið boðaði felagnum í oktober 2004 frá, at tað fór at mótrokna skuldina í studninginum til "havbúnaðarroyndir", sum skuldi verða goldin felagnum. Fiskaaling vísti tá á, at gjaldføri felagsins var so vánaligt, og at felagið ikki var ført fyri at rinda skuldina aftur. Felagið hevur heitt á Vinnumálaráðið um at umleggja skuldina til partapening ella at útseta afturgjaldingina,

til Fiskaaling hevur betri gjaldføri. Vinnumálaráðið hevur umhugsað við skuldarumskifti at leggja skuldina um til partapening.

Á talvuni niðanfyri hava vit lýst gongdina í ársúrslitinum og í eginpeninginum hjá P/f Fiskaaling seinastu 6 árini.

Útvald roknskapartøl viðv. P/f Fiskaaling 1999-2004:

| í 1.000 kr. | **2004** | **2003** | **2002** | **2001** | **2000** | **1999** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Sambært landsroknskapunum er studningur til "havbúnaðarroyndir": | 12.681 | 10.742 | 10.000 | 4.258 | 11.000 | 11.000 | **59.681** |
| Sambært ársroknskapunum hjá P/F Fiskaaling: | | | | | | | |
| Nettosøla | 4.292 | 4.032 | 10.283 | 14.350 | 15.532 | 15.957 | |
| Aðrar rakstrarinntøkur | 14.772 | 11.482 | 13.598 | 10.367 | 6.438 | 4.734 | |
| | 19.064 | 15.514 | 23.881 | 24.717 | 21.970 | 20.691 | |
| **Ársúrslit** | **(1.297)** | **(5.560)** | **(298)** | **307** | **1.011** | **(2.092)** | |
| Eginogn við ársbyrjan | 2.729 | 5.830 | 6.128 | 5.821 | 4.810 | 6.903 | |
| Ársúrslit | (1.297) | (5.560) | (298) | 307 | 1.011 | (2.092) | |
| Landskassainnskot | 2.000 | 2.459 | - | - | - | - | **4.459** |
| **Eginogn við árslok** | **3.433** | **2.729** | **5.830** | **6.128** | **5.821** | **4.810** | |

Studningur til havbúnaðarroyndir

Í fyrstu reglu á talvuni sæst, at Fiskaaling árini 1999 til 2004 hevur fingið umleið 59,7 mió.kr. í studningini av játtanini til "havbúnaðarroyndir".

Sáttmáli fyri árini 1999-2001 varð gjørdur millum Vinnumálaráðið og Fiskaaling um kynbøtur, royndir við aling við nýggjum fiskasløgum o.a. Vinnumálaráðið rindaði Fiskaaling 11 mió.kr. um árið. Avlopið av goldna studningininum ultimo 2001, 6.742 t.kr., skuldi rindast aftur. Tí er upphæddin 4.258 t.kr. í 2001, í staðin fyri 11.000 t.kr. Sáttmálin varð seinni longdur at galda fyri 2002 eisini, og bert 1.875 t.kr. av avlopinum í 2001 skuldu verða rindað aftur. Nýggjur sáttmáli varð síðani gjørdur fyri árini 2003-2005.

Í fíggjarlógaruppskotinum, sum varð lagt fyri Løgtingið í 2003, varð skotið upp at játta 8,9 mió.kr. til havbúnaðarroyndir. Fíggjarlógaruppskotið fall burtur, tá løgtingsval varð skrivað út í desember 2003. Eftir at leiðslan í P/f Fiskaaling hevði gjørt vart við vánaligu útlit felagsins fyri at selja rogn næstu árini, varð játtanin fyri 2004 hækkað til 12 mió.kr.

Fiskaaling hevur roknað sær 2.634 t.kr., svarandi til 22% av studningsupphæddini í 2004, til fyrisitingargjald. Talan er um endurgjald fyri m.a. lønarútreiðslur til stjóran, bókhaldaran, maskinmeistaran, útreiðslur til grannskoðan og edv, umframt part av olju- og elnýtslu í skrivstovuhølunum. Fyrisitingargjaldið er ikki ásett í sáttmálanum, og Vinnumálaráðið ætlar at taka spurningin upp, í sambandi við at nýggjur sáttmáli verður gjørdur.

Inntøkur hjá P/f Fiskaaling

Posturin "nettosøla" í ársroknskapinum hjá P/f Fiskaaling fevnir um vinnuliga sølu av rognum, lívfiski o.ø.

"Aðrar rakstrarinntøkur" fevna um landskassajáttanina til "havbúnaðarroyndir" og aðrar rakstrarupphæddir, ið ikki hava tilknýti til "høvuðsendamálið hjá Fiskaaling". Studningur úr landskassanum til "havbúnaðarroyndir", sum fer til at fíggja rakstrarútreiðslur, verður inntøkuførdur í roknskapinum hjá P/f Fiskaaling. Tann parturin av landskassastudninginum, sum

fer til at fíggja keyp av støðisogn, verður inntøkuførdur í felagnum í sama mun, støðisognin verður avskrivað. Tí er samsvar ikki millum árliga studningin sambært landsroknskapinum og studningin sambært ársroknskapinum hjá P/f Fiskaaling. Ikki nýttur studningur verður støðlaður á fíggjarstøðuni sum skuld, "Tíðaravmarkað fígging til verkætlanir". Ultimo 2004 var talan um 9,7 mió.kr.

Á talvuni sæst, at sambært roknskapinum hjá Fiskaaling er "nettosøla" (vinnuligu inntøkurnar) minkað úr um 16 mió.kr. í 1999, til um 4,3 mió.kr. í 2004. Samstundis eru "aðrar rakstrarinntøkur" (mest studningur frá landskassanum) vaksnar úr um 4,7 mió.kr. til um 14,8 mió.kr.

Landskassainnskot

Sambært talvuni frammanfyri hevur raksturin hjá P/f Fiskaaling árini 2002 til 2004 roknskaparliga givið hall, tilsamans umleið 7,2 mió.kr.

Í 2003 vórðu 2.459 t.kr., sum var partur av ónýttum studningini til verkætlanir ultimo 2001, lagdar um til partapening. 1 mió.kr. varð skrivað út í partabrøvum, og 1.459 t.kr. vórðu lagdar í yvirkursgrunnin.

Í 2004 varð, sum fyrr greitt frá, ein høll við Áir, Nýggjastova, skotin inn í felagið til 2 mió.kr., 400 t.kr vórðu skrivaðar út í partabrøvum, og 1,6 mió.kr. vórðu lagdar í yvirkursgrunnin.

Sostatt hevur landið í 2003 og 2004 skotið inn umleið 4,5 mió.kr. fyri at hækka eginpeningin/partapeningin.

Framtíðarútlit

Sambært leiðslufrágreiðingini í ársroknskapinum 2004 hjá P/f Fiskaaling vóru eingi føroysk laksarogn á marknaðinum í 2004, og føroysku alararnir fluttu tí rogn inn úr Noregi, Íslandi og Skotlandi. Fiskaaling roknar tí við í framtíðini at fáa kapping á føroyska marknaðinum. Fiskaaling heldur ikki grundarlag vera fyri at halda fram við kynbótaarbeiðinum av føroyskum laksi, um eftirspurningurin eftir laksarognum ikki veksur munandi komandi árini, og at Fiskaaling fær ein stóran part av føroyska marknaðinum.

Viðmerkingar

Studningurin á fíggjarlógini til "havbúnaðarroyndir", t.v.s. til royndir við laksi, sílum, kalva og toski (t.kr. 59.681), umframt tað, sum er skotið inn fyri at bjarga partafelagnum (t.kr. 4.459), er tilsamans umleið 64 mió.kr. árini 1999-2004. Soleiðis sum framtíðarútlitini eru í dag, er vinnuligi parturin at kalla burtur, og tí kann spurningurin verða settur, um tað er skilagott at reka tílíkt royndarvirksemi í einum partafelag. Landsgrannskoðanin ber ótta fyri, at eitt tílíkt "pseudo"-partafelag er við til at grugga gjøgnumskygni og ábyrgdina fyri, at nóg nógv fæst burturúr stóru studningsupphæddunum á fíggjarlógini.

Vinnumálaráðið hevur í oktober 2004 greitt frá, at virksemið hjá Fiskaaling í enn minni mun verður vinnuligt, tí tørvurin á kynbótaarbeiði er fallandi. Í staðin verður dentur lagdur á gransking og at menna aling av øðrum fiskasløgum. Vinnumálaráðið kunnar um, at virksemið hjá Fiskaaling í løtuni verður endurmett, og støða skal verða tikin til, hvussu P/f Fiskaaling skal vera skipað í framtíðini. Vinnumálaráðið vísir tó á, at eitt partafelag hevur størri fíggjarligt frælsi at virka enn ein landsstovnur/landsfyritøka.

### *5.1.4 Lánsafturgjald 6.37.6.01.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 764 t.kr. Vinnumálaráðið vísti á, at tað er Gjaldstovan, ið umsitur játtanina. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at talan er um lán frá grunnum, sum eru niðurlagdir. Inntøkumetingarnar taka støði í søguligum tølum.

### *5.1.5 Havnir (løgujáttan) 6.38.1.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 54,5 mió.kr. Meirnýtslan er 1.815 t.kr.

Í 2003 vórðu 2 verklagslógir samtyktar at byggja samferðsluhavnir í Suðuroynni og í Kalsoynni. Á talvuni niðanfyri hava vit lýst játtanar- og roknskapartølini viðvíkjandi báðum verklagslógunum:

mió.kr.

| | Karmur | Játtanartøl | | | | | Roknskapartøl | | | Frávik | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | sambært | 2003 | 2004 | | | | 2003 | 2004 | | 2003 | 2004 | |
| | verkl.lóg | F-lóg | F-lóg | Ey-lóg | Tils. | Tils. | | | Tils. | | | Tils. |
| Trongisvágur | 60,0 | 17,0 | 39,0 | 1,0 | 40,0 | 57,0 | 16,5 | 42,9 | 59,4 | 0,5 | -2,9 | -2,4 |
| Kalsoy | 21,0 | 6,0 | 14,5 | 0,0 | 14,5 | 20,5 | 6,1 | 13,4 | 19,5 | -0,1 | 1,1 | 1,0 |
| Tils. | 81,0 | 23,0 | 53,5 | 1,0 | 54,5 | 77,5 | 22,6 | 56,3 | 78,9 | 0,4 | -1,8 | -1,4 |

Á fíggjarlógunum 2003 og 2004 vóru játtaðar 57 mió.kr., íroknað eykajáttanina oktober 2004. Sambært verklagslógini var metti kostnaðurin 60 mió.kr. Sostatt var játtanin á fíggjarlógini til samferðsluhavnina í Trongisvági 3 mió.kr. lægri enn metti kostnaðurin sambært verklagslógini.

Verklagslóg fyri samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði

Í viðmerkingunum til verklagslógina fyri samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði, Ll. nr. 83 frá 8. mai 2003 um at byggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði fyri 60 mió.kr., vóru byggiútreiðslurnar mettar til umleið 55 mió.kr. sambært "nýggjastu kostnaðarmetingini", og útreiðslurnar at byggja landgongd og fyribils farstøð vóru mettar til umleið 5 mió.kr.

Við Ll. nr. 28 frá 8. apríl 2005 varð karmurin fyri at byggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði víðkaður við 5 mió.kr., til 65 mió.kr. Játtanin, 5 mió.kr. í 2005, er ætlað einari varandi loysn av landgongd og farstøð, mett at kosta umleið 5 mió.kr., sum mett var í verklagslógini frá 2003.

Meirnýtsla 2004

Á fíggjarlógini 2004 vóru samlaðu útreiðslurnar upprunaliga mettar til 53,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini oktober 2004 varð játtanin hækkað 1 mió.kr. til at byrja arbeiðið at byggja fyribils farstøð til samferðsluhavnina í Suðuroy.

Hóast eykajáttanina í oktober 2004 og hóast eingin fyribils farstøð varð bygd í 2004, var meirnýtslan til samferðsluhavnina í Suðuroy 2,9 mió.kr. Nettomeirnýtslan á høvuðskontuni var 1,8 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum boðaði Landsverk 3. desember 2004 Vinnumálaráðnum frá, at neyðugt varð at hækka játtanina við 2 mió.kr., tí Landsverk í fíggjarstýringini hevði fokuserað uppá útreiðslukarmin í verklagslógini, heldur enn játtanina á fíggjarlógini.

Landsstýrismaðurin heitti 3. desember 2004 á Fíggjarnevndina um at hækka játtanina 2 mió.kr. í sambandi við eykajáttanarlógina november 2004, men umbønin varð ikki gingin á møti.

Í álitinum til eykajáttarlógina november 2004 vísti Fíggjarnevndin á, at seinnu árini er tað vorðið alsamt meira vanligt, at uppskot til eykajáttanarlóg verða løgd fyri tingið ultimo november, har meirnýtsla er á rakstarjáttanum, uttan at tað kemur av broytingum í fyritreytum í árinum. Umsóknir um eykajáttan snúgva seg aloftast um pening, sum longu er brúktur. Fíggjarnevndin heldur tað ikki vera rætt at taka undir við slíkum umsóknum og stuðla undir, at galdandi reglur verða ikki hildnar.

Í skrivi 14. desember 2004 heitti landsstýrismaðurin á Landsverk um at bera so í bandi, at fíggjarstýringin verður meira neyv, og at farið ikki verður út um játtaðar upphæddir.

Byggiroknskapur fyri samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði

Eftir áheitan frá løgtingsgrannskoðarunum bað Landsgrannskoðanin í januar 2005 landsstýrismannin um at greiða frá, hvussu stórt tilboðið upp á byggiútreiðslurnar var, og um tað eftir útbjóðingina hevði víst seg, at kostnaðurin varð størri, enn mett var. Biðið varð eisini um ein byggiroknskap, ið greinaði, hvussu nógvur peningur var nýttur til samferðsluhavnina samanborið við tær 60 mió.kr., verkætlanin skuldi kosta sambært „nýggjastu kostnaðarmetingini", sum víst verður til í viðmerkingunum til verklagslógina.

Í mars 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tilboðið frá byggiharranum var 51,2 mió.kr., men eftir samráðingum við felagið varð tilboðið lækkað til 50,6 mió.kr.

Í mars 2005 flýggjaði Vinnumálaráðið út ein byggiroknskap fyri samferðsluhavnina á Trongisvágsfirði, sum eisini varð latin Vinnunevndini.

Í byggiroknskapinum hevur landsstýrismaðurin greinað, hvussu peningurin er nýttur. Í byggiroknskapinum er tó eingin samanbering gjørd við "nýggjastu kostnaðarmetingina", sum víst verður til í viðmerkingunum til verklagslógina. Til fánýtis hevur Landsgrannskoðanin heitt á Vinnumálaráðið og Landsverk um at útvega hesar upplýsingar. Landsgrannskoðanin kann tí hvørki staðfesta, hvørt roknskapurin er settur upp á sama hátt sum "upprunaliga kostnaðarmetingin", ella vísa á, hvørjir partar av verkætlanini vórðu dýrari enn ætlað. Sambært byggiroknskapinum fyri 2003 og 2004 var kostnaðurin umleið 59,4 mió.kr., uttan landgongd og fyribils farstøð, sum sambært viðmerkingunum til verklagslógina varð mett at kosta 5 mió.kr. Eftir hesum at døma er samferðsluhavnin 4,4 mió.kr. dýrari enn mett í verklagslógini. Sambært játtanarskipanini kann landsstýrismaðurin, tá samlaður løgukostnaður er ásettur í verklagslóg, gera avtalur, sum fevna um fleiri fíggjarár, m.a. treytað av at samlaði løgukostnaðurin verður hildin.

Um orsøkina til øktu útreiðslurnar greiddi landsstýrismaðurin í skrivi 8. mars 2005 frá, at tær fevna um liðugtgerð av atløgusíðu B, umlegging og breiðkan av atkomuvegi og landsvegi, umframt meira spreinging á botni, enn roknað var við. Í viðmerkingunum til verklagslógina stendur, at bíðað verður við at gera atløgusíðu B lidna, um metti kostnaðurin, 55 mió.kr., ikki heldur. Sambært landsstýrismanninum gjørdi Strandfaraskip Landsins greitt, at við atliti til reglusemið á farleiðini, var neyðugt at báðar atløgusíðurnar vórðu gjørdar beinanvegin. Sambært Vinnumálaráðnum legði landsstýrismaðurin ikki uppskot fyri tingið í 2004 um at hækka útreiðslukarmin í verklagslógini av broyttu fortreytunum, tí so langt var ligið út á árið.

### *5.1.6 Postverk Føroya (løgujáttan) 6.38.3.03.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 36 mió.kr. Minniinntøkan er 36 mió.kr.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri posthúsið á Argjum, sum á fíggjarlógini 2004 og aftur í 2005 er mettur til 36 mió.kr.

Sambært fylgiskjali til uppskot til løgtingslóg um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya finst ein virðismeting av øllum bygningum hjá Postverkinum – Lm. nr. 70/2004. Har verður byggikostnaðurin av posthúsinum á Argjum mettur til 23,45 mió.kr. og søluvirðið til 18 mió.kr. Tvs. til eitt virði, sum er 50% av tí, sum stendur á fíggjarlógini í 2004 og aftur í 2005.

Í juli 2005 bóðu vit landsstýrismannin greiða okkum frá ætlaðu søluni og útvega okkum virðismetingina. Landsstýrismaðurin útvegaði okkum avrit av virðismetingini, sum byggifrøðingur hevði gjørt fyri Postverk Føroya, har bygningurin varð mettur til søluvirðið 18 mió.kr. Í august 2005 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at Tórshavnar kommuna var sinnað at keypa posthúsið á Argjum fyri 30 mió.kr. og harafturat at lata Postverki Føroya eitt grundøki á Óðinshædd, sum varð mett til 3 mió.kr. Inntøkujáttanin á fíggjarlógini var ein

leyslig meting av, hvat bygningurin kann verða seldur fyri, um ognin verður boðin út alment til sølu. Metingin var serliga grundað á, hvat Tórshavnar kommuna vildi lata fyri ognina.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at bjóða ognina út til sølu alment. Fíggjarmálaráðið vísti áhuga fyri at nýta bygningin til at hýsa Hagstovu Føroya og Føroya Gjaldstovu. Ongin endalig avgerð varð tó tikin, og tí varð bygningurin ikki seldur í 2004.

Á landsstýrisfundi 5. september 2005 legði landsstýrismaðurin fram upprit um at selja posthúsið á Argjum. Sambært uppritinum hevur landsstýrismaðurin biðið stjóran á Postverki Føroya um at selja bygningin í almennum útboði. Landsstýrismaðurin kunnaði um, at t.d. umsitingin á Landsverki var áhugað í at flyta alla umsitingina, sum í dag heldur til í leigaðum hølum á Tinghúsvegnum, í posthúsini á Argjum. Landsstýrismaðurin mælti tó til at selja bygningin sum skjótast og vísti á, at um bygningurin verður nýttur til at húsa stovnum hjá tí almenna, vil tað hava "neiliga" ávirkan á úrslitið í landsroknskapinum 2005.

Landsgrannskoðanin heldur tað ikki vera skilagott, at selja ein tílíkan bygning vísandi til at tað annars hevur "neiliga" ávirkan á landsroknskapin. Landsgrannskoðanin heldur, at Landsstýrið eigur at hava heilt onnur atlit í huga.

### *5.1.7 Arbeiðseftirlitið (rakstrarjáttan) 6.39.1.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5.253 t.kr. netto. Meirnýtslan er 215 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum er høvuðsorsøkin, at inntøkurnar vóru einar 200 t.kr. lægri, enn mett var.

Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at arbeitt hevur verið við at gera eina kunngerð um gjøldini fyri eftirlitsuppgávurnar hjá Arbeiðseftirlitinum, men av lógartekniskum trupulleikum er kunngerðin ikki lýst. Sambært Arbeiðseftirlitinum høvdu inntøkurnar verið 250 t.kr. hægri, um gjøldini á tænastum stovnsins vórðu dagførd.

### *5.1.8 Barsilsskipan (lógarbundin játtan) 6.39.4.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 70 mió.kr. Meirnýtslan er 6 mió.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 6,2 mió kr., 2,1 mió.kr. til frítíðarløn fyri gomul ár og 4,1 mió.kr. til ein tíðaravmarkanarfeil.

Fíggjarnevndin helt tað ikki vera rætt í desember 2004 at játta pening, sum er til útreiðslur í 2001 -02 -03, og mælti frá eykajáttan. Fíggjarnevndin vísti á, at slíkar útreiðslur eiga at verða staðfestar í roknskapinum og samtyktar av Løgtinginum, tá roknskapurin verður góðkendur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum var niðurstøðan hjá Løgtingsins Umboðsmanni í 2003, at Barsilsskipanin skal rinda frítíðarløn sambært frítíðarlógini. Útreiðslurnar til frítíðarløn fram til ultimo 2003 vórðu bókaðar í 2003. Tá ið Barsilsskipanin byrjaði at rinda út frítíðarpening á vári 2004, vísti ein nýggj uppgerð, at 2,3 mió kr. ov lítið vórðu settar av í 2003.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at harumframt vórðu 4,1 mió.kr. útreiðsluførdar í 2004, sum áttu at verið bókaðar í 2003. Freistin at bóka á fíggjarárið 2003 var farin, tá tíðaravmarkanarfeilurin varð funnin. Talan er um útreiðslur, sum fyrst og fremst stava frá muninum á útrokningargrundarlagnum hjá fólki í farloyvi, og tað, arbeiðsgevarar biðja um at fáa endurgoldið.

Arbeiðsloysisskipanin, sum umsitur Barsilsskipanina, vísti í juni 2004 á feilin, sum var um 4 mió.kr., men helt, at tørvur fór ikki at vera á eykajáttan. Mánaðarskiftið september/oktober 2004 boðaði Arbeiðsloysisskipanin frá, at umleið 2 mió.kr. komu at mangla í játtanini orsakað av útgjaldi av frítíðarpeningi fyri gomul ár. Stutt eftir boðaði Arbeiðsloysisskipanin Vinnumálaráðnum frá, at tørvur var á eykajáttan umleið 4 mió.kr. afturat til tíðaravmarkanarfeilin. 27. november 2004 sendi Arbeiðsloysisskipanin formelt umbøn til Vinnumálaráðið um eykajáttan 6,2 mió.kr.

Landsstýrismaðurin átalaði í november 2004 afturvendandi meirnýtsluna hjá Barsilsskipanini og spurdi Arbeiðsloysisskipanina, hvørji tiltøk hon ætlaði at seta í verk, so slíkt ikki endurtók seg. Sambært Arbeiðsloysisskipanini hava ongi sambærilig fordømi verið at tikið støði í. Ongi góð hagtøl hava verið til taks, og trupult hevur verið at meta um avleiðingarnar av lógarbroytingunum. Fyrr enn Barsilsskipanin hevur virkað eina tíð eftir lógarbroytingarnar hevur tað tí verið sera trupult at gjørt haldgóðar fíggjarætlanir. Í framtíðini er ætlanin at gera upp ársroknskapin, áðrenn fíggjarár landskassans letur aftur, soleiðis at útreiðslurnar verða bókaðar á rætt ár.

## 5.2 Minninýtsla

### *5.2.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 6.11.1.16.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 410 t.kr. netto. Minninýtslan er 177 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at skifta takið út á smiðjuni í Kollafirði, og varð arbeiðið boðið út. Tilboðini vóru væl hægri enn tað, sum var eftir av játtanini, og tí varð ætlanin útsett til 2005.

### *5.2.2 Fiskasjúkutænastur (rakstrarjáttan) 6.36.1.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.650 t.kr. Minninýtslan er 1.253 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin var at fara undir eina royndarverkætlan at royna koppingarevni móti ILA, men ætlanin varð av ongum, tí ES góðkendi ikki ætlanina í 2004. Tað er forboð móti ILA koppseting í ES, og sambært veterineru avtaluna við ES skulu Føroyar fáa góðkent slíka ætlan, áðrenn hon kann verða sett í verk. ES hevur góðkent ætlanina í 2005.

### *5.2.3 Sáttmálaeftirlitið (rakstrarjáttan) 6.37.1.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 300 t.kr. Minninýtslan er 208 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var virksemið á føroyskum skipasmiðjum lítið í 2004, og kostnaðurin av at fyrisita endurgjaldið til skipasmíð var tí lágur.

### *5.2.4 Endurgjald til skipasmíð 6.37.2.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 700 t.kr. Minninýtslan er 412 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 2,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 2 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var virksemið á føroyskum skipasmiðjum sera lítið í 2004.

### *5.2.5 Rúsdrekkasøla Landsins (landsfyritøka) 6.37.3.01.*

Á fíggjarlógini var avlopið hjá Rúsdrekkasølu Landsins sett til 11,1 mió.kr. Meirinntøkan er 1,2 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at nýta einar 2 mió kr. til at keypa útbúnað o.t., men bert 736 t.kr. vórðu nýttar til endamálið. Hetta tí at leiðslan tók fyrilit fyri, at sølan kundi falla seinni í árinum vegna búskaparligu útlitini í samfelagnum. Sølan vísti seg at verða støðug alt árið, og avlopið varð tí hægri enn mett var.

### *5.2.6 Stuðul til infrakervið á útoyggjum 6.38.1.18.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.400 t.kr. Minninýtslan er 348 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru forarbeiðini og arbeiðini upp á lendingar og bátahyljar á Kirkju, í Skúgvi og í Mykinesi antin ikki gjørd ella vórðu ikki gjørd liðug.

1. ætlanin var at nýta 100 t.kr. til at gera lendingina á Kirkju lidna, men tað varð av ongum, tí kommunan hevði nóg mikið at gera fyri SEV.
2. avsettar vóru 940 t.kr. til at máta, forkanna og prosjektera møguligan bátahyl og lending í Skúgvi og í Mykinesi. Partar av kanningunum vórðu ikki lidnir í 2004, og nýtslan varð tí 183 t.kr. minni enn ætlað.
3. ætlanin var at nýta 60 t.kr. til at tøma bátahylin í Mykinesi, men arbeiðið varð ikki gjørt í 2004.

### *5.2.7 Flogferðsla (lógarbundin játtan) 6.38.2.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.400 t.kr. Minninýtslan er 946 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin at fara undir at seta nýtt trygdarhegn upp kring flogvøllin í 2004, fyri at lúka tey krøv, sum loftferðslumyndugleikarnir seta ES flogvøllum. Av tí at semja ikki var um, hvussu umfatandi arbeiðið skuldi vera, játtaði Fólkatingið ongan pening til endamálið, og málið varð tí útsett til 2005.

### *5.2.8 Postverk Føroya (landsfyritøka) 6.38.3.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.235 t.kr. netto. Minninýtslan 3.014 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 2.335 t.kr. netto. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 1.100 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum vóru samlaðu útreiðslurnar næstan 3 mió.kr. hægri enn útreiðslujáttanin, og samlaðu inntøkurnar vóru næstan 6 mió.kr. hægri enn inntøkujáttanin.

Høvuðsorsøkin til avlopið var, at inntøkurnar frá brævapostinum og virkseminum, sum Postverkið rekur undir fríari kapping, vórðu nakað hægri, enn mett var í fíggjarætlanini. Nýggj prísavtala at avgreiða útlendskar pakkar, sum kom í gildi 1. apríl 2004, gav postverkinum munandi størri inntøkur.

## 5.3 <u>Umskipan av Postverki Føroya til partafelag</u>

### *5.3.1 Postverk Føroya, umskipað til partafelag 6.38.3.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 30 mió.kr. netto. Minninýtslan er 8,5 mió.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum gjørdi Postverk Føroya í 2003 eina meting av framtíðar íløgutørvinum og metti hann at vera 37 mió.kr. Við støði í hesari meting vórðu 30 mió.kr. játtaðar á fíggjarlógini 2004.

14. desember 2004 fekk landsstýrismaðurin politiska undirtøku fyri at lata postverkinum kapitalinnskot 20 mió.kr. Í avtalu í desember 2004 millum Føroya Postfelag og Postverk Føroya, í sambandi við umskipan til partafelag, er ásett, at galdandi sáttmáli verður longdur til 1. oktober 2007, og ásetingar eru um fráfaringarsamsýningar og játtan til eftirútbúgving til teirra, ið verða søgd úr starvi eftir umskipanina. Vinnumálaráðið helt fráfaringarsamsýningina koma at kosta einar 2 mió kr. meira enn fyrr mett, og landsstýrismaðurin fekk tí politiska undirtøku fyri at lata postverkinum kapitalinnskot 21,5 mió.kr.

Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at fráfaringarsamsýningin upprunaliga varð mett til 3,4 mió.kr., men ráðið helt hana kunna vaksa til 5,4 mió.kr., m.a. av lønarhækkingum. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at upprunaliga metingin bygdi á, at 25 starvsfólk, sum hava rætt til 6 mánaðar uppsagnarløn, fara úr starvi. Talan er um fólk við høgum starvsaldri.

Posteftirlitið vísti í skrivi 9. februar 2005 á, at sambært lógaruppskotinum um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya var trygdarevnið (lutfallið millum eginpening og skuld) 91%, og tað er óvanliga høgt fyri vanligar vinnufyritøkur. Posteftirlitið mælti Vinnumálaráðnum til at minka innskotið í fyritøkuna, fyri ikki at avlaga kappingina við almennum pengum. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at nógvar skyldur og bindingar eru

lagdar á P/f Postverk Føroya, sum tyngja og sum fara at tyngja um raksturin hjá felagnum. Nevnast kunnu avtalan millum Postfelag Føroya og Postverk Føroya í sambandi við umskipanina av Postverki Føroya, umframt tær skyldur, sum vórðu álagdar felagnum í eykajáttanarlógini mars 2005 og Ll. nr. 76 frá 27. mai 2005 "um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya."

Roknskapargrannskoðanin hjá Postverki Føroya gjørdi tvær rakstraræ̈tlanir fyri árini 2004 til 2007. Onnur bygdi á, at 20 mió.kr. vórðu settar í P/f Postverk Føroya, og hin, at 30 mió.kr. vórðu settar í felagið. Í fylgiskjølunum til lógaruppskotið er bert rakstraræ̈tlanin, har kapitalinnskotið er 30 mió.kr., løgd við.

Landsgrannskoðanin heldur, at tá nú bert 21,5 mió.kr. vórðu skotnar í felagið í 2004, hevði tað uttan iva verið meira hóskandi, at rakstraræ̈tlanin, sum bygdi á at kapitalinnskotið var 20 mió.kr., varð løgd við uppskotinum.

Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at upprunaliga var ætlanin at seta 30 mió.kr. í partapeningi í P/f Postverk Føroya, og tí varð rakstraræ̈tlanin, sum bygdi á at 30 mió.kr. vórðu settar í felagið, løgd við sum fylgiskjal til lógaruppskotið. Landsgrannskoðanin vil vísa á, at Løgtingið 15. desember 2004 samtykti at seta 21,5 mió.kr. sum partapening í felagið. Landsstýrismaðurin legði lógaruppskot fyri Løgtingið um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya 4. mars 2005. Tí skilir Landsgrannskoðanin ikki grundgevingina hjá landsstýrismanninum fyri bert at leggja rakstraræ̈tlanina, sum bygdi á eitt kapitalinnskot 30 mió.kr., sum fylgiskjal til lógaruppskotið.

Sambært roknskapargrannskoðanini eru fortreytirnar fyri rakstraræ̈tlanini (sum byggir á eitt innskot uppá 30 mió.kr.) m.a.,

- at nýggja partafelagið fær 30 mió.kr. í innskoti frá tí almenna,
- at mvg-viðurskiftini verða tey somu sum undir galdandi skipan,
- at munandi sparingar verða gjørdar í lønum (10 mió.kr. árliga, tá sparingarætlanirnar eru framdar, íroknað tær eftirlønarskyldur, sum tað almenna eftir ætlan yvirtekur),
- og framhaldandi príshækkingar á flestu tænastum við millum 5 og 10% í 2006 og 2007.

Sambært álitinum frá Vinnunevndini, ið varð lagt fyri Løgtingið 10. mai 2005, verður alt postvirksemið eftir umleggingina mvg-skyldugt. Talan er um eina meirútreiðslu upp á 3 mió.kr. Í 2004 vórðu 21,5 mió.kr. skotnar inn í partafelagið, og tær síðstu 8,5 mió.kr. av upprunaliga ætlaða innskotinum 30 mió.kr., eru endurjáttaðar á fíggjarlógini 2005. Tær 8,5 mió.kr. verða sambært nevndarálitinum veittar sum kompensatión fyri broytingina í mvg-viðurskiftunum hjá fyritøkuni. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at upphæddin verður ikki goldin út, fyrrenn greiða er fingin á, hvussu og við hvørjum treytum virksemið hjá Postverki Føroya verður lagt í P/f Postverk Føroya.

Sambært nevndarálitinum er nettoognin í Postverki Føroya, íroknað tær 21,5 mió.kr., sum eru skotnar í P/f Postverk Føroya, umleið 93,5 mió.kr, og tí skulu 72 mió.kr. skjótast inn í felagið, umframt tær 8,5 mió.kr., sum eru kompensatión fyri broytt mvg-viðurskifti. Í eykafíggjarlógini mars 2005 fekk landsstýrismaðurin fíggjarliga heimild at skjóta 74,7 mió.kr. inn í felagið. Tilsamans verður innskotið 104,7 mió.kr.

Av upphæddini, sum verður skotin inn í partafelagið, verður 21,5 mió.kr. eitt lán, rentað við 2,5% yvir diskonto-rentuna, og restin verður ábyrgdarpeningur. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at lánið verður ikki skrásett í landsroknskapinum, fyrrenn greiða er fingin á, hvussu og við hvørjum treytum virksemið hjá Postverki Føroya verður lagt í P/f Postverk Føroya.

Harafturat er ásett í lógini, at partafelagið bindur seg til at hava øll verandi posthús opin, til onnur hóskandi loysn er løgd fyri Løgtingið.

Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at eftir øllum at døma eru fleiri fortreytir fyri rakstraræ̈tlanini árini 2004-2007, sum roknskapargrannskoðanin segði vera avgerandi fyri, at

rakstrar- og gjaldførisætlanirnar skuldu halda, ikki til staðar. Harafturat eru aðrar skyldur lagdar á P/f Postverk Føroya, eitt nú rentuútreiðslur av láninum 21,5 mió.kr., at hava øll posthús opin, og at fráfaringarsamsýningarnar verða 2 mió.kr. hægri, enn ætlað.

### 5.3.2 Viðmerkingar frá postverksstjóranum

Í skrivi 11. mai 2005 til Vinnumálaráðið, undan 2. viðgerð av lógaruppskotinum um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya, gjørdi stjórin á Postverki Føroya vart við, at tær broytingar, sum Vinnunevndin hevði mælt til í álitinum, gjørdu, at grundarlagið undir einari komandi umlegging av Postverki Føroya var munandi broytt. Spurningurin fyri leiðsluna á Postverki Føroya var, um umleggingin var vinnubúskaparliga forsvarlig. Broytingarnar, sum Vinnunevndin hevði mælt til, tyngdu munandi um raksturin hjá P/f Postverki Føroya, sum sambært rakstraræztlanini fyri árini 2004-2007 frammanundan var tungur.

Sambært postverksstjóranum vórðu avleiðingarnar av broytingunum, at undirskotið 2005-2007 fór at verða millum 35 og 40 mió.kr., sum var tvífalt so nógv, sum roknað varð við í upprunaligu rakstraræztlanini.

Postverksstjórin vísti eisini á ógreidleikar í sambandi við, hvat varð roknað sum partapeningur, hvat var lán, hvat var ábyrgdarpeningur, hvørjar afturgjaldstreytirnar vóru fyri láninum, og hvørjar avdráttar- og rentutreytir vóru fyri ábyrgdarpeninginum.

Postverksstjórin staðfesti, at við teimum bindingum, sum broytingarnar hjá Vinnunevndini høvdu lagt á nýggja partafelagið, kann endamálið við umlegging av Postverki Føroya, at fáa ein smidligari rakstrarform at reka postvirksemi undir, ikki verða rokkið. Við nevndu broytingum gevur tað tí onga meining at leggja virksemið í eitt partafelag.

Postverksstjórin heitti á Vinnumálaráðið at gera sítt til, at broytingarnar hjá Vinnunevndini vórðu tiknar aftur ella at taka lógaruppskotið aftur.

### 5.3.3 Viðmerkingar frá nevndini

Í skrivi 15. juni 2005 til Vinnumálaráðið, eftir at lógin um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya var samtykt, gjørdi nevndarformaðurin í P/f Postverki Føroya vart við, at nevndin undraðist á, at Vinnunevndin ikki hevði kallað nevndina í P/f Postverkið Føroya inn í sambandi við viðgerðina av lógaruppskotinum. Nevndin var skelkað av teimum broytingum, ið vórðu framdar undir viðgerðini í Vinnunevndini.

Nevndarformaðurin vísti m.a. til skrivið frá postverksstjóranum og til notat, sum løgfrøðingur í juni 2005 hevði gjørt um løgfrøðiligu og partafelagsrættarligu avleiðingarnar av broytingunum hjá Vinnunevndini.

Nevndarformaðurin tók samanum og vísti á, at við framdu broytingum í ætlaðu kapitalviðurskiftunum hjá felagnum, og við teimum skyldum, sum Løgtingið hevði lagt á felagið, helt nevndin ikki kapitalviðurskiftini vera forsvarlig í mun til rakstrarútlitini hjá felagnum.

Nevndin helt tað ikki vera ráðiligt at yvirtaka raksturin við teimum fortreytum, sum lógin um umlegging av virkseminum hjá Postverki Føroya hevði givið P/f Postverki Føroya at virka undir, og mælti frá at leggja raksturin av Postverki Føroya yvir í P/f Postverk Føroya.

Nevndarformaðurin heitti at enda á Vinnumálaráðið um at taka umleggingina upp til nýggja viðgerð, so rímiligar og burðardyggar fortreytir kundu fáast til vega fyri komandi rakstri av P/f Postverki Føroya.

### 5.3.4 Frágreiðing frá Vinnumálaráðnum um trupulleikarnar við umskipanini

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, hvørja ávirkan skrivini frá postverksstjóranum og frá nevndini í P/f Postverki Føroya hava á tilgongdina.

Sambært Vinnumálaráðnum hevur landsstýrismaðurin tikið viðmerkingarnar frá postverksstjóranum og frá nevndini í P/f Postverki Føroya til eftirtektar, og landsstýrismaðurin

hevur í august 2005 reist málið á landsstýrisfundi og í skrivi til politisku flokkarnar, um at fáa undirtøku fyri av nýggjum at leggja fram sama uppskot til løgtingslóg, sum varð lagt fyri Løgtingið 4. mars 2005, tvs. uttan tær treytir, sum vórðu lagdar á partafelagið í sambandi við eykajáttanarlógina fyri mars 2005 og í Ll. nr. 76 frá 27. mai.

Vinnumálaráðið hevur í oktober 2005 greitt frá, at støðan er í løtuni hon, at tað tykist ikki vera politisk undirtøka fyri at leggja lógaruppskotið fyri tingið aftur, og at nevndin fyri P/f Postverki Føroya heldur tað ikki vera ráðiligt at yvirtaka virksemið hjá Postverki Føroya við teimum treytum, sum Ll. nr. 76/2005 "um at leggja virksemið hjá Postverki Føroya í P/f Postverk Føroya" hevur givið felagnum at virka undir. Vinnumálaráðið fer í næstum at taka málið upp aftur saman við avvarðandi pørtum, fyri at royna at finna eina loysn á málinum.

Vísandi til tað, sum stendur frammanfyri, tykist umskipanin av Postverki Føroya til partafelag verða veftað upp í ein ellubita.

### *5.3.5 Virðismeting av føstu ognunum*

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir virðismetingar av húsaognunum hjá Postverki Føroya í sambandi við ætlaðu umskipanina til partafelag.

mió.kr.

| | | Mett søluvirði 01-01-2000 | Mett søluvirði Sep. 2003 | Mettur byggikostn. Sep. 2003 |
|---|---|---|---|---|
| Tórshavn (Óðinshædd) | 1321b | 16,0 | 38,0 | 54,5 |
| Frímerkjadeildin (Argir) | 56cd | 18,0 | 18,0 | 23,5 |
| Klaksvík | 439 | 3,1 | 4,0 | 8,5 |
| Tvøroyri | 374 | 3,5 | 5,0 | 7,1 |
| Vági | 290c | 1,6 | 1,8 | 3,0 |
| Saltangará | 184 | 2,1 | 3,5 | 6,0 |
| Sandavágur | 271 | 0,3 | 0,5 | 0,7 |
| Gøta | 11d | 0,2 | 0,3 | 0,3 |
| Eiði | 356 | 0,7 | 0,8 | 0,9 |
| Strendur | 56 | 0,6 | 0,8 | 1,0 |
| Miðvágur | 142b/26c | 1,5 | 1,6 | 2,5 |
| Sørvágur | 199a | 0,1 | 0,2 | 0,2 |
| | | 47,7 | 74,3 | 108,0 |
| Frímerkjadeildin (Argir) verður ikki skotin inn | | | 18,0 | |
| Ognir, ætlanin er at skjóta inn í partafelagið | | | 56,3 | |

Virðismetingin pr. 1. januar 2000 av føstu ognunum hjá Postverki Føroya er ein uppgerð uttan útgreining ella frágreiðing. Roknskapargrannskoðanin skipaði fyri metingini, sum ein ráðgevingafyritøka gjørdi. Í uppgerðini verður kunnað um stað, matr.nr., stødd og "mett virði" á ognini. Tað gongur ikki fram av uppgerðini, um talan er um mettan byggikostnað ella søluvirði. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at talan var um eina meting av søluvirðinum. Tíðliga í 2000 var lógaruppskot orðað um at leggja Postverk Føroya um til partafelag, og ætlanin við virðismetingini var at nýta hana sum grundarlag fyri at skjóta ognirnar inn í partafelagið.

Í september 2003 hevur byggifrøðingur gjørt eina meting av byggikostnaði og søluprísi. Virðismetingin fevnir eisini um eina lýsing av grundøki, bygningi, byggihátti og standi á bygningunum.

Vísandi til talvuna frammanfyri er metta søluvirðið í 2003 hægri enn virðið í 2000 á øllum húsaognum uttan á posthúsinum á Argjum.

Metta søluvirði á matr. nr. 1321b í Tórshavn (Óðinshædd) er 22 mió.kr. hægri í 2003 enn í 2000. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at Postverk Føroya í 2001, 2002 og 2003 gjørdi 25 mió.kr. í íløgum í føstu ognirnar, íroknað 22 mió.kr. sum eru farnar til umbyggingar av bygninginum á Óðinshædd. Metingin av søluvirðinum á ognini á Óðinshædd var í 2000 á leið bókaða virðið á ognini. Hækkingin í mettum søluvirði svarar sostatt á leið til íløgurnar, sum eru gjørdar í bygningin í 2001, 2002 og 2003.

Landsgrannskoðanin vil gera vart við, at frímerkjadeildin á Argjum bæði í 2000 og í 2003, sambært frammanfyri umrøddu virðismetingum, er mett til søluvirði 18 mió.kr., samstundis sum landsstýrið roknar við at selja sama bygning fyri 36 mió.kr. bæði á fíggjarlógini 2004 og 2005. Hetta kundi bent á, at spurnartekin eisini kann setast við metta søluvirðið á ognum, ætlanin er skjóta inn í partafelagið.

### *5.3.6 Tænastumannaeftirlønarskyldur*

Á fíggjarlógini fyri 2005 eru 2 mió.kr. settar av á høvuðskontu 6.38.3.08 til eftirlønir til tænastumenn á Postverki Føroya. Postverkið rindar yvir raksturin tað, sum annars svarar til eftirlønina fyri "vanligar" sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna). Sambært viðmerkingum fara útreiðslur landskassans til endamálið leysliga mett at vaksa til umleið 5 mió kr. næstu 5-6 árini. Síðan fara útreiðslurnar at falla líðandi. Tað verður hildið at vera óheppið, at Postverk Føroya, ella rættari sagt brúkarin av posttænastunum, skal fíggja hesa eftirlønarskyldu. Tað vil eisini gera fyritreytirnar verri hjá Postverkinum at kappast.

Í skrivi 23. september 2004 til landsstýrismannin í fíggjarmálum mælti Lønardeildin frá, at landskassin við einari "hovsaloysn" átók sær eftirlønarskyldurnar hjá Postverkinum, skyldur fyri meira enn 100 mió.kr., uttan at nøkur kvalifiserað kanning av konsekvensunum varð gjørd. Lønardeildin mælti staðiliga til fyrst at gera eina forkanning av einari samlaðari loysn á eftirlønarøkinum, so politiski myndugleikin hevði eitt kvalifiserað avgerðargrundarlag.

Sambært skrivi 18. oktober 2004 til Fíggjarmálaráðið mælti Gjaldstovan, vísandi til skrivið hjá Lønardeildini, Fíggjarmálaráðnum til at krevja, at í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið varð kunnað um kapitaliseraða virðið av eftirlønarskylduni hjá Postverkinum, ið verður flutt í landskassan.

Harafturat vísti Gjaldstovan á, at Postverkið hevur verið ein isolerað rakstrareind, sum hevur skula fíggjað m.a. tænastumannaeftirlønir av sínum inntøkum, t.d. gjøldum, sum eru javnað sambært heimild í lóg. Gjaldstovan setti spurnartekin við, at ein so týdningarmikil partur uttan víðari varð fluttur úr rakstrinum og vísti á, at ein partur av privatiseringini kundi verið, at eftirlønarskyldan, ella partar av henni, varð tikin við sum skuld í partafelagnum. Landsgrannskoðanin hevur spurt, um landssstýrismaðurin ella Landsstýrið hevur viðgjørt spurningin, um at eftirlønarskyldan, ella partar av henni, verður tikin við sum skuld í partafelagnum. Vinnumálaráðið hevur greitt frá, at hesin spurningur ikki hevur verið viðgjørdur.

Landsgrannskoðanini kunnugt vóru upplýsingar tøkar um kapitaliseraða virðið av eftirlønarskyldum Postverksins væl áðrenn fíggjarlógaruppskotið 2005 varð lagt fyri tingið. Eftir áheitan frá Postverki Føroya lat LÍV 31. mars 2004 úr hondum eitt yvirlit yvir kapitaliseraðu eftirlønarskyldurnar hjá yvirtiknum tænastumonnum. Útrokningin er gjørd við støði í einari rentu á 2,5 % p.a., og er býtt upp í 3 bólkar. Danski parturin av eftirlønarskylduni er drigin frá. Upphæddirnar svara til, hvat tað vildi kostað landinum at keypt seg frá eftirlønarskyldunum:

Bólkur 1: 17 persónar, ið fáa eftirløn (27,9 mió.kr.)

Bólkur 2: 36 persónar, ið framvegis eru í starvi (65,9 mió.kr.)

Bólkur 3: 3 persónar við eftirlønarrætti (1,8 mió.kr.)

Samlaði kostnaðurin fyri eftirlønarskyldurnar fyri allar bólkarnar er mettur til 95,6 mió.kr. Vit hava spurt landsstýrismannin, hví Løgtingið ikki varð kunnað um samlaðu eftirlønarskyldurnar. Vinnumálaráðið vísir á, at tað tykist ikki vera siðvenja, í sambandi við lógaruppskot, at kunnað um, hvussu stórar kapitaliseraðu útreiðslurnar fara at verða fyri landskassan. Í staðin fyri verður bert víst á, hvussu stórar útreiðslurnar verða einstaka árið. Landsgrannskoðanin heldur, at í hesum føri hevði tað verið rættari at kunna Løgtingið um so stórar og týðandi skyldur.

Í uppgerðini av eftirlønarskylduni ger LÍV annars vart við, at av tí at upplýsingar vanta, er ikki roknað við møguligum hjúnafelaga í bólki 1. LÍV vísir eisini á, at 14 starvsfólk, ið eru farin úr starvi, og tí hava ein uppsettan eftirlønarrætt, eru ikki við í útrokningunum, tí upplýsingar vanta. Postverkið hevur í februar 2005 boðað frá, at harafturat vanta 4 persónar í bólki 1. Landsgrannskoðanin hevur tí spurt landsstýrismannin, hvussu stór samlaða kapitaliseraða eftirlønarskyldan er, sum landið hevur tikið á seg í sambandi við umskipanina av Postverki Føroya til partafelag. Vinnumálaráðið hevur boðað frá, at tað kennir ikki samlaðu kapitaliseraðu eftirlønarskylduna.

# 6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING

## 6.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) | 14.631 | 14.773 | 142 |
| Próvtøkur (rakstrarjáttan) | 5.725 | 5.793 | 68 |
| Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) | 1.456 | 1.744 | 288 |
| Stuðul til fólkaskúlar | 3.694 | 4.202 | 508 |
| Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) | 118.590 | 119.378 | 788 |
| Eftirútbúgving av yrkislærdum (rakstrarjáttan) | 200 | 242 | 42 |
| Maskinmeistaraskúlin (rakstrarjáttan) | 7.007 | 7.493 | 486 |
| Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan) | 14.916 | 15.077 | 161 |
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 1.401 | 1.508 | 107 |
| Lestrastudningur (lógarbundin játtan) | 64.324 | 64.810 | 486 |

### *6.1.1 Mentamálaráðið (rakstrarjáttan) 7.11.1.09.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14,6 mió.kr. Meirnýtslan er 142 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtsluna óvæntaður teldukostnaður og óvæntaður eyka starvsfólkakostnaður í sambandi við uppsagnir o.a.

### *6.1.2 Próvtøkur (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5.725 t.kr. Meirnýtslan er 68 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er kostnaðurin fyri útlendska próvdøming øktur.

### *6.1.3 Eftirútbúgving og skeið (rakstrarjáttan) 7.23.1.34.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.456 t.kr. Meirnýtslan er 288 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var í fleiri førum neyðugt at rinda samsýning eftir útlendskum sáttmálum, tí lærararnir taka verkliga partin av námsfrøðiligu útbúgvingini uttan fyri Føroyar. Vit hava spurt, hví landsstyrimaðurin ikki søkti um eykajáttan, áðrenn peningurin varð brúktur, ella setti neyðug tiltøk í verk, so játtanin fór at halda. Sambært landsstýrismanninum fekk MMR ikki rokningarnar frá skúlunum uttanlands fyrr enn útbúgvingin var lokin beint fyri árslok.

### *6.1.4 Stuðul til fólkaskúlar 7.23.2.03.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.694 t.kr. Meirnýtslan er 508 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er talan um írestandi endurgjald fyri 2003, sum varð goldið út í 2004, umframt meirútreiðslur í 2004 til Adventistaskúlan. Harafturat er talan um økt endurgjald fyri skúlabarnaflutning.

Søkt varð um 300 t.kr. í eykajáttan til øktu útreiðslurnar fyri skúlabarnaflutning í eykajáttanarlógini november 2003. Av misgáum hækkaði Mentamálaráðið ikki játtanina í fíggjarlógini 2004 tilsvarandi.

Sambært landsstýrismanninum er stuðulin til Adventistaskúlan og til skúlabarnaflutning lógarásettur, og kann ikki verða broyttur uttan við lógarbroyting. Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 730 t.kr. Fíggjarnevndin helt ikki

grundarlag vera fyri at mæla til meirjáttan, tí peningurin var longu brúktur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

### *6.1.5 Miðnámsútbúgvingar (rakstrarjáttan) 7.23.3.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 118.590 t.kr. netto. Meirnýtslan er 788 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum vóru lønarútreiðslurnar til handils- og studentaskúlarnar undirmettar. Spurdur, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at eingin sáttmáli var millum Fíggjarmálaráðið og Lærarafelag Handilsskúlans, tá ið fíggjarætlanin fyri 2004 varð løgd. Nýggi sáttmálin frá juli 2004 hevði við sær meirnýtslu til lønir 240 t.kr. Biðið var um eykajáttan til meirnýtsluna, men umbønin varð havnað. Harafturat hevði Føroya Studentaskúli meirnýtslu til lønir 420 t.kr., tí útreiðslan til starvsaldurshækkingar var ikki nóg neyvt mett.

Á fíggjarlógini vórðu útreiðslurnar upprunaliga mettar til 115.460 t.kr. netto. Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina:

- 3.130 t.kr. til eftirlønargjøld til handilsskúlalærarar aftur til 1988, og
- 240 t.kr. til lønarhækking í 2004.

Fíggjarnevndin tók ikki undir við at játta pening til lønarhækkingina í 2004, og mælti til einans at játta 3.130 t.kr. eyka. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Við árslok 2004 vóru 2,6 mió.kr. av eykajáttanini bókaðar á status í landsroknskapinum, soleiðis at peningurin er tøkur, tá ið skúlin veit, hvussu málið um eftirlønargjald skal avgreiðast. Mentamálaráðið hevur í februar 2005 greitt frá, at tær 2,6 mió.kr. skulu býtast millum umleið 70 sáttmálasettar lærarar, og síðani flytast til eftirlønarskipanina hjá hvørjum lønartakara sær. Trupult er at leita summar lærarar fram, t.d. hvar teir eru, ella at áseta føðingardag (p-tal), og onkur er deyður.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at í juni 2005 varð umleið 1 mió.kr. flutt til nakrar lærarar. Arbeitt verður við at avgreiða restina.

### *6.1.6 Eftirútbúgving av yrkislærdum (rakstrarjáttan) 7.23.3.21.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Meirnýtslan er 42 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu nakrar havnaðar umsóknir kærdar, og umsøkjararnir fingu viðhald.

### *6.1.7 Maskinmeistaraskúlin (rakstrarjáttan) 7.23.6.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.007 t.kr. netto. Meirnýtslan er 486 t.kr. netto.

Ein samd Fíggjarnevnd setti 5. mai 2004 fram broytingaruppskot um at lækka játtanina 500 t.kr. í løgtingsfíggjarlógini 2004. Broytingaruppskotið varð samtykt 13. mai 2004. Landsstýrismaðurin vísir á, at langtíðarsjúka gjørdi, at skúlan ikki kláraði at halda játtanina.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 500 t.kr. Fíggjarnevndin helt ikki grundarlag vera fyri at mæla til meirjáttan, tí peningurin var longu brúktur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

### *6.1.8 Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan) 7.23.6.13.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 14.916 t.kr. Meirnýtslan er 161 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum gjørdust lønarútreiðslurnar hægri enn mett var við ársbyrjan, samstundist gjørdist samraksturin við Tórshavnar Kommunu umleið 2-300 t.kr. lægri, so hóast spart varð á flestu økjum, var ikki gjørligt at sleppa undan einari ávísari meirnýtslu.

### *6.1.9 Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) 7.23.6.23.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.401 t.kr. netto. Meirnýtslan er 107 t.kr. netto.

Játtanin verður nýtt til granskingarverkætlan fyri økismenning. Sambært landsstýrismanninum er ein inntøka í 2004, 60 t.kr., bókað í 2005, og trupult var at skerja raksturin nóg mikið, eftir at játtanin varð lækkað 200 t.kr. í 2004 í mun til 2003.

### *6.1.10 Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) 7.23.7.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 64.324 t.kr. netto. Meirnýtslan er 486 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 63.024 t.kr. netto. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin hækkað 1.300 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum varð vanligi útbúgvingarstuðulin til lesandi í Føroyum (ÚS) og stuðulin til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN) hægri, enn mett var frammanundan.

## 6.2 Minninýtsla

### *6.2.1 Skúlatilboð fyri menningartarnað (løgujáttan) 7.23.2.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,3 mió.kr. Minninýtslan er 750 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum kom arbeiðið við at umbyggja hølini ikki rættiliga í gongd fyrrenn beint fyri árslok í 2004, og tí var bert møguligt at nýta ein part av játtanini.

### *6.2.2 Skúlatilboð fyri menningartarnað (rakstrarjáttan) 7.23.2.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 701 t.kr. Minninýtslan er 191 t. kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 1.101 t.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 400 t.kr. Sambært landsstýrismanninum byrjaði virksemið í skúlatilboðnum í august 2004 við færri starvsfólkum, og tí gjørdust lønarútreiðslur og virksemið sum heild minni, enn roknað var við.

### *6.2.3 Tekniski skúli í Klakskvík (løgujáttan) 7.23.3.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Eingin peningur er nýttur í 2004.

Sambært landsstýrismanninum hevur útbyggingarætlanin ligið still í umleið eitt ár. Stór frávik vóru frá upprunaligu útbyggingarætlanini, og tí varð neyðugt við nýggjari viðgerð.

### *6.2.4 Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) 7.23.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 658 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var prosjektering og byggifyrireiking ikki liðug við árslok 2004.

### *6.2.5 Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) 7.23.3.09.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3 mió.kr. Minninýtslan er 2,9 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum kom fyrireikandi arbeiðið ikki í gongd, tí eingin politisk støðutakan var í málinum.

### *6.2.6 Studningur til lærupláss (lógarbundin játtan) 7.23.3.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 15,5 mió.kr. Minninýtslan er 2,9 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum fall tilgongdin av lærlingum við umleið 20% í 2004 í mun til 2003 og árini frammanundan.

### *6.2.7 Ferðaendurgjald til læripláss (lógarbundin játtan) 7.23.3.18.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,6 mió.kr. Minninýtslan er 470 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum fall tilgongdin av lærlingum við umleið 20% í 2004 í mun til 2003 og árini frammanundan.

### *6.2.8 Føroya Brandskúli (rakstrarjáttan) 7.23.3.26.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 971 t.kr. netto. Minninýtslan er 146 t. kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum vóru skeiðsinntøkurnar hægri, enn mett var frammanundan.

### *6.2.9 Musikkskúlar (rakstrarjáttan) 7.23.5.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7,2 mió.kr. netto. Minninýtslan er 149 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 7 mió.kr. netto. Á eykajáttanarlógini august 2004 varð játtanin hækkað 240 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var eykajáttanin samtykt so seint í árinum, at nakrar setanir ikki kundu verða avgreiddar fyrr enn síðst í árinum.

### *6.2.10 Almanna- og heilsuskúli Føroya (løgujáttan) 7.23.6.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Eingin peningur er nýttur í 2004.

Sambært landsstýrismanninum varð arbeitt við at útvega skúlanum betri hølisumstøður, men funnið varð ikki fram til nóg góða loysn.

### *6.2.11 Ungdóms- og bygdahús 7.24.1.25.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2004.

Sambært landsstýrismanninum vóru ongar umsóknir so mikið áleiðis komnar, at stuðul kundi verða rindaður.

### *6.2.12 Bókasøvn (løgujáttan) 7.24.3.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,5 mió.kr. Minninýtslan er 1,1 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru tað ikki fleiri verkætlanir, ið kundu fáa stuðul.

### *6.2.13 Kirkjubømúrurin (løgujáttan) 7.24.3.23.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,6 mió.kr. Minninýtslan er 526 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum kom arbeiðið ikki longur í 2004.

## 6.3 Miðnámsskúlin í Suðuroy 7.23.3.06.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,5 mió.kr. Minninýtslan er 225 t. kr.

Í veruleikanum er talan um eina meirnýtslu 451 t.kr., tí sambært landsroknskapinum eru rokningar 676 t.kr. viðvíkjandi 2004 bókaðar í 2005.

Sambært almennu viðmerkingunum til uppskot til løgtingslóg "um at byggja skúladepil í Suðuroynni" – Lm. nr. 120/2002 – skuldi byggibúningararbeiðið byrja í 2003 og skuldi verða liðugt í 2004. Ætlanin var, at skúlin skuldi verða liðugur á vári 2006. Sambært Ll. nr. 87/2003 "um at byggja skúladepil í Suðuroynni" kunnu byggiútreiðslurnar í mesta lagi vera 45 mió.kr.

Sambært skrivi 10. januar 2005 frá arkitektavirkinum, ið stóð fyri arbeiðinum, hevði Mentamálaráðið fyribils steðgað arbeiðinum 7. januar 2005, og varð avleiðingin eftir ráðgevingaravtalu ABR[6] pkt. 7.1.1., at ein samsýning 238 t.kr. u/mvg skuldi gjaldast.

Sambært skrivi 16. juni 2005 frá arkitektavirkinum er arbeiðið endaliga steðgað, og eftir ráðgevingaravtaluni ABR 7.2.1. skal samsýning verða viðgjørd. Í sambandi við at arbeiðið varð steðgað, rindaði Mentamálaráðið, eftir semju 5. juli 2005, 110 t.kr. u/mvg fyri endaliga uppgerð, í staðin fyri tær 238 t.kr.

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, um aðrar beinleiðis ella óbeinleiðis útreiðslur stóðust av, at arbeiðið varð steðgað. Sambært landsstýrismanninum hevur arkitekturin eftir ABR 89 rætt til at seta fram endurgjaldskrav, tá ið eitt arbeiðið verður steðgað mitt í einum sáttmálaskeiði, men av tí at sama arkitektavirki heldur fram við prosjekteringsuppgávuni av nýggja skúladeplinum í Hovi/Porkeri, verður talan ikki um endurgjaldskrav í.s.v. Miðnámsskúlan í Suðuroy. Aðrar útreiðslur enn 110 t.kr. u/mvg verða ikki.

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, hví arbeiðið ikki varð boðið út. Sambært landsstýrismanninum hevur Landsverk í oktober 2005 gjørt sáttmála við sama arkitektavirki um prosjektering, soleiðis at øll grundleggjandi viðurskifti í.s.v. Miðnámsskúlan í Suðuroy kunnu verða nýtt aftur í Skúladeplinum í Suðuroy. Skúladepilin byggir á sama grundarlag sum Miðnámsskúlin í Suðuroy. Mentamálaráðið greiðir frá, at sambært Landsverki er tað ikki siðvenja, at slík arbeiði verða boðin út.

Sambært landsroknskapunum árini 2001–2004 eru nýttar 7,7 mió.kr., og í januar-september 2005 eru bókaðar 923 t.kr., tilsamans 8,6 mió.kr. Peningurin er nýttur til útgrevstur, byggibúning og prosjektering av miðnámsskúlanum í Vági.

Sambært Ll. nr. 75 frá 25. mai 2005 "um at byggja skúladepil í Suðuroynni" verður landsstýrismanninum heimilað at skipa fyri, at skúladepil verður bygdur í Hovi/Porkeri í staðin fyri í Vági, og byggiútreiðslurnar kunnu í mesta lagi vera 60 mió.kr.

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, hvussu stórur partur av teimum 8,6 mió.kr. eru farnar fyri skeytið, nú ætlanin at byggja skúlan í Vági er slept, og hvørjar ætlanir eru við byggilendinum í Vági.

Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um, hvussu stórur partur av teimum 8,6 mió.kr, sum nýttar er í Vági, koma at verða gagnnýttar í framtíðini, ella hvussu stórur partur kann sigast at vera farin fyri skeyti. Alt grundleggjandi arbeiði, sum er gjørt í.s.v. miðnámsskúlan, m.a. brúkarahoyringar o.a., verður nýtt aftur í.s.v. skúladepilin. Landsstýrið hevur arbeitt saman við kommununum í Suðuroy við ætlanum um at byggja ellis- og røktarheim á staðnum, og vinnur ætlanin frama, verður talan um minni upphæddir av tí peningi, sum er nýttur í Vági, sum fara fyri skeyti.

<u>Onnur viðurskifti</u>

Á fíggjarlógini 2005 eru útreiðslurnar til miðnámsskúlan í Suðuroynni mettar til 23 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin lækkað 1,2 mió.kr. Sambært almennu viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð m.a. "*biðið um at flyta løgujáttan fyri 1.150 tús. kr. frá Miðnámsskúlanum í Suðuroynni til skúlatilboð fyri menningartarnað.*"

Á eykajáttanarlógini september 2005 verður skotið upp, at játtanin lækkar 9 mió.kr. Sambært almennu viðmerkingunum til eykajáttanarlógina verður m.a. "*biðið um, at løgujáttanin til Miðnámsskúlan í Suðuroy verður lækkað 9 mió.kr. Av hesum verður biðið um, at 3,5 mió.kr. ístaðin verða nýttar til at keypa grundøki til Kringvarp Føroya. Biðið verður eisini um, at lestrarstuðulin hækkar 6,6 mió.kr.*"

6 ABR 89: Almindelige Bestemmelser for teknisk Rådgivning og bistand

Sambært Ll. nr. 75 frá 25. mai 2005 “um at byggja skúladepil í Suðuroynni” kunnu byggiútreiðslurnar til verkætlanina í mesta lagi vera 60 mió. kr. Við at lækka løgujáttanina til skúladepilin, bert fyri at aðrar eykajáttanir skulu vera “útreiðsluneutralar”, verður minninýtslan ikki staðfest í landsroknskapinum. Neyðugt verður at játta/endurjátta peningin til løgujáttanina á komandi fíggjarlógum, vísandi til løgtingslóg um at byggja skúladepil í Suðuroynni.

Seinastu árini er tað ofta komið fyri, at meira ella minni ítøkiligar løgujáttanir verða settar á fíggjarlógina, og tað tykist sum fleiri av hesum játtanum síðani verða nýttar til at tryggja “útreiðsluneutralitet”, soleiðis at løgujáttanir verða lækkaðar á eykajáttanarlógum fyri at nýta peningin til rakstrarútreiðslur.

Í § 43, stk. 1, í stýrisskipanarlógini er ásett at “*eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.*” Lógargreinin ásetir ikki, at væntaðar minniútreiðslur skulu við á eykajáttanarlógir.

Í álitinum til uppskotið til eykajáttanarlóg fyri november 2002 førdi minnilutin í Fíggjarnevndini m.a fram “*at eykajáttanarlógin við meirinntøkum minnir mest um tað, sum á fremmandum máli verður kallað “kreativ” bókføring. Meirinntøkur og ikki nýttar játtanir í einum fíggjarári koma í landskassaroknskapin og telja sostatt við í endaliga úrslitinum fyri viðkomandi fíggjarár. Tí hava vit ásetingina í stýrisskipanarlógini um, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið áðrenn 30. juni árið eftir.*”

Í álitinum til uppskotið til eykajáttanarlóg fyri desember 2003 førdi sami minnilutin aftur fram, at uppskot meirilutans m.a. “*als einki hevur við heimildarspurningin at gera, men bert tænir endamálinum at pynta upp á úrslitið.*”

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, hvørja støðu hann hevur til hesi sjónarmið. Sambært landsstýrismanninum heldur hann seg ikki vera tann rætta at viðmerkja málið. Landsstýrismaðurin vísir til rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum um eykajáttanir, har ásett er, at allar eykajáttanir skulu vera útreiðsluneutralar.

## 6.4 Ítróttaanlegg 7.24.6.12.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 717 t.kr. Minninýtslan er 17 t.kr.

Í frágreiðing um “Ymsar stuðulsveitingar á mentanarøkinum”, sum landsstýrismaðurin legði fram 16. november 2004 til aðalorðaskiftis - Lm. nr. 101-2/2004 – stendur m.a.:

> *Eingin formlig lógarheimild er hjá landsstýrismanninum til at játta stuðul til bygging av ítróttaanleggum. Einasta heimild er játtanin á løgtingsfíggjarlógini til ítróttaanlegg.*
>
> *Skal stuðulsmøguleikin varðveitast, verður neyðugt við heimildarlóggávu á økinum. Tó at eingin formlig lógarheimild er til at játta stuðul til bygging av ítróttaanleggum, hevur fyrisitingarliga mannagongdin verið grundað á fyrr umrøddu lógina um stuðul til bygging av ungdómshúsum, og á treytir, sum Landsverk, ið er ráðgevi hjá Mentamálaráðnum, nýtir í viðgerðini av hvørjum einstøkum byggimáli sær.*
>
> *Tað er trupult at geva ein greiða mynd av fíggjartørvinum næstu árini.* ***Í løtuni eru givnar tilsagnir um stuðul fyri umleið kr. 7 mió, og tá er ætlaða ítróttahøllin í Sandoy íroknað****. Hesar tilsagnir eru givnar við fyrivarni fyri, at ávísar nærri ásettar treytir verða loknar. Søkt er harafturat um stuðul fyri aðrar umleið kr. 20 mió.*

Vísandi til umrøddu frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin spurt, hvørja lógarheimild landsstýrismaðurin hevur at veita tilsagnir um stuðul, m.a. til ítróttarhøll á Sandoynni.

Í august 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at talan er um somu mannagongd, ið hevur verið nýtt seinastu nógvu árini, har stuðul verður játtaður, og í tilsøgnini stendur m.a. eitt fyrivarni um, at stuðulin er treytaður av, at játtan er tøk til endamálið.

Landsgrannskoðanin heldur ikki, at ein landsstýrismaður kann geva tílíkar tilsagnir uttan frammanundan at hava fingið heimild frá Løgtinginum. Landsgrannskoðanin skal í hesum sambandi vísa til Ll. nr. 81 frá 8. mai 2003 “um broyting í løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim”. Sambært hesi lógarbroyting fekk landsstýrismaðurin heimild at veita til-

sagnir í árunum 2003 - 2005 uppá í mesta lagi 57 mió.kr. Landsgrannskoðanin heldur hesa lóg vera dømi um, hvussu lóggevast kann um tilsagnir tvørtur um fíggjarár.

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir Mentamálaráðið við at gera lóg um ítróttaanlegg, og hon tekur spurningin um at geva tilsøgn um stuðul tvørtur um fíggjarár við í viðgerðina, m.a. við støði í Ll. nr. 81/2003.

# 7 INNLENDISMÁL

## 7.1 Meirnýtsla

### *7.1.1 Føroya kærustovnur (rakstrarjáttan) 15.14.1.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.723 t.kr. Meirnýtslan er 22 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevði stovnurin óvæntaðar høgar útreiðslur til advokathjálp í sambandi við kærumál, sum hevði vart í fleiri ár.

## 7.2 Minninýtsla

### *7.2.1 Dátueftirlitið (rakstrartjáttan) 5.14.2.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 912 t.kr. Minninýtslan er 88 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum nýtti stovnurin ikki alla starvsfólkanormeringina í 2004.

### *7.2.2 Stuðul til umhvørvisverndartiltøk 15.30.1.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1,9 mió.kr. Minninýtslan er 199 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu ikki allar stuðulsjáttanir fullnýttar.

### *7.2.3 Stuðul til útoyggjamenning 15.37.2.19.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 300 t.kr. Minninýtslan er 87 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var ein verkætlan ikki liðug í 2004.

### *7.2.4 Strandfaraskip Landsins 15.38.2.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 77,8 mió.kr. Minninýtslan er 190 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er hetta fyrstu ferð, síðani verandi jattanarskipan varð sett í gildi í 1997, at Strandfaraskip landsins hevur hildið upprunaligu játtanina.

### *7.2.5 Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) 15.38.2.02.*

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar mettar til 115,3 mió.kr. og inntøkurnar til 6,8 mió.kr. Minninýtslan er 42,6 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var síðsta gjaldið til IZAR-samtakið ikki goldið í 2004 orsakað av seinkingum.

Ætlanin var at selja Smyril, tá nýggja suðuroyarskipað varð sett í sigling. Av tí at nýggja skipið var seinkað, varð Smyril ikki seldur. Søluprísurin varð mettur til 6,75 mió.kr.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Barnaforsorg (lógarbundin játtan) | 30.057 | 31.190 | 1.133 |
| Barnap. veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 100 | 987 | 887 |
| Heilsufrøðiskipanin (rakstrarjáttan) | 8.922 | 9.221 | 299 |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 132.228 | 134.438 | 2.210 |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 190.388 | 193.457 | 3.069 |
| Umsorganararbeiði (lógarbundin játtan) | 4.600 | 4.990 | 390 |

### *8.1.1 Barnaforsorg (lógarbundin játtan) 8.21.3.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 30.057 t.kr. Meirnýtslan er 1.133 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Frípláss | 2.064 | 979 | - 1.085 |
| 02. Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m. | 27.793 | 30.108 | 2.315 |
| 03. Tilnevndi løgfrøðingurin | 200 | 103 | - 97 |
| **Tilsamans** | **30.057** | **31.190** | **1.133** |

Meirnýtslan stavar frá undirkontu 02. “Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m.”, sum hevði eina meirnýtslu, t.kr. 2.310.

Sambært landsstýrismanninum er trupult at meta um endaliga úrslitið, tí útreiðslurnar eru óstøðugar frá mánaði til mánað, og rokningar frá kommununum koma óregluliga og ofta ov seint til Almannastovuna.

### *8.1.2 Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) 8.21.3.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar netto 100 t.kr. Meirnýtslan er 887 t.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan av barnapeningi | 11.200 | 11.146 | -54 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindaðum barnapeningi | -11.100 | -10.159 | 941 |
| **Netto tilsamans** | **100** | **987** | **887** |

Meirnýtslan stavar frá “innkrevjing av forskotsrindaðum barnapeningi”, har umleið 1 mió.kr. eru kravdar minni inn, enn roknað varð við frammanundan.

### *8.1.3 Heilsufrøðiskipanin (rakstrarjáttan) 8.21.3.12.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8.922 t.kr. Meirnýtslan er 299 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vórðu tiltøk sett í verk í august 2004 at minka um útreiðslurnar, soleiðis at játtanin kundi fara at halda. Í oktober 2004 boðaði Heimarøktin Almanna- og Heilsumálaráðnum frá, at Heilsufrøðiskipanin kom at hava eina meirnýtslu 150 t.kr., tí at ein partur av rakstrinum var nýttur til neyðuga eftirútbúgving av heilsufrøðingum.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð tí skotið upp at hækka játtanin 150 t.kr. Fíggjarnevndin helt ikki grundarlag vera fyri at mæla til meirjáttan, tí peningurin longu var brúktur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum vísti tað seg við árslok, at meirnýtslan var upp aftur størri. Orsøkin var tvær óvæntaðar sjúkraskrivingar.

### *8.1.4 Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) 8.21.7.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 127 mió.kr. Meirnýtslan er 2,3 mió.kr. netto. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

mió.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg nov. 2004 | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 11,7 | - | 11,7 | 10,7 | -1,0 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 2,2 | - 0,2 | 2,0 | 2,0 | - |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 3,6 | - | 3,6 | 3,0 | -0,6 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 41,0 | 0,5 | 41,5 | 42,0 | 0,5 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 16,0 | 2,3 | 18,3 | 20,7 | 2,4 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 49,4 | - 9,4 | 39,9 | 40,3 | 0,4 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9,2 | 8,5 | 1,1 | 9,6 | 10,3 | 0,7 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | - | 0,4 | 0,4 | 0,3 | -0,1 |
| **Tilsamans** | **132,4** | **-5,4** | **127,0** | **129,3** | **2,3** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 132,4 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 5,4 mió.kr., serliga tí útreiðslurnar á undirkontu 06. “Hjálparamboð v.m.” vóru munandi lægri enn mett varð.

Meirnýtslan stavar m.a. frá undirkontu 05. “Endurbúgving § 18”, sum hevur eitt frávik 2,4 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum vórðu 21 nýggj vard størv sett í 2004. Útreiðslurnar til vard størv vuksu við 3.083 t.kr. í 2004 í mun til 2003.

### *8.1.5 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 8.21.8.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 190,4 mió.kr. Meirnýtslan er 3,1 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 194,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 4,1 mió.kr., vísandi til eina framskriving av útreiðslunum.

Sambært landsstýrismanninum vórðu fleiri umsóknir um fyritíðarpensjón játtaðar í seinnu helvt av 2004, enn roknað var við.

### *8.1.6 Umsorganararbeiði (lógarbundin játtan) 8.21.8.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.600 t.kr. Meirnýtslan er 390 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er stuðul veittur til nýtt virksemi, og hægri stuðul er latin verandi virksemi.

Sambært landstýrismanninum boðaði Almannastovan 10. desember 2004 Almanna- og Heilsumálaráðnum frá einari meirnýtslu umleið 300 t.kr. í 2004. Landsstýrismaðurin helt tað vera ov seint at søkja um eykajattan tá. Eykajáttanarlógin November 2004 varð løgd fyri tingið 16. november 2004 (2. viðgerð og 3. viðgerð av eykajáttanarlógini november 2004 var ávikavist 15. og 17. desember 2004.)

## 8.2 Minninýtsla

### *8.2.1 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 8.21.4.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 48,3 mió.kr. Minninýtslan er 731 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 52,6 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 4,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum minka dagpeningaútreiðslurnar, tá ið arbeiðsloysið veksur. Tá lækkar talið á fólki í arbeiði, og færri dagpeningamóttakarar fáa dagpeningahámark.

### *8.2.2 Serforsorg (rakstrarjáttan) 8.21.6.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 110,2 mió.kr. Minninýtslan er 4,8 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg nov. 2004 | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Serforsorg, vanligt virksemi | 76.017 | - | 76.017 | 73.598 | -2.419 |
| 21. Stovnsuppihald í Danmark | 21.046 | -2.046 | 19.000 | 17.315 | -1.685 |
| 22. Endurgjald av pensjón til føroyingar í DK | 1.287 | -87 | 1.200 | 982 | -218 |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og avvarðandi | 50 | 15 | 65 | 79 | 14 |
| 24. Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk | 200 | -20 | 180 | 148 | -32 |
| 26. Bústaðar- og virknisdeild fyri sinnisveik | 10.750 | - | 10.750 | 10.546 | -204 |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.000 | - | 3.000 | 2.776 | -224 |
| **Tilsamans** | **112.350** | **-2.138** | **110.212** | **105.444** | **-4.768** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 112,3 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2004 varð játtanin lækkað 2,1 mió.kr.

# 9 HEILSUMÁL

## 9.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) | 1.312 | 1.394 | 82 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 277.421 | 287.640 | 10.219 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 39.000 | 40.053 | 1.053 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 48.034 | 48.867 | 833 |
| Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 36.139 | 36.610 | 471 |
| Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) | 91.003 | 96.508 | 5.505 |
| Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) | 1.190 | 1.266 | 76 |
| Viðgerðastovnurin Blákrossheimið (rakstrarjáttan) | 4.604 | 4.717 | 113 |

### *9.1.1 Upplýsing og ráðgeving (rakstrarjáttan) 8.20.1.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.312 t.kr. Meirnýtslan er 82 t.kr., og farið er upp um lønarkarmin við 121 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum metti stovnsleiðarin í oktober 2004, at játtanin fór at halda. Landsstýrismaðurin søkti ikki landsstýrismannin í fíggjarmálum um loyvi til at fara upp um lønarkarmin, tí einki skriv kom frá stovnsleiðaranum um, at lønarkarmurin var ov lágur.

### *9.1.2 Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) 8.20.3.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 277,4 mió.kr. Meirnýtslan er 10,2 mió.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 5 mió.kr. til meirútreiðslur at keypa vørur:

- Heilivág 1,0 mió kr.
- Goymsluvørur 0,9 mió kr.
- El, olju og aðrar útreiðslur 1,6 mió kr.
- Keyp av tænastuveitinum 1,5 mió kr.
- Tilsamans 5,0 mió kr.

Í álitinum, sum varð lagt fyri Tingið 13. desember 2004, helt Fíggjarnevndin, at *"her er talan um pening, ið longu er brúktur, og er hetta ikki í samsvari við játtanarreglurnar. Nevndin ynskir tí at strika eykajáttanina"*. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna m.a.:

*at* nýggjur heilivágur kemur fram, sum serlæknar halda er rættur at royna.

*at* nýggjar og dýrari vørur til sjúkraviðgerð, skurðviðgerðir og røkt koma í staðin fyri tær, sum fyrr hava verið brúktar.

*at* nógv meira virksemi er í nýggja bygninginum enn upprunaliga mett.

Um orsøkina til, at umbønin um eykajáttana varð løgd fyri Tingið so seint í árinum, kunnaði landsstýrismaðurin í september 2005 um, at:

> *Tiltøk vórðu sett í verk longu á heysti 2004 fyri at tálma skeivu fíggjarligu gongdina. Ein seingjardeild (A3) varð soleiðis latin aftur í oktober mánaði 2004, og roynt var sum heild at halda aftur í øllum útreiðslum, har tað var møguligt.*

*Umbønin um eykajáttan 5.000 t.kr., sum send varð Fíggjarmálaráðnum í oktober 2004, og síðani løgd fyri Løgtingið 16. november 2004, var grundað á rakstrarfrágreiðing fyri Landssjúkrahúsið, sum landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum fekk í oktober 2004. Út frá metingunum, sum vóru gjørdar tá, varð roknað við, at sjúkrahúsið fór at hava eina meirnýtslu upp á 1-2 % av játtanini. Tað vísti seg tó, at meirnýtslan varð hægri – tilsamans 10,2 mió kr. ella 3%.*

Spurdur, um landsstýrismaðurin hevur bøtt um eftirlitið við, at játtanin heldur, svaraði landsstýrismaðurin í september 2005, at:

*Almanna- og Heilsumálaráðið hevur síðani á heysti 2004 fasta mannagongd í sambandi við góðkenningarskjøl fyri játtanarroknskapin (EK 76.0). Stovnsleiðari skal mótvegis aðalstýrinum góðtaka játtanarroknskapin, harímillum at játtan og lønarkarmur heldur. Um stovnsleiðarin hevur viðmerkingar til játtanarroknskapin, verða hesar viðmerkingarnar málsviðgjørdar. Um góðkenningarskjølini ikki eru innkomin til tíðina, verður stovnsleiðari kravdur eftir teimum.*

Umrødda skipan við serligum góðkenningarskjølum (EK 76.0) kom í gildi longu 1. februar 2001 sambært rundskrivi frá Fíggjarmálaráðnum um "Vegleiðing um roknskaparreglugerðir". Sambært landsstýrismanninum vórðu allir stovnsleiðarar undir landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum kunnaðir um rundskrivið beinanvegin, og teir eru mintir á at halda ásetingarnar í rundskrivinum. Á heysti 2004 varð nýggj mannagongd sett í verk hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum fyri at herða eftirlitið.

### 9.1.3 *Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 8.20.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 39 mió.kr. Meirnýtslan er 1.053 t.kr.

Landsstýrismaðurin vísir m.a. til eina semju upp á 625 t.kr., sum varð gjørd í desember 2004 millum Landssjúkrahúsið og E. Pihl & Søn Føroyar um, hvat teir í minsta lagi hava tilgóðar í sambandi við nýbygningin. Onnur meirnýtsla er m.a. øktar útreiðslur til ráðgeving o.a. í sambandi við at gera nýbygningin lidnan.

### 9.1.4 *Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) 8.20.3.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 48 mió.kr. Meirnýtslan er 833 t.kr. Farið er upp um lønarkarmin við 195 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er orsøkin til meirnýtsluna m.a.:

*at* útreiðslurnar til heilivág, nýtsluvørur annars, olju og ravmagn vórðu størri enn væntað.

*at* endurgjald frá Barnsburðargrunninum varð minni enn væntað.

*at* sjúka millum starvsfólk.

### 9.1.5 *Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) 8.20.3.15.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 33,1 mió.kr. Meirnýtslan er 471 t.kr.

Sambært landsstýrismanninumn er orsøkin til meirnýtsluna m.a.:

*at* fleiri langar sjúkrameldingar hava verið.

*at* útreiðslurnar til sjúkrarøkt, heilivág og olju vórðu størri enn væntað.

Spurdur, hví landsstýrismaðurin/stovnsleiðarin ikki søkti um eykajáttan, áðrenn peningurin varð brúktur, ella setti neyðug tiltøk í verk, so at játtanin fór at halda, kunnaði landsstýrismaðurin í september 2005 um, at *"sambært frágreiðing frá stovnsleiðara, metti leiðslan á sjúkrahúsinum, at játtanin fór at halda, og tí varð ikki søkt um eykajáttan."*

### 9.1.6 *Serviðgerð Uttanlands (rakstrarjáttan) 8.20.3.20.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 91 mió.kr. Meirnýtslan er 5,5 mió.kr.

Landsstýrismaðurin vísir á, at fíggjarlógin fyri 2004 varð ikki endaliga samtykt fyrr enn í mai mánaði í 2004, og *"gjørdi landsstýrismaðurin vart við støðuna so skjótt sum gjørligt eftirfylgjandi"*. Spurdur, til hvønn og hvussu landsstýrismaðurin hevði gjørt vart við støðuna, svaraði landsstýrismaðurin, at *"forsøgnin í august 2004 vísti, at játtanin fór ikki at røkka."*

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 1,9 mió.kr. Fíggjarnevndin helt ikki grundarlag vera fyri at mæla til meirjáttan, tí peningurin longu var brúktur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Frágreiðing um meirnýtslu

Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at talið á sjúklingum hevur verið vaksandi seinastu árini. Sambært landsstýrismanninum er talið á sjúklingum vaksið umleið 18% frá 2003 til 2004. Í 2003 varð skriv sent til táverandi virkandi læknastjóra, har heitt var á sjúkrahúsini um at raðfesta sjúklingarnir við kautiónum, soleiðis at bert teir sjúklingar, ið høvdu tørv á bráðfeingis viðgerð, skuldu sendast til viðgerðar uttanlands. Tí var væntandi, at tað fór at hava við sær, at í 2004 fór talið á sjúklingum at vaksa munandi, men tað bar ikki til frammanundan at siga, at vøksturin fór at verða heili 18,35%.

Skurðviðgerðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi

Játtanin til Serviðgerð Uttanlands er eisini nýtt til at gjalda útlendskum serlæknum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi løn og ferðaútreiðslur í sambandi við skurðviðgerðir av sjúklingum, sum annars høvdu verið sendir til Danmark. Í 2004 eru 1,5 mió.kr. nýttar til tílíkar skurðviðgerðir.

Sambært viðmerkingunum í fíggjarlógini 2004 *"kann játtanin til Serviðgerð Uttanlands eisini verða nýtt til at keypa tænastur frá útlandinum til serligar viðgerðir, soleiðis at til ber at viðgera sjúklingar í Føroyum, ístaðin fyri at senda sjúklingar uttanlands, um hetta hevur við sær sparingar í sjúkrahúsverkinum."*

Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin um at greiða gjøllari frá um hesum skurðviðgerðum.

Almanna- og Heilsumálaráðnum kunnugt, vórðu tílíkar skurðviðgerðir ikki framdar á Landssjúkrahúsinum og/ella á Suðuroyar sjúkrahúsi í 2004.

Sambært Klaksvíkar Sjúkrahúsi er tað yvirlæknin, ið tekur avgerð um tílíkar skurðviðgerðir. Almanna- og Heilsumálaráðið setir treytir, tá slíkar avtalur um skurviðgerðir vera gjørdar, og treytirnar eru millum annað, at:

- Tað samlað sæð hevur við sær eina sparing í føroyska sjúkrahúsverkinum.
- Talan skal vera um viðgerðir, ið sjúklingarnir annars høvdu verið sendir uttanlands til viðgerðar fyri.
- Føroysku sjúkrahúsini skula lata Almanna- og Heilsumálaráðnum frágreiðing um, hvat slag av skurðviðgerð talan er um, og útgreina prís fyri hvønn liðugt viðgjørdan sjúkling.
- ”Føroyski prísurin” fyri skurðviðgerðina verður samanborin við prísin fyri somu viðgerð í Danmark.
- Í avtaluni, ið verður gjørd, er ein fastur hámarksprísur avtalaður fyri hvørja skurðviðgerð hjá hvørjum sjúklingi. Avtalað er eitt fast tal á sjúklingum, og tíðarskeiðið skurðviðgerðinar skula fremjast í, liggur fast.
- Eftir at skurðviðgerðirnar eru framdar, verður gjørd ein eftirmeting, har biðið eisini verður um viðmerkingar frá sjúkrahúsinum.

Talan er um skurðviðgerðir, ið annars høvdu verið framdar í Danmark ella aðrastaðni, og læknarnir, ið gera hesar skurðviðgerðir, eru læknar við serligari servitan innan øki. Henda servitan finst ikki í Føroyum, og tí er ikki møguligt at fáa hesa viðgerð í Føroyum. Sambært landsstýrismanninum heldur skipanin fram í 2005.

Landsgrannskoðanin heldur, at tað tykist fløkjasligt, at ein játtan, markað til serviðgerð uttanlands, eisini verður nýtt til serviðgerð innanlands, eftir øllum at døma tó bert í Klaksvík. Landsgrannskoðanin heldur tað eisini vera nógv elastikk í treytini um, at *"talan skal vera um viðgerðir, ið sjúklingar annars høvdu verið sendir uttanlands til viðgerðar fyri."*

Aðrar útreiðslur

Játtanin til Serviðgerð Uttanlands verður eisini nýtt til at gjalda:

1. lønar- og ferðaútreiðslur til ein fulltrúa, sum skal samskipa virksemið millum visiterandi yvirlæknarnar og landsstýrismannin og kanna viðurskiftini millum sjúkrahúsini í Føroyum og í Danmark og Sjúklingahotellið Tórshavn,
2. grannskoðanarútreiðslur,
3. konsulentum á føroyskum sjúkrahúsum, t.d. serlækna í barna- og ungdómspsykiatri,
4. heilivág m.a. til dialysu til sjúklingar heima.

Ad 1. Lønar- og ferðaútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 372 t.kr. nýttar til lønar- og ferðaútreiðslur.

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin á, at eftir okkara tykki er tað ikki skilagott at býta arbeiðsuppgávurnar á einum stovni/aðalráði sundur við at løna starvsfólkum av teimum játtanum, tey skulu taka sær av.

Vit halda, at talan er um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið, ið hevur ábyrgdina av at umsita játtanina.

Spurdur, um nøkur ætlan er at broyta játtanina, kunnaði landsstýrismaðurin í september 2005 um, at *"fyribils er eingin ætlan um at broyta játtanina, hetta grundað á, at tann 17. mai 2005 er nýggj løgtingslóg um sjúkrahúsverkið samtykt. Ógreitt er, hvørjar avleiðingar nýggja lógin fer at hava við sær, og tí skulu lønarútreiðslurnar til fulltrúan ikki flytast, fyrr enn greiða er á hesum."*

Ad. 2. Grannskoðanarútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 24 t.kr. nýttar til grannskoðanarútreiðslur.

Eftir okkara tykki er talan um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Sambært landsstýrismanninum *"hava grannskoðanarútreiðslur ígjøgnum fleiri ár verið bókaðar á hesa høvuðskontuna. Ræðisrætturin til hesa játtan liggur inni hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum, og soleiðis er tað rætt, at umsitingin av játtanini er inni í ráðnum. Men ræðisrætturin kann til eina og hvørja tíð verða fluttur úr Almanna- og Heilsumálaráðnum til ein annan stovnsleiðara at umsita, og sostatt verður mett, at allar útreiðslur og inntøkur, sum eru tilkomnar vegna hesa játtan, skulu bókast har."*

Landsgrannskoðanin hevur ilt við at skilja grundgevingina hjá landsstýrismanninum. *"Allar tilkomnar útreiðslur"* kunnu vera partur av umsitingarútreiðslum av øllum handa slagi. Landsgrannskoðanin heldur, at tílík bókingarmannagongd kann avlaga og grugga roknskapin.

Ad. 3. Konsulentútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 600 t.kr. nýttar til konsulentútreiðslur.

Sambært landsstýrismanninum *"hevur siðvenja verið, at sertænastur, ið hava til endamáls at víðka um tænastustøðið til sjúklingarnar í Føroyum, eru goldnar av játtanini Serviðgerð Uttanlands. Talan er í løtuni um tríggjar sertænastur, ið verða goldnar av játtanini til Serviðgerð Uttanlands, og hesar eru konsulenttænastur innan nýrasjúkur (nefrologi), innan krabbamein- og blóðsjúkur (onkologi/hæmatologi) og innan barna- og ungdómspsykiatri."*

Landsgrannskoðanin heldur talan vera um útreiðslur, ið áttu at verið goldnar av viðkomandi sjúkrahúsi.

Ad 4. Heilivágsútreiðslur

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 1,2 mió.kr. nýttar til heilivágsútreiðslur.

Landsgrannskoðanin heldur, at útreiðslur til heilivág eiga at verða játtaðar av Almannastovuni sambært reglunum í K. nr. 100 frá 20. desember 1999 "um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini".

Sambært landsstýrismanninum *"er Almanna- og Heilsumálaráðið samt við Landsgrannskoðanini í, at útreiðslurnar til heilivág møguliga áttu at verið goldnar av aðrari játtan enn av játtanini til Serviðgerð Uttanlands. Í 2004 hevur verið arbeitt við at fáa greiði á, hvørjar útreiðslur til heilivág, ið verða goldnar av játtanini til Serviðgerð Uttanlands. Harumframt vórðu møguleikarnir fyri, at útreiðslurnar skula verða goldnar av játtanini til Almannastovuna, eisini lýstir. Almanna- og Heilsumálaráðið fer í næstum at arbeiða víðari við málinum."*

Viðmerkingar um at spjaða fyrisitingarútreiðslur

Sum víst á frammanfyri, undir "Serviðgerð Uttanlands", heldur Landsgrannskoðanin ikki, at tað fremur gjøgnumskygni at spjaða fyrisitingarútreiðslurnar hjá einum ráði/stovni út á aðrar játtanir. Landsgrannskoðanin hevur somuleiðis ilt við at skilja grundgevingina hjá landsstýrismanninum, tí *"Allar tilkomnar útreiðslur"* kunnu vera partur av umsitingarútreiðslum av øllum handa slagi. Landsgrannskoðanin heldur, at tílík bókingarmannagongd kann avlaga og grugga roknskapin.

Landsstýrismaðurin hevur boðað frá, at hann ikki skilir viðmerkingarnar hjá Landsgrannskoðanini um, at tílík bókingarmannagongd kann avlaga og grugga roknskapin.

Landsgrannskoðanin hevur í skrivi 13. oktober 2005 til landsstýrismannin m.a. víst á, at millum ár og dag hevur Landsgrannskoðanin gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað ikki er rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni uppí játtanir annars, ið ein stovnur umsitur. T.d. hevur Almannastovan ásannað, at tað ikki er rætt at kontera ávísar konsulentútreiðslur undir avlamisveitingar, ella ávísar ferðaútreiðslur undir forsorgarhjálp, hóast Almannastovan í fyrsta umfari vísti á, at talan var um serútreiðslur, sum vóru avleiddar av umsitingini av ávikavist avlamis- og forsorgarveitingum. – Tílíkar útreiðslur skal Almannastovan halda av rakstrarjáttanini til Almannastovuna.

Landsstýrismaðurin hevur eisini í skrivi 17. februar 2005 ásannað, at talan er ikki um útreiðslur, sum koma undir játtanina til forsorgarútreiðslur (hjálparamboð v.m. § 18), tá Hjálpartólamiðstøðin rindar fyri sakkøna hjálp frá Landsverki og Húsalánsgrunninum í sambandi við bústaðarbroytingar hjá viðskiftafólkum, ella rindar flutningsútreiðslur, tá ið hjálpartól skulu verða latin viðskiftafólkum. Talan er í báðum førum um umsitingarútreiðslur á játtanini "Hjálpartólamiðstøðin", hóast talan er um útreiðslur, sum eru avleiddar av at umsita eina aðra játtan.

Vit kunnu eisini nevna, at í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vísti Landsgrannskoðanin á, at Almanna- og Heilsumálaráðið 31. juli 2000 hevði sent rokningar fyri byggiumsiting til hesar løgukontur, sum Ráðið sjálvt hevði ræðisrættin yvir:

| | | |
|---|---|---|
| 8.20.3.08. | Landssjúkrahúsið, útbygging | kr. 120.000 |
| 8.21.6.02. | Bústovnar, serforsorg | kr. 100.000 |
| 8.21.6.16. | Eldrasambýli | kr. 100.000 |

Ráðið greiddi frá, at talan var um løn til tekniska stjóran. Peningurin var bókaður á felags íløgu- og viðlíkahaldskontur, ið tekniski stjórin skuldi taka sær av. Vit vístu á, at tað var ivasamt, um Ráðið kundi útreiðsluføra løn hjá einum starvsfólki í Ráðnum á aðrar játtanir. Á henda hátt ber til at seta starvsfólk, uttan at tað ávirkar nettoútreiðslu- og lønarkarmin. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at hann var samdur við okkum, at mannagongdin var ivasom.

Landsgrannskoðanin kann leggja afturat, at útreiðslur til lýsingar í útlendskum bløðum eftir kommunulæknum og samsýningar til "vikarbureau", verða hildnar á játtanini til kommunulæknaskipan, høvuðskonta 8.20.2.04. Í 2004 eru nýttar 119 t.kr. til lýsingar og 60 t.kr. til konsulenttænastu. Frá januar til september 2005 eru nýttar 74 t.kr. til lýsingar og 398 t.kr. til "formidlingsgebyr" til eitt "Rekrutteringsbureau".

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2004 "*er ikki nóg mikið bert at lýsa í útlendskum læknatíðarritum, neyðugt er at vera meira virkin á annan hátt, t.d. við at keypa sær tænastu frá fyritøkum fyri at fáa loyst trupulleikan. Kostnaðurin av at loysa trupulleikan á hendan hátt er varliga mettur til 200 t.kr. fyri hvønn kommunulækna, og tískil verður neyðugt at hækka játtanina til kommunulæknaskipanina.*"

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2005 "*er avtala gjørd við eina fyritøku um eina sonevnda rekrutteringsavtalu um kommunulæknar. Kostnaðurin av at loysa trupulleikan á henda hátt er varliga mettur til 270 t.kr. fyri hvønn kommunulækna.*"

Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið skilabetri, um hesar útreiðslur vórðu hildnar av játtanini til Ráðið. Eitt "rekrutteringsbureau" avlastar í ávísan mun starvsfólk í Almanna- og Heilsumálaráðnum, ið hava ábyrgdina av at fyrisita játtanina. Velur Ráðið at fara yvir til eina dýrari fyrisiting, er tað væl náttúrligt, at tað sæst aftur á játtanini til Ráðið.

Á sama hátt kundi Almanna- og Heilsumálaráðið luta ein stóran part av sínum útreiðslum millum eitt ótal av øðrum játtanum, Ráðið varðar av, t.d. lønarútreiðslur í mun til, hvussu nógvir arbeiðstímar hjá hvørjum starvsfólki eru farnir til at fyrisita ymiskar játtanir t.d. heilsuátøk, útbúgving av yngri læknum, landssjúkrahúsið, serviðgerð uttanlands, almannapensión, forsorgarhjálp, heimarøkt, ymsar studningsjáttanir, løgujáttanir o.s.fr.

Nevnast kann eisini, at á løgtingsfíggjarlógini 2005 eru á kontu 8.21.6.01.21. "Stovnsuppihald o.a. í Danmark" játtaðar 50 t.kr., og í fíggjarlógaruppskotinum 2006 er skotið upp at játta 100 t.kr. til at fylgja betur við viðurskiftunum hjá føroyingum, sum búgva á stovni í Danmark. Sambært skrivi 19. oktober 2005 frá landsstýrismanninum til Trivnaðarnevndina hevur *"Heimarøktin og Serforsorgin fingið sáttmála við ein føroying, sum hevur arbeiðsrelateraðar uppgávur í umsitingina í Danmark. Sáttmálin snýr seg um eftirlit við tilboðunum, sum føroyingar fáa á stovnum í Danmark."* Landsgrannskoðanin heldur, at eisini í hesum føri er talan um fyrisitingarútreiðslur, sum skulu verið játtaðar á høvuðskontu 8.21.6.08. "Meginskrivstovan fyri eldri og brekað".

Landsgrannskoðanin heldur ikki roknskapin verða nóg gjøgnumskygdan, um ein stovnur/ráð pilkar út nakrar av sínum útreiðslum, og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Hetta kann eisini verða við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Í ávísum førum kann vera skilagott at luta fyrisitingarútreiðslur sundur millum fleiri játtanir, um tað verður gjørt fyri at gera roknskapin rættari og meira gjøgnumskygdan, sæð út frá einum heildarsjónarmiði. Um eitt tílíkt útreiðslubýti skal verða sett í verk, má talan verða um eina væl skipaða og eina væl grundaða og almenna konteringarmannagongd, ið meginregluliga helst skal verða galdandi fyri allar stovnar og øll aðalráð í somu støðu.

Vit hava í oktober 2005 biðið Gjaldstovuna um viðmerkingar til tað sum stendur frammanfyri. Gjaldstovan hevur svarað , at "*vit síggja meir og meir, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Gjaldstovan heldur ikki, at hetta er beint, tí hetta verður brúkt í samanhangi við, at stovnarnir játtanarliga eru trýstir. Úrslitið er sjálvandi, at tað, sum hildið verður er fyrisiting, í veruleikanum ikki er rætta myndin av fyrisiting, tá ið samanum kemur. Søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar, tí tað, sum avgerðartakarin vanliga roknar fyri góða stýring ella sparingar, í ávísan mun er bókførsla á eini aðrari høvuðskontu.*"

### *9.1.7 Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu (rakstrarjáttan) 8.20.3.30.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.190 t.kr. Meirnýtslan er 76 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru gomlu landslæknahúsini, sum Deildin fyri arbeiðs- og almannaheilsu húsast í, í ringum standi og treingja til fleiri ábøtur. Húsini vórðu málað á sumri 2004, tí hildið var, at annars fór veruligt rot at koma í klædningin. Útreiðslurnar av hesum arbeiði og øðrum viðlíkahaldi vórðu størri, enn upprunaliga var mett.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 70 t.kr. Fíggjarnevndin helt, at henda útreiðsla átti at verða konterað undir høvuðskontu 11.1.18. "Viðlíkahald" og mælti frá at játta peningin. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Um orsøkina til, at umbønin um eykajáttana varð løgd fyri tingið so seint í árinum, kunnaði landsstýrismaðurin í september 2005 um, at *"útreiðslurnar til viðlíkahaldsarbeiðið vóru størri, enn stovnsleiðarin upprunaliga metti. Stovnsleiðarin sendi inn rakstrarfrágreiðing í oktober 2004, og landsstýrismaðurin søkti um eykajáttan seinast í oktober."*

### *9.1.8 Viðgerðarstovnurin Blákrossheimið (rakstrarjáttan) 8.20.4.03.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.604 t.kr. Meirnýtslan er 113 t.kr.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at hækka játtanina 130 t.kr. Fíggjarnevndin helt ikki grundarlag vera fyri at mæla til meirijáttan, tí peningurin var longu brúktur. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Um orsøkina til, at umbønin um eykajáttan varð løgd fyri tingið so seint í árinum, kunnaði landsstýrismaðurin í september 2005 um, at *"framrokningar vístu, at tað fór at verða umleið 2% í meirnýtslu á játtanini við verandi rakstri. Ongi nýggj tiltøk vóru sett í verk í árinum hjá Blákrossheiminum, og stovnsleiðarin hevði gjørt tær sparingar, sum hann metti vóru møguligar, uttan at siga fólki úr starvi."*

## 9.2 Minninýtsla

### *9.2.1 Almanna- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) 8.11.1.24.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 20.911 t.kr. Minninýtslan er 910 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 17.516 | 17.028 | -488 |
| 22. Ráð og nevndir | 265 | 83 | -182 |
| 27. AHS-netið | 2.000 | 1.989 | -11 |
| 28. Tilbúgving | 930 | 901 | -29 |
| 30.Trivnaðarkanningar | 200 | - | -200 |
| Tilsamans | 20.911 | 20.001 | -910 |

Sambært landsstýrismanninum fóru starvsfólk úr starvi í árinum, og eingin varð settur í teirra stað. Arbeiðið við trivnaðarkanningum steðgaði upp, tá val varð skrivað út í desember 2003. Fíggjarlógin fyri 2004 varð ikki samtykt fyrr enn í mai mánaði 2004, og arbeiðið fór ongantíð í gongd aftur.

### *9.2.2 Útbúgving av yngri læknum (rakstrarjattan) 8.20.2.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.311 t.kr. Minninýtslan er 277 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru færri yngri læknar undir útbúgving í 2004, enn mett var frammanundan.

### 9.2.3 *Skúlalæknaskipanin (rakstrarjattan) 8.20.2.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 201 t.kr. Minninýtslan er 92 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hendi eingin broyting í skúlalæknaskipanini í 2004.

### 9.2.4 *Apoteksverkið (landsfyritøka) 8.20.2.08.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 1.957 t.kr. Meirinntøkan er 704 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirinntøkan í veruleikan um 1.300 t.kr. Tá ið roknskaparárið lat aftur, vóru ikki allar bókingar hjá Apoteksverkinum framdar, ein broyting í vørugoymslu, 1.057 t.kr., sum skuldi inntøkuførast, og íløgur í teldubúnað, umleið 450 t.kr., sum skuldu útreiðsluførast.

Sambært Gjaldstovuni eru eftirbókingarnar skrásettar í roknskapinum 2005, tí roknskapurin fyri 2004 var farin til prentingar, tá ið eftirbókingarskjalið varð sent Gjaldstovuni 8. juni 2005. Tílíkar eftirbókingar eiga ikki at koma fyri í juni mánað. Hetta er í stríð við ásettar tíðarfreistir og góðkenningarmannagongdir. Landsstýrismaðurin vísir í august 2005 m.a. á, at tá Almanna- og Heilsumálaráðið 6. apríl 2005 góðkendi greinaroknskapin fyri almanna- og heilsumál, hevði landsapotekarin ikki sent góðkenningarskjalið inn fyri 2. ískoytisskeið.

Almanna- og Heilsumálaráðið hevur í september 2005 kunnað um, at Landsapotekarin higartil bert hevur sent Almanna- og Heilsumálaráðnum góðkenningarskjal fyri roknskapin fyri januar mánaða 2005. Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin greiða frá, hvørji stig hann ætlar at taka fyri at fáa viðurskiftini í rættlag. Sambært landsstýrismanninum hevur Almanna- og Heilsumálaráðið í apríl 2005 álagt Landsapotekaranum at senda góðkenningarskjøl fyri øll tíðarskeiðini, og Landsapotekarin hevur játtað at fylgja boðunum.

### 9.2.5 *Medicoteknisk tól (løgujáttan) 8.20.3.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2 mió.kr. Minninýtslan er 7 t.kr.

Sambært Búskaparskipan Landsins eru 8 t.kr. nýttar til grannskoðanarútreiðslur. Sum neyvari greitt frá frammanfyri, heldur Landsgrannskoðanin, at talan er um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið.

## 9.3 Góðkenningarmannagongdir

Í seinastu frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar frá mars 2005 vísti Landsgrannskoðanin m.a. á:

> *Seinasti mánaðarroknskapurin er at rokna sum ársroknskapurin, og stovnsleiðarin skal góðkenna ársroknskapin á serstøkum góðkenningaroyðublað. Eru viðurskifti, sum ikki eru í lagi, skal vera kunnað um tey á góðkenningarskjalinum.*
>
> *Gjaldstovan skal hava avrit av øllum góðkenningaroyðubløðum og møguligum fylgiskjølum og skrásetir, so hvørt stovnarnir hava sent oyðubløðini inn. Sambært yvirliti hjá Gjaldstovuni eru 509 stovnsnummur í landsroknskapinum 2003. Góðkenningarskjøl fyri 121 stovnsnummur eru ikki send inn. Almanna- og Heilsumálaráðið varðar av 56 teirra.*

Vit hava spurt, hvørji tiltøk landsstýrismaðurin hevur sett í verk fyri at fáa viðurskiftini í rættlag, og hvørjir stovnar, sum Almanna- og Heilsumálaráðið varðar av, ikki hava sent Gjaldstovuni avrit av góðkenningarskjølum viðvíkjandi landsroknskapinum 2004. Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at í 2004 vantaðu 18 góðkenningarskjøl at verða send inn. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur rykt eftir skjølunum, men hevur ikki fingið øll inn.

Frá januar 2005 er eftirlitið komið í eina fasta legu, og Ráðið fylgir neyvt við, at góðkenningarskjøl verða send Ráðnum til ásettu tíðina. Fyribils hevur Ráðið gjørt av at gera upp hvørt hálvár, um stovnur undir Almanna- og Heilsumálaráðnum vantar at senda inn góðkenningarskjalið. Er góðkenningarskjalið ikki komið inn, fær stovnurin boð um at tað.